| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Blað nr.: 868 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 19. september 2024 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 195/24 – 237/24**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen (luttók í viðgerðini av málunum 210/24 – 237/24)

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Eyðfríð Jacobsen
Hermann Mortensen
Fríður P. Dalsgarð
David Andresen
Mortan Simonsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 195/24 | 24/00063-1 | Mál beind í nevndir 2024 | 872 |
| 196/24 | 23/05592-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið til býráðsvalið 2024 fyri Tórshavn, Sund, Mjørkadal, Norðradal, Hest og Koltur | 874 |
| 197/24 | 23/05010-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið til býráðsvalið 2024 fyri Hoyvík | 875 |
| 198/24 | 24/07640-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Nólsoy til býráðsvalið 12. november 2024 | 876 |
| 199/24 | 24/07641-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Velbastað, Kirkjubø og Syðradal til býráðsvalið 12. november 2024 | 877 |
| 200/24 | 24/07642-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Kollafjørð til býráðsvalið 12. november 2024 | 878 |
| 201/24 | 24/07643-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Kaldbak og Kaldbaksbotn til býráðsvalið 12. november 2024 | 879 |
| 202/24 | 24/07644-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Argir til býráðsvalið 12. november 2024 | 880 |
| 203/24 | 24/03516-3 | Matr.nr. 22s, Kaldbak. Eigari søkir um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum. | 881 |
| 204/24 | 24/06612-2 | Matr.nr. 255cv, Kirkjubøur,Argir. Klingurstjørn 2. Eigari ynskir at lata óbygda grundstykkið innaftur til kommununa. | 883 |
| 205/24 | 24/06771-2 | Matr.nr. 139aa, Hoyvík. Eigiri søkir um loyvi til víðarisølu av óbygdum grundstykki á Skarðshjalla. | 885 |
| 206/24 | 24/07315-2 | Matr.nr. 135np, Hoyvík. Karlamagnussarbreyt 56. Eigari søkir um loyvi til at selja ognina. | 887 |
| 207/24 | 24/02946-6 | Hølisloysn til forskúla i Kollafjarðar skúla | 889 |
| 208/24 | 18/04076-1 | Møgulig standmynd/minnismerki um Andreu Árting | 892 |
| 209/24 | 22/04638-2 | KÍF: Umsókn um stuðul til liðugtgerð av kappróðrarneystinum | 899 |
| 210/24 | 15/01400-1 | Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 901 |
| 211/24 | 15/04352-4 | Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin | 921 |
| 212/24 | 19/00853-1 | Dagføring av Jøkulstræti | 929 |
| 213/24 | 20/04029-1 | Ferðslutrygd við Eysturskúlan | 933 |
| 214/24 | 21/02118-1 | Dagføring av Norðara Ringvegi við Norðurlandahúsið | 937 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 215/24 | 24/00543-1 | Miðoyggj og gonguteigur á Løgmannabreyt, millum Atlagøtu og Kirkjustræti | 941 |
| 216/24 | 24/01618-1 | Umbøn um eykajáttan til kontu 6510 | 943 |
| 217/24 | 21/03668-1 | Grasagarður - Spælipláss 2021 | 946 |
| 218/24 | 23/06318-2 | Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 5.1 og øki 5.2 | 951 |
| 219/24 | 22/02144-1 | Skeltisreglugerð | 958 |
| 220/24 | 23/05924-1 | Bygdastrategiir | 969 |
| 221/24 | 24/00551-3 | Umsókn um yvirtøku av vegi, matr. nr. 1106g og matr. nr. 1106q, Tórshavn | 973 |
| 222/24 | 21/00804-6 | Broyting av byggisamtykt fyri matr. nr. 193 og 191b, Gr. Kambansgøta 11, Tórshavn | 975 |
| 223/24 | 22/07222-13 | Heildarætlan fyri matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og b | 983 |
| 224/24 | 23/00472-4 | Umbøn um broyting av byggisamtykt matr. nr. 2a, norðuri á Heyggi 24, Velbastað | 987 |
| 225/24 | 23/02842-6 | Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 5 | 990 |
| 226/24 | 24/06485-1 | Broyting í almennu byggisamtyktini - Umhvørvisstovan krevur serstaka byggisamtykt ísmbv. sundurbýti av matriklum | 993 |
| 227/24 | 24/07021-1 | Nýggjar mannagongdir fyri burturbeining av asbest | 995 |
| 228/24 | 24/07174-4 | Tórshavnar havn : Uttanumøkið kring bygningarnar hjá Faroe Ship | 998 |
| 229/24 | 24/03276-1 | Eykajáttan, lønarlyft og samtyktar stuðulsútreiðslur | 1000 |
| 230/24 | 24/07632-1 | Matarskipan til børn og ung í Tórshavnar kommunu | 1002 |
| 231/24 | 24/00061-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024 | 1004 |
| 232/24 | 24/07634-2 | Matr.nr. 22aa, Kaldbak. Eigarar søkja um loyvi til víðarisølu av ognini. | 1007 |
| 233/24 | 24/07283-2 | Fólkabókasøvn Samstarvsavtala | 1009 |
| 234/24 | 24/07727-1 | Endurskoðan av Eldraráðnum | 1012 |
| 235/24 | 24/01095-1 | Dagføring av fyrisitingini á Brennistøðini | 1014 |
| 236/24 | 24/07671-1 | Gjaldføri 2024 | 1017 |
| 237/24 | 24/07504-1 | Fíggjarætlan 2025, Tórshavnar kommuna | 1019 |

**Til viðgerðar**

## 195/24 Mál beind í nevndir 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 3/24 | 24/00063-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 27/24 | 24/00063-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 51/24 | 24/00063-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 72/24 | 24/00063-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 109/24 | 24/00063-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2024 | 142/24 | 24/00063-1 |
| 7 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 195/24 | 24/00063-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 196/24 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið til býráðsvalið 2024 fyri Tórshavn, Sund, Mjørkadal, Norðradal, Hest og Koltur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 198/23 | 23/05592-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 196/24 | 23/05592-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Tórshavn, Sund, Mjørkadal, Norðradal, Hest og Koltur til býráðsvalið 2024, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

Víst verður til fundarskipan fyri Tórshavnar býráð § 16 Lutfalsval, ið er soljóðandi:

“ **1 . petti.** Tá ið býráðið skal velja 2 ella fleiri limir í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir lutfalsvalháttinum.
**2. petti.** Við lutfalsvali verður sipað til ein valhátt, har býráðslimir frammanundan boða borgar-stjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.
**3. petti.** Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3, o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.
**4. petti.** Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgartjórin skipar fyri.
**5. petti.** Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør umboðar hvønn bólkin.
**6. petti.** Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir pettunum 1-3 .”

Á býráðsfundur 25. august 2020 vórðu hesi vald: Magnus Dam, Kára á Dunga, Rókur Tummarsarsson og Petur Elias Petersen.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja Hjalgrim Samuelsen fyri Magnus Dam.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Valdur varð: Hjalgrím Samuelsen.

**Ískoyti:**
Neyðugt er at velja nýggj umboð fyri Káru á Dunga og Petur Elias Petersen.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja nýggj umboð í valstýrið fyri Tórshavn, Hvítanes, Sund, Mjørkadal, Norðradal, Hest og Koltur.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Vald vórðu: Helena Dam á Neystabø og Martin Djurhuus.

# 197/24 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið til býráðsvalið 2024 fyri Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 199/23 | 23/05010-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 197/24 | 23/05010-1 |

**Upprunin til málið**
Løgmálaráðið hevur tann 27. juni 2023 góðkent, at Hoyvík verður nýtt valstað og tí skal býráðið velja valstýrið fyri Hoyvík til býráðsvalið 2024.

**Málslýsing**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Hoyvík til býráðsvalið 2024, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

Víst verður til fundarskipan fyri Tórshavnar býráð **§ 16 Lutfalsval,** ið er soljóðandi:

*“**1. petti.** Tá ið býráðið skal velja 2 ella fleiri limir í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir lutfalsvalháttinum.*

***2. petti.** Við lutfalsvali verður sipað til ein valhátt, har býráðslimir frammanundan boða borgar-stjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.*

***3. petti.** Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3, o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.*

***4. petti.** Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgartjórin skipar fyri.*

***5. petti.** Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør umboðar hvønn bólkin.*

***6. petti.** Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir pettunum 1-3.”*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at velja Magnus Dam og Eyðfríð Jacobsen í valstýrið í Hoyvík saman við einum umboði, sum samgongan velur og einum umboði, sum andstøðan velur.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Vald vórðu: Irma Justinussen, Gunnar Djurhuus, Eyðfríð L. Jacobsen og Magnus Dam.

**Ískoyti:**
Neyðugt er at velja nýtt umboð fyri Gunnar Djurhuus.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja nýtt umboð í valstýrið fyri Hoyvík.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Valdur varð: Jákup Símun Simonsen.

| | Býráðsfundur<br>19. september 2024 | Blað nr.: 876 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# 198/24 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Nólsoy til býráðsvalið 12. november 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 198/24 | 24/07640-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Nólsoy til býráðsvalið 12. November 2024, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

Víst verður til fundarskipan fyri Tórshavnar býráð **§ 16 Lutfalsval**, ið er soljóðandi:

*" **1 . petti.** Tá ið býráðið skal velja 2 ella fleiri limir í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir lutfalsvalháttinum.*

***2. petti.** Við lutfalsvali verður sipað til ein valhátt, har býráðslimir frammanundan boða borgar-stjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.*

***3. petti.** Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3, o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.*

***4. petti.** Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgartjórin skipar fyri.*

***5. petti.** Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør umboðar hvønn bólkin.*

***6. petti.** Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir pettunum 1-3 ."*

Á býráðsfundur 25. august 2020 vórðu hesi vald: Kirstin Jacobsen, Jógvan Thomsen og Evy Toftegaard Nielsen.

Valdu limirnir í valstýrinum fyri Nólsoy eru sinnaðir at halda fram í valstýrinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja valstýrið fyri Nólsoy.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Vald vórðu: Kirstin Jacobsen, Jógvan Thomsen og Evy Toftegaard Nielsen.

# 199/24 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Velbastað, Kirkjubø og Syðradal til býráðsvalið 12. november 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 199/24 | 24/07641-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Velbastað, Kirkjubø og Syðradal til býráðsvalið 12. november 2024, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

Víst verður til fundarskipan fyri Tórshavnar býráð **§ 16 Lutfalsval**, ið er soljóðandi:

*“ **1 . petti.** Tá ið býráðið skal velja 2 ella fleiri limir í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir lutfalsvalháttinum.*

***2. petti.** Við lutfalsvali verður sipað til ein valhátt, har býráðslimir frammanundan boða borgar-stjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.*

***3. petti.** Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3, o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.*

***4. petti.** Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgartjórin skipar fyri.*

***5. petti.** Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør umboðar hvønn bólkin.*

***6. petti.** Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir pettunum 1-3 .”*

Á býráðsfundur 25. august 2020 vórðu hesi vald: Turid Kjølbro, Súsanna Andreassen, Ragnhild Sandoy og Jan Otto Holm.

Valdu limirnir í valstýrinum fyri Velbastað, Kirkjubø og Syðradal eru sinnaðir at halda fram í valstýrinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja valstýrið fyri Velbastað, Kirkjubø og Syðradal.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Vald vórðu: Turid Kjølbro, Súsanna Andreassen, Ragnhild Sandoy og Jan Otto Holm.

# 200/24 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Kollafjørð til býráðsvalið 12. november 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 200/24 | 24/07642-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Kollafjørð til býráðsvalið 12. november 2024, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

Víst verður til fundarskipan fyri Tórshavnar býráð **§ 16 Lutfalsval**, ið er soljóðandi:

*“ **1 . petti.** Tá ið býráðið skal velja 2 ella fleiri limir í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir lutfalsvalháttinum.*

***2. petti.** Við lutfalsvali verður sipað til ein valhátt, har býráðslimir frammanundan boða borgar-stjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.*

***3. petti.** Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3, o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.*

***4. petti.** Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgartjórin skipar fyri.*

***5. petti.** Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør umboðar hvønn bólkin.*

***6. petti.** Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir pettunum 1-3 .”*

Á býráðsfundur 25. august 2020 vórðu hesi vald: Elna Debess, Mariann Jacobsen, Christian Martin Dam og Arnbjørn Kristiansen.

Valdu limirnir í valstýrinum fyri Kollafjørð eru sinnaðir at halda fram í valstýrinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja valstýrið fyri Kollafjørð.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Vald vórðu: Elna Debess, Mariann Jacobsen, Christian Martin Dam og Arnbjørn Kristiansen.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Blað nr.: 879<br>Formansins merki: |

# 201/24 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Kaldbak og Kaldbaksbotn til býráðsvalið 12. november 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 201/24 | 24/07643-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Kaldbak og Kaldbaksbotni til býráðsvalið 12. november 2024, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

Víst verður til fundarskipan fyri Tórshavnar býráð **§ 16 Lutfalsval**, ið er soljóðandi:

*" **1 . petti.** Tá ið býráðið skal velja 2 ella fleiri limir í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir lutfalsvalháttinum.*

***2. petti.** Við lutfalsvali verður sipað til ein valhátt, har býráðslimir frammanundan boða borgar-stjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.*

***3. petti.** Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3, o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.*

***4. petti.** Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgartjórin skipar fyri.*

***5. petti.** Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør umboðar hvønn bólkin.*

***6. petti.** Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir pettunum 1-3 ."*

Í valstýrinum eru: Jórun Petersen, Petur Skeel Nolsøe, Finnbjørn Simonsen og Snorri á Bøgarði.

Valdu limirnir í valstýrinum fyri Kaldbak og Kaldbaksbotn eru sinnaðir at halda fram í valstýrinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja valstýrið fyri Kaldbak og Kaldbakbotn.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Vald vórðu: Jórun Petersen, Petur Skeel Nolsøe, Finnbjørn Simonsen og Snorri á Bøgarði.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Blað nr.: 880<br>Formansins merki: |

# 202/24 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Argir til býráðsvalið 12. november 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 202/24 | 24/07644-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Argir til býráðsvalið 12. november 2024, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

Víst verður til fundarskipan fyri Tórshavnar býráð **§ 16 Lutfalsval**, ið er soljóðandi:

*" **1 . petti.** Tá ið býráðið skal velja 2 ella fleiri limir í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir lutfalsvalháttinum.*

***2. petti.** Við lutfalsvali verður sipað til ein valhátt, har býráðslimir frammanundan boða borgar-stjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.*

***3. petti.** Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3, o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.*

***4. petti.** Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgartjórin skipar fyri.*

***5. petti.** Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør umboðar hvønn bólkin.*

***6. petti.** Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir pettunum 1-3 ."*

Á býráðsfundur 25. august 2020 vórðu hesi vald: Gunnar Reynslág, Birgit Andersen, Valbjørn Dalsgarð og Sólrun Gleðisheygg.

Valdu limirnir í valstýrinum fyri Argir eru sinnaðir at halda fram í valstýrinum, tó verður Valdbjørn Dalsgarð burturstaddur, tá valið er og tí er neyðugt at velja nýtt umboð fyri hann.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja valstýrið fyri Argir.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Vald vórðu: Gunnar Reynslág, Birgit Andersen, Valbjørn Dalsgarð og Sólrun Gleðisheygg.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Blað nr.: 881 |
| | Formansins merki: |

# 203/24 Matr.nr. 22s, Kaldbak. Eigari søkir um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 214/24 | 24/03516-3 |
| 2 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 203/24 | 24/03516-3 |

**Upprunin til málið.** Umsókn frá eigara um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum matr.nr. 22s, Kaldbak.

**Lýsing av málinum.**

**Matr.nr. 22s. 519m².**
Verandi eigarar keyptu stykkið sum varð selt í víðarisølu fyri kr. 235.000,- kr. Skeytið er tinglýst 12.02.2020. Víðarisølu mál 19/04251.

Verandi eigarar hava planerað stykkið og søkja nú um at loyvi til at selja stykkið, vísandi til, at tey hava slept ætlanunum um at byggja á stykkinum.

Sambært grein 5 í servitutskeytinum, hevur keyparin ikki loyvi til at selja stykkið víðari, fyrr enn sethús eru bygd á stykkinum, ella at kommunan gevur loyvi til søluna.

Tað kann viðmerkjast, at kommunan í 2017 seldi stykkið hjá ognarmeklara fyri hægsta boð kr. 215.000,-

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin. Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn. Tinglýstir servituttir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umsókn. Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til, at loyva víðarisølu av grundstykkinum vísandi til at stykkið er selt í fríðari sølu.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 204/24 Matr.nr. 255cv, Kirkjubøur,Argir. Klingurstjørn 2. Eigari ynskir at lata óbygda grundstykkið innaftur til kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 215/24 | 24/06612-2 |
| 2 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 204/24 | 24/06612-2 |

**Upprunin til málið. Umsókn frá eigara.**

**Lýsing av málinum.**
Matr.nr. 255cv, Kirkjubøur,Argir. Skeytið er tinglýst 06.07.2021.

Sambært tinglýstum servitutti rindar eigarin tinglýsingarkostnaðin av afturkeyps skeytinum, og hevur kommunan tí ongar útreiðslur í hesum sambandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl. Kortskjal.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | Játtast á: | |
|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Blað nr.: 884 |
| | Formansins merki: |

| Deild | Verk-ætlan | Navn |
|---|---|---|
| 6175 | | Keyp og søla |

| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
|---|---|---|---|
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 629.370,00 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa grundstykkið aftur fyri kr. 629.370,00 og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð um útlutan av sethúsagrundstykkjum í Tórshavnar kommunu.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

## 205/24 Matr.nr. 139aa, Hoyvík. Eigiri søkir um loyvi til víðarisølu av óbygdum grundstykki á Skarðshjalla.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 216/24 | 24/06771-2 |
| 2 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 205/24 | 24/06771-2 |

**Upprunin til málið.** Umsókn frá eigara.

**Lýsing av málinum.**
Matr.nr. 139aa, Hoyvík. ( Grundstykki á Skarðshjalla )
Vídd av grundstykki 867 m². Skeytið er tinglýst til keypara 22.08.2018. Keypsprísur kr. 1.127.100,00
Grundstykkið er grovplanerað.

Eigari greiðir frá, at hann av persónligum áum er noyddur til at sleppa øllum ætlanum um bygging á grundstykkinum, og at hann hevur ætlanir um at selja stykkið til sama prís sum hann upprunaliga keypti stykkið fyri. Keypararnir eru nýtt smápartafelag, við tveimum " aktørum " sum í felag byggja bygning til timbur og El. virksemið, og sum seljarin hevur havt ávíst samstarv við.

**Lógir, ásetingar o.a.**

***Áseting í skeytinum byggifreist.***
*Byggingin skal vera byrjað innan 2 ár frá tí, at byggibúningin er liðug og klárt er at byggja á stykkinum. Byggingin skal vera liðug og byggiváttan útskrivað í seinasta lagið 4 ár frá tí, at byggibúningin er liðug og klárt er at byggja á stykkinum. Eigarin kann ikki selja stykkið víðari uttan góðkenning frá seljara, fyrrenn byggingin er fullfíggjað.*

*Verður ikki gjørt sum ásett í punkt d), kann seljarin til eina og hvørja tíð krevja sær ognarrættin til vinnustykkið aftur móti at endurrinda eigaranum avtalaða keypspeningin.*
*Er nøkur bygging farin fram, endurrindar seljarin keyparanum harumframt skjalprógvaðar útreiðslur hansara til hesa, um annars nýtsla kann gerast av tí bygda. Semjast partarnir ikki um hetta og/ella um endurgjaldið, verður tað at áseta av einum gerðarrætti, har Tórshavnar kommuna útmeldar 1 lim, keyparin 1, meðan triði limurin, ið er formaður, verður útnevndur av Føroya rætti.*

*Renta verður ikki goldin av keypspeningi ella skjalprógvaðum útreiðslum, ið seljarin endurrindar.*

*Allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla til keypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørji útreiðslu í hesum sambandi.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

Grundstykkini í útstykkingini á Skarðshjalla, vórðu sett á sølulista á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu. Fastur prísur 1.300 krónur pr. fermetur.
Stykkini lógu rættuliga leingi á sølulista, tí fáir áhugaðir keyparar vórðu, men vórðu stykkini tó seld so við og við.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:** Umsókn. Kort.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at geva umsøkjara heimild til at selja grundstykkið. Ein treyt fyri heimildini er, at víðarisølan verður til sama prís sum upprunaskeytið kr. 1.127.100,00 og vísir til verandi tinglýstar servituttir.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið..

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 206/24 Matr.nr. 135np, Hoyvík. Karlamagnussarbreyt 56. Eigari søkir um loyvi til at selja ognina.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 217/24 | 24/07315-2 |
| 2 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 206/24 | 24/07315-2 |

**Upprunin til málið.** Eigari hevur sent kommununi umsókn.

**Lýsing av málinum.**

Viðvíkjandi sethúsum á matr.nr. 135np, Hoyvík. Eigari við familju hevur havt bústað í húsunum síðani 21.01.2024.

Byggimálsdeildin hevur hin 16.02.2024 sýnað og útskrivað byggivåttan til nýbygdu húsini.

Eigari boðar frá, at tey vegna serligar umstøður, verða noydd til at flyta, og at hann tískil ætlar at selja húsini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Tinglýstur servituttur grein sambært 7 í skeytinum ásetur.

Keyparin hevur ikki loyvið til at selja stykkið víðari, fyrr enn egin sethús til privatan bústað eru bygd á stykkinum, og keyparin hevur búð í privatu húsunum í 3 ár.

Tórshavnar býráð kann loyva frávik frá hesum, um haldgóð grundgeving fyriliggur.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umsókn frá eigara. Tinglýst skeyti. Byggivåttan.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Blað nr.: 888 |
| | | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at loyva eigara at selja ognina matr.nr. 135np, Hoyvík, við ástandandi sethúsum.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 207/24 Hølisloysn til forskúla i Kollafjarðar skúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 06.06.2024 | 27/24 | 24/02946-6 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2024 | 181/24 | 24/02946-6 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2024 | 154/24 | 24/02946-6 |
| 4 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 207/24 | 24/02946-6 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 07.10.2024 | 7/24 | 24/02946-6 |

**Upprunin til málið**
Vantandi høli til forskúla í Kollafjarðar skúla

**Lýsing av málinum**
Á býráðsfundi 23. februar 2023 varð samtykt at seta á stovn forskúla í Kollafjarðar skúla.

Høli vóru ikki tøk til forskúla, men víst var á møguleikan at innrætta tvey rúm í námsfrøðiliga tænastudeplinum, sum so kann brúkast til forskúla og serøkið ella til annað virksemi. Best er, um hølini hjá forskúlanum eru saman við grunddeildini ella tætt við grundeildina.

Ein kostnaðarmeting var gjørd, men játtan var ikki til endamálið. Nýggj kostnaðarmeting er gjørd, sí hjálagt skjal nr. 23/00597-11. Henda metingin er hægri enn tann fyrra. Hon er meir útgreinað, og í henni er ymiskt, sum ikki var við í tí fyrru. Tað er t.d.  ventilatión, tekøkur og máling.

Í 2024 er játtan sett av á 4115 Kollafjarðar skúli til rakstur av forskúla, men játtan er ikki sett av til tillagingar og og innrætting av hølum til forskúla. Av tí at hølini ikki vóru klár, var eingin innskriving í forskúlan í Kollafjarðar skúla til skúlaárið 2024/25. Ætlanin er, at forskúlin so byrjar skúlaárið 2025/26, og innskrivingin í forskúla er samstundis sum innskriving í fyrsta flokk. Innskrivingin er frá hálvum desember 2024 til hálvan januar 2025.

Leiðslan í Kollfjarðar skúla hevur spurt, nær hølini eru klár. Mentamáladeildin metir, at umráðandi er, at játtan verður sett av til hølini nú, so arbeiði at gera hølini kann fara í gongd, og forskúli kann byrja skúlaárið 2025/26.

Fígging
4119 Kollafjarðar skúli hevur játtan til rakstur av forskúla frá august til desember í 2024, játtanin er til rakstur av forskúla fyrru hálvu av skúlaárinum 2024/25, men eingin forskúli er, og tí er tann játtanin tøk. Haraftrat metir Mentamáladeildin, at upphædd kann verða játtað av 4140 Ætlanir á skúlaøkinum.

Biðið verður um at flyta 350 tkr. av 4119 Kollafjarðar skúli og 250 tkr. av Ætlanir á skúlaøkinum á 6110 Røkt av bygningum. Játtanin skal brúkast til hølisloysn, so forskúli kann byrja í Kollafjarðar skúla í august 2025.

Kostnaðarmetingin er 910 tkr., og restupphæddin kann møguliga útvegast við umraðfestingum hjá Bygningsdeildini, um tað ikki ber til, so verða tikin við í fíggjarætlanina fyri 2025.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Einki at viðmerkja

**Upplýsingar frá umsitingini**

Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
23/00597

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**
Fíggjarætlan

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 4115 | | Kollafjarðar skúli |
| 4140 | | Ætlanir á Skúlaøkinum |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6110 | | Røkt og umvæling á bygningum Dagføringar á skúlum | |

| **Upphædd** |
|---|
| 600000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla trivnaðarnevndini til at játta 350 tkr. av 4115 Kollafjarðar skúli og 250 tkr. av 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til hølisloysn til forskúla í Kollafjarðar skúla, og at upphæddirnar verða fluttar á 6110 Røkt og umvæling av bygningum Dagføring av skúlum.

At beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið til tvær viðgerðir.

**Trivnaðarnevndin 06. juni 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2024:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 20. juni 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 208/24 Møgulig standmynd/minnismerki um Andreu Árting

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 365/18 | 18/04076-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 247/19 | 18/04076-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 238/19 | 18/04076-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 203/19 | 18/04076-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 244/19 | 18/04076-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 58/20 | 18/04076-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 95/20 | 18/04076-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 74/20 | 18/04076-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 27.04.2020 | 125/20 | 18/04076-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 123/20 | 18/04076-1 |
| 11 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 96/20 | 18/04076-1 |
| 12 Býráðsfundur | 11.06.2020 | 119/20 | 18/04076-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 27/21 | 18/04076-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 31/21 | 18/04076-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 12.05.2021 | 116/21 | 18/04076-1 |
| 16 Mentamálanevndin | | | 18/04076-1 |
| 17 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 239/21 | 18/04076-1 |
| 18 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 251/22 | 18/04076-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 36/23 | 18/04076-1 |
| 20 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 38/23 | 18/04076-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 03.07.2024 | 200/24 | 18/04076-1 |
| 22 Býráðsfundur | 03.07.2024 | 192/24 | 18/04076-1 |
| 23 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 208/24 | 18/04076-1 |

**Upprunin til málið:**
Gunvør Balle, forkvinna í mentamálanevndini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ynski er at heiðra minni um Andreu Árting og hennara virki innan fakfelagsrørsluna, kappróður v.m. við at gera eina standmynd ella minnismerki/-varða.

Andrea Árting var komin væl upp í árini, tá hon í ringastu tíðunum í 30´unum púra óvæntað gjørdist forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag. Kreppan hevði við sær, at fakfeløgini vóru undir trýsti. Hetta nervaði tó ikki Andreu. Hon var órørd, og hon segði altíð tingini beint fram sama, hvar ið hon var. Við sínum eyðsýnda sosiala tilviti gjørdist hon ein ímynd fyri fakfelagsstríði í Føroyum í 20. øld. Alt sítt vaksna lív setti

hon rættindini hjá kvinnum í brennidepilin. Hóast hon ongantíð sat á tingi, so virkaði hon í roynd og veru sum ein sosialpolitikkari. Lønin hjá arbeiðskvinnunum var størsta partin av 20. øld væl lægri enn hjá monnunum. Hetta setti Andrea sær fyri at broyta. Í 1977 rakk hon loksins úrslitinum, at kvinnur og menn skuldu fáa líka løn fyri sama arbeiði. Tá hon seinni sama árið legði frá sær sum forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag, var hon 85 ára gomul. Soleiðis verður sagt um Andreu Árting í sambandi við filmin, sum er gjørdur um hana og vístur í KVF í 2017.

Røddir hava av og á verið frammi um at gera eina standmynd av kendu havnarkonuni Andreu Árting.

Tórshavnar kommuna kundi tikið stig til samstarv við Havnar Arbeiðskvinnufelag og aðrar áhugapartar um at seta eina standmynd upp av Andreu Árting í býnum.

Ein staðseting kundi t.d. verði uttanfyri Steinatún, sum liggur mitt í býnum, har nógv fólk ferðast aftur og fram. Tað hevði klætt Tórshavnar kommunu væl at reist eina standmynd av hesi serstøku kvinnu, sum stríddist so íðuliga fyri rættindunum hjá kvinnum.

Møgulig staðseting av standmynd ella minnismerki/-varða er málsøkið hjá Býarskipanarnevndini og verður tikið upp í nevndini, um verkætlanin gerst aktuell.

Tá greitt er, hvørjir partar hava áhuga at vera við í verkætlanini, verður fíggjarætlan gjørd og leistur fyri, hvussu verkætlanin verður útint.

Eisini kann nevnast, at bók um søguna hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag eftir ætlan kemur út í 2019.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um arbeiðast skal víðari við málinum og at fáa samstarv í lag við Havnar Arbeiðskvinnufelag og onnur um møguliga verkætlan.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í dialogi við nøkur fakfeløg um at vera við í hesi verkætlan, og ábendingar eru um, at tað helst ber til. Eisini hevur TK søkt Betri Stuðul um stuðul, men fekk noktandi svar. Fyri at skapa betri grundarlag fyri at koma á mál við verkætlanini verður mett hóskandi, at TK nú tekur stig til at útvega hóskandi eginfígging til verkætlanina, sum so kann vera grundarlag undir endaligu tilgongdini at fáa onnur at koma við í samlaðu fíggingina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at:
1. Flyta 100 tkr. av konto 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting
2. Flyta 100 tkr. av projektkontu L57029 (sak: Gøtuítrótt) til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heita á fíggjarnevndina at flyta 100 tkr. av kontu 5310 Mentanartiltøk o.a. til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av konto 4140, kr. 100.000 av L57029 og kr. 100.000 av konto 5310 á konto 5311 og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Til tess at gera verkætlanina ítøkiliga, verður mett neyðugt at fáa nærri viðgerð av møguligum staðsetingum og krøvum til sjálvt listaverkið Andreu Árting til heiðurs, hetta eisini sum liður at útvega samlaðu fíggingina. Á løgukontu 6275 Fríðkan av býnum, L62038 eru kr. 300.000 tøkar. Aftrat eru nakrar tilsagnir um fíggjarligan stuðul frá uttanhýsis pørtum komnar til verkætlanina.

Tørvur er á at fáa neyvari staðfest, hvørji krøv skulu setast til staðseting og listaverk. Tørvur er harumframt á uppskoti um tilgongd at útvega sjálvt verkið. Liður í hesum er eisini at meta um hóskandi vavi av samlaðu verkætlanini, harundir kostnað.

Tað eigur at verða heitt á Listaráðið um skjótast til ber at geva tilmæli til nevndarviðgerð hesum viðvíkjandi, so at tilgongd at útvega listaverk og aðrar fyrireikingar í sambandi við staðsetingina annars kunnu byrja.

Um tilgongdin at útvega listaverk v.m. krevur fígging, verður hetta at leggja aftur fyri nevnd at taka støðu til.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heita á Listaráðið um uppskot til staðseting av listaverkinum og krøv annars bæði til staðseting og listaverk. Mælt verður eisini til at heita á Listaráðið um uppskot til tilgongd at útvega listaverkið.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti**:
Tórshavnar listaráð hevur viðgjørt málið um staðseting av listaverkinum, umframt krøv til listaverkið og útveganartilgongd og hevur fylgjandi tilmæli.
---
*Viðv. staðseting*
*Listaráðið mælir til at verkið verður staðsett í Steintúni, treytað av at tað kann fáa hóskandi rúmd og pláss og ikki avmarkað til sjálvt torgið. Listafólkið skal kann arbeiða við staðseting í økinum.*

*Viðv. krøvum til listaverkið*
*Listaráðið mælir til at taka støði í nøkrum fáum krøvum, herundir boðskapinum um AÁ (kvinnujavnrættindi, sosialt rættvísti, áræði, áhaldni og sterk kvinnufyrimynd) og at verkið skal kennast fólksligt (ikki elitert), forvitnisligt og sjónligt í býarmyndini.*

*Viðv. útvegnar-/útboðstilgongd*
*Listaráðið mælir til at fara undir eina tilgongd har útvald yrkislistafólk fáa møguleika at luttaka í eini tilgongd, ið helst er í stigum. Einum undanumfari og so evt. eini millumstigi (tá móti ávísum gjaldi) og so endaligari tilgerð.*
---

Víðari tilgongd
Um samtykt verður at halda fram við verkætlanini fer Listabólkurin í kommununi, ið hevur ábyrgd av praktisku útveganini sbrt. galdandi reglugerð, undir útboðstilgongd at útvega listaverk. Hugsanin er at talan verður um innbodna tilgongd við einum undanumfari, og um valt verður at fara víðari til eitt annað umfar við fleiri luttakarum, at hesir tá fáa eina ávísa samsýning fyri kappingarluttøkuna.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Býarskipanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til um farast skal víðari við útboðstilgongdini við støði í tilmælinum frá Tórshavnar listaráði. Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanarnevndini mæla til at taka undir við tilmælinum og at játta 100.000,- kr. av kt. 6275, fríðkan av býnum, L00001 løgukarmur fyri árið, til L62038 standmynd/minnismerki um Andreu Árting og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í framflytingunum frá fíggjarárinum 2019, ið kemur til viðgerðar í fíggjarnevndini og býráðnum í næstum, verða ætlandi framflytingar frá m.a. kontu 5210 Tórshavnar kvøldskúli, á umleið 950 tkr.

Mett verður at partur av hesum kann vera flutt til at betra um fíggjarliga grundarlagið fyri verkætlanini. Henda upphæddin er helst ikki nokk, men vil nú vera nøktandi grundarlag fyri at fara víðari við verkætlanini og byrja útveganartilgongdina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at flyta 250 tkr. av kontu 5210 Tórshavnar kvøldskúli til projektkontu L62038 – standmynd/minnismerki - Andrea Árting.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 11. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Listabólkurin hevur verið í tilgongd saman við Edvardi Fuglø, listamanni um skitsuuppskot til standmynd, og hevur eisini fingið gjørt uppskot, ið sýnir staðseting av standmyndini í sunnara parti av torginum í Steinatúni.

Á fundinum verður greitt nærri frá uppskotinum til standmynd og ætlaðu staðsetingini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar. Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina til kunningar.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur arbeitt við at finna eina endaliga staðseting av standmyndini í Steinatúni.

Mett verður, at standmyndin hevði tikið seg væl út í plantukummuni móti vestur, har hon í størstan mun verður staðsett, soleiðis at hon fær rúm og ikki verður kroyst upp ímóti natúrligu trøunum.

Sí viðheftu tekningar av ítøkiligu staðsetingini, j.nr. 18/04076-45, Staðseting_Standmynd av Andreu Árting.

Sigast skal, at hendan staðsetingin skal fínpussast, soleiðis at standmyndin fær nøktandi rúmd, og soleiðis at hon ikki verður fløkt inn í verandi planting og eitt nú lyktapelarnar í plantukummuni. Møguliga verður neyðugt at flyta onkra planting, og tað verður í framhaldandi tilgongdini neyðugt at taka støðu til hvussu standmyndin verður sett í plantukummuna, um gróður skal verða kring standmyndina ella um økið møguliga skal flísaáleggjast ella at eitthvørt annað skal gerast kring standmyndina. Øll hesi viðurskiftini eiga at verða tikin upp í komandi tilgongdini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at standmyndin av Andreu Árting verður staðsett í Steinatúni í vestastu plantukummuni, og at málið verður beint í mentamálanevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Samtyktin hjá byggi- og býarskipanarnevndini tikin til eftirtektar.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Listabólkurin og Býarskipanardeildin hevur verið í samskifti við listamannin Edvard Fuglø um verkið og eru komin ásamt um nakrar tillagingar so verkið stendur seg enn betri í mun til umhvørvið í Steintúni.

Eisini er nú nærri greitt viðv. mettum kostnaði, og kemur umsitingin á greiða frá tí á fundinum. Neyðugt verður við eyka fígging afturat um verkætlanin skal fremjast.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 12. mai 2021:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

Leingi hevur verið arbeitt við at reisa eina standmynd av Andreu Árting, uml 1 mió kr er fingin til vega og byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt at standmyndin skal staðsetast í Steinatúni. Listafólkið er funnið og listaverkið er teknað og klárt er at fara til verka.

**Tilmæli:**
Gunvør Balle, Elsa Berg, Jákup Dam og Ruth Vang mæla til at fara undir arbeiðið at reisa standmyndina av Andreu Árting í Steinatúni og brúka tað uml. 1 mió kr ið hoyra til verkætlanina. Mælt verður samstundis til at seta 1 mió kr av á fíggjarætlanina fyri 2022 soleiðis at listaverkið er liðugt fíggjað.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle biður um at fáa málið á skrá til býráðsfundin.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Málið umrøtt.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við at játta kr. 1 mió. til verkætlanina av løgukarmi 6275 LK 62999 á projektkonto L62038. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við at játta peningin av LK62999, men mælir til, at peningurin verður funnin á konto, ið hoyrir mentanarøkinum til.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Borgarstjórin mælir til at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini og harumframt at játta kr. 1 mió í fíggjarætlanini 2023 løgukonta 6275 Fríðkan av býnum LK 62038 Standmynd Andrea Árting á projektkonto L62038 Standmynd Andrea Árting og at fremja ætlanina, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Standmyndin er um at vera liðug til at seta upp. Samlaðu kostnaðurin er kr. 2.795.000. Írestandi fígging er kr. 1.274.000. Skotið verður upp at fíggja hetta av øðrum inntøkum konta 20910, og hetta verður fíggjað kontuni aftur í sambandi við staðfestum meirinntøkum seinni í ár.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at játta kr. 1.274.000 til standmyndina at fíggja av øðrum inntøkum konta 20910, og hetta verður fíggjað kontuni aftur í sambandi við staðfestum meirinntøkum seinni í ár.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 03. juli 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 209/24 KÍF: Umsókn um stuðul til liðugtgerð av kappróðrarneystinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 4/23 | 22/04638-2 |
| 2 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 209/24 | 22/04638-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn móttikin septembur 2022

**Lýsing av málinum**
KÍF søkir um 650.000 kr. í stuðul til liðugtgerð av kappróðrarneystinum hjá KÌF.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
21/04973: KÍF hevur áður søkt stuðul til liðugtgerð av kappróðrarneystinum. Ongin upphædd var sett av til endamálið á fíggjarætlanini 2022, og tí var samtykt at ikki stuðla.

Málið viðv. at fáa kappróðrarneystið liðugt er eisini viðgjørt í øðrum málið - mál 20/03315. Í sama málið fyriliggur ein 2 ára gomul kostnaðarmeting til liðugtgerð av neystinum. Avgjørt var at stuðla við 34.000 kr. sum var tað sum var eftir á 5370 stuðul til íløgur.

Fíggjarætlanin
**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játtan 350.000 kr av konto 5370 stuðul til íløgur til liðugtgerð av kappróðrarneystinum hjá KíF

**Mentamálanevndin 17. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Nevndin samtykti eisini at biðja um endaliga uppgerð av verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 210/24 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 148/16 | 15/01400-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 225/16 | 15/01400-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 174/16 | 15/01400-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 70/16 | 15/01400-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 179/16 | 15/01400-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.06.2016 | 46/16 | 15/01400-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 163/16 | 15/01400-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 314/16 | 15/01400-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 402/16 | 15/01400-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 329/16 | 15/01400-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 46/17 | 15/01400-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 14 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 77/17 | 15/01400-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 270/17 | 15/01400-1 |
| 16 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 8/18 | 15/01400-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 82/18 | 15/01400-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 277/18 | 15/01400-1 |
| 20 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 52/18 | 15/01400-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 260/18 | 15/01400-1 |
| 22 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 214/18 | 15/01400-1 |
| 23 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 364/18 | 15/01400-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 350/18 | 15/01400-1 |
| 25 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 312/18 | 15/01400-1 |
| 26 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 157/19 | 15/01400-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 127/19 | 15/01400-1 |
| 28 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 106/19 | 15/01400-1 |
| 29 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 213/19 | 15/01400-1 |
| 30 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 149/19 | 15/01400-1 |
| 31 Mentamálanevndin | 24.06.2019 | 223/19 | 15/01400-1 |
| 32 Mentamálanevndin | 03.07.2019 | 229/19 | 15/01400-1 |
| 33 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 215/19 | 15/01400-1 |
| 34 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 185/19 | 15/01400-1 |
| 35 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 107/20 | 15/01400-1 |
| 36 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 100/20 | 15/01400-1 |
| 37 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 77/20 | 15/01400-1 |
| 38 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 183/20 | 15/01400-1 |
| 39 Mentamálanevndin | 24.08.2020 | 215/20 | 15/01400-1 |
| 40 Fíggjarnevndin | 25.08.2020 | 199/20 | 15/01400-1 |
| 41 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 166/20 | 15/01400-1 |
| 42 Mentamálanevndin | 06.11.2020 | 297/20 | 15/01400-1 |
| 43 Fíggjarnevndin | 06.11.2020 | 294/20 | 15/01400-1 |
| 44 Býráðsfundur | 06.11.2020 | 251/20 | 15/01400-1 |
| 45 Mentamálanevndin | 19.10.2021 | 254/21 | 15/01400-1 |
| 46 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 278/21 | 15/01400-1 |
| 47 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 254/21 | 15/01400-1 |
| 48 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 34/22 | 15/01400-1 |
| 49 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 35/22 | 15/01400-1 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 50 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 42/22 | 15/01400-1 |
| 51 Mentamálanevndin | 30.11.2022 | 222/22 | 15/01400-1 |
| 52 Mentamálanevndin | 07.06.2023 | 112/23 | 15/01400-1 |
| 53 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 162/23 | 15/01400-1 |
| 54 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 157/23 | 15/01400-1 |
| 55 Mentamálanevndin | 11.03.2024 | 56/24 | 15/01400-1 |
| 56 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 62/24 | 15/01400-1 |
| 57 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 85/24 | 15/01400-1 |
| 58 Mentamálanevndin | 15.05.2024 | 129/24 | 15/01400-1 |
| 59 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 136/24 | 15/01400-1 |
| 60 Fíggjarnevndin | 30.05.2024 | 153/24 | 15/01400-1 |
| 61 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 140/24 | 15/01400-1 |
| 62 Býráðsfundur | 20.06.2024 | 180/24 | 15/01400-1 |
| 63 Fíggjarnevndin | 03.07.2024 | 198/24 | 15/01400-1 |
| 64 Býráðsfundur | 03.07.2024 | 189/24 | 15/01400-1 |
| 65 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 210/24 | 15/01400-1 |

**Málslýsing**:
Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum
- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir
- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 23. mai 2016 samtykt byggiskrá fyri byggiverkætlanina. Byggiskráin er hjáløgd sum fylgiskjal 1 og svarar hon uppá settu spurningarnar og punktini.

Tó viðv. spurninginum um lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum, er at viðmerkja:

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi svimjihallir:
1). Svimjihøllin í Kollafjarðar skúla.
Verður brúkt bæði til skúlar og stovnar og er opin fyri almenninginum fleiri dagar um vikuna og alt skúlaárið. Høllin tænir einum lokalum endamáli burturav og er ikki upplagt at broyta nakað tí viðvíkjandi. Høllin er í góðum standi.

2). Svimjihøllin í eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum (gl. Argja Skúla). Verður brúkt burturav til skúlabrúks. Framtíðin er nógv tengd at, hvussu verður við eindini á Argjavegi tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Uppskotini, ið hava verið nevnd eru til annað kommunalt endamál, so sum innan eldraøkið og hevur Nám X eisini verið nevnt, tó so at í løtuni verður arbeitt út frá, at Nám X fer inn í Handilsskúlabygningin. Alt eftir hvat framtíðar endamálið verður, skal støða takast til, um hylurin framhaldandi skal verða í brúki, ella hølið verður brúkt til annað endamál. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin. Høllin er í góðum standi.

3). Svimjihøllin í Hesti. Verður vanliga brúkt summarmánaðirnar. Ikki nøkur ætlan fyribils um nakra broyting. Høllin er í hampiligum standi.

4). Svimjihøllin í Eystursúlanum. Hylurin verður brúktur til skúlabrúks umframt til kvøldskúla og aðra undirvísing. Mælt verður til at halda fram við honum óbroytt. Er serliga áhugaverd til ymiskar sertørvir, umframt skúlabrúks. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin, ið annars er í góðum standi.

5). Svimjihøllin í Gundadali. Er nógv brúkt til alskyns endamál.

Undangóðkenning av ráðgevaratoymum
Umsitingin er í holt við at fyrireika undangóðkenning av ráðgevaratoymum til eina møguliga hugskotskapping, sum ætlandi fer í gongd um miðjan juni og gongur fram til oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja
byggiskránna og at beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Sbrt. Býráðssamtykt 23. apríl 2015 er talan um eina serstaka nevnd, sum vísir til fíggjarnevndina. Av teirri orsøk verður viðgerðin av byggiskránni at byrja í fíggjarnevndini, sum so beinir málið víðari til aðrar nevndir, áðrenn endaliga viðgerð í fíggjarnevndini og hareftir býráðsviðgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja byggiskránna og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina.
**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.
**Tekniska nevnd 13. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.
**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.
**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.
**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri langhyl í Gundadal var útskrivað í august 2016, eftir at Tórshavnar býráð 16. juni 2016 hevði samtykt byggiskránna fyri langhyl í Gundadali.

Trý ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey eru:
- Toymið Ósbjørn Jacobsen Ark.
- Toymið SNA Ark.
- Toymið Árni Winther Ark.

23. november 2016 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og vóru tey latin navnloynt soleiðis, at dómsnevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

2. desember 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat uppskot skal vinna hugkappingina og fáa møguleika at innganga møguliga avtalu um projektering vm. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

Hetta mál er tengt at máli 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm., ið eisini er til viðgerðar í løtuni.

Á løgukonto 5775 L5610 eru umleið 7.000 tkr. tøkar til verkætlanina. Ætlanin er í næstum at fara undir nærri greiningar og samráðingar við vinnandi hugskotið og koma aftur til nevndarviðgerð við nærri greining av heildarkostnaði, tíðarætlan, útboðsleisti og fíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðari og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini um vinnandi hugskotið og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um møguliga projektering, umframt gerð av tíðarætlan, útboðsleisti, fíggjarætlan vm. og venda aftur til nevndina við einum uppskoti. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Mælt verður til at skipa bygginevnd í sambandi við nýggja langhylin samsvarandi vanligu mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur 2 limir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mælir býráðnum til at velja tveir limir í bygginevndina fyri nýggjum langhyli
**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.
**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Bergun Kass og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2017 eru játtaðar 4.798 tkr. á konto 5775 mentan og frítíð.

Í fjør var hugskotskapping um verkætlanina, ið toymið við SNA ark. v.fl. vunnu. Sbrt. kappingartreytunum fingu tey bæði toymini sum luttóku, men ikki vunnu, 200 tkr. fyri luttøkuna.

Seinni í heyst kemur ætlandi til viðgerðar uppskot til sáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið um projektering av verkætlanini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 420 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.
**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti**
Serstaka nevndin fyri langhyl hevði fund 7. feb. 2018.

Soleiðis var ført í fundarfrásøgnina: "*3. Viðv. tíðarætlan og samráðingunum um projekteringssáttmála. Uppskot um projekteringssáttmála umleið 7 mió. kr. Tøkar eru umleið 4,5 mió. kr. í løgukarminum í 2017. Tað, sum er á karminum, er ikki flutt í 2018 enn. Hinvegin, hvat ið er tøkt, verður vantandi endaligt í mars 18. Stjórnin metir, at projektið eigur at vera forskotið, til fíggingin er tøk til samlaðu projekteringina og rúm er í íløguætlanini fyri byggikostnaðinum. Fundur hevur verið við SNA-toymið um at forskjóta projektið til ársskiftið 18/19. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina á einum komandi fundi. Fyribils meting hjá teknisku fyrisiting er, at projektering tekur umleið 1 ár (við fyrivarni) + útbjóðing 2-3 mánaðir.*

*Heðin Mortensen metir ikki, at projektið eigur at útsetast, tí 4,5 mió. kr. eru avsettar í 2017, og eiga at verða fluttar yvir í 2018. Við at avseta restfígging í 2019, verður komið á mál við projekteringini. Síðani avseta pening til bygging av svimjihøllini á íløguætlanini fyri komandi árini."*

Fráboðað er Havnar Svimjifelag og Svimjisamband Føroya at projektering ætlandi verður planløgd at byrja um árskiftið 2018/19. Í sambandi við gerð av fíggjarætlan fyri 2019 verður ætlandi gjørt eitt uppskot til fíggingarætlan fyri projektering og bygging av langhyli. Vent verður aftur í nevndina við málinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við at projekteringin verður sett at byrja um årsskiftið 2018/19 og at fígging til projektering og bygging verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlan 2019.
**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus, krevja málið fyri býráðið.
**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til, at projekteringin av langhylinum fer í gongd beinanvegin, at 4,5 mió. kr., avsettar á fíggjarætlanini 2017, verða fluttar til fíggjarárið 2018, og at restfígging, umleið 2,5 mió. kr. at fíggja projekteringina, verður avsett í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið 2019.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Odd Færø, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Ímóti: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í mentamálanevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddi: Odd Færø.

**Ískoyti**
Á løgukarminum 5775 mentan og frítíð fyri 2018 eru framfluttar 5.029 tkr. Umsitingin er í holt við at samráðast um ráðgevarasáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið og kemur ætlandi í nevnd við málinum í oktober/november 2018 soleiðis at projekteringin kann byrja í desember 2018/januar 2019. Tørvur er at hava tøkan pening á projektkontuni í sambandi við samráðingarnar v.m., ið er í gongd í løtuni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 5.029 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen og Turið Horn vóru ikki við í viðgerðini av málinum.
**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**UPPSKOT Í GERÐ!!!!!**

Serstaka nevndin (bygginevndin) fyri gerð av langhyli, hevur á fundi 16, 20 og 2x. november 2018 samtykt at taka undir við samráðingarúrslitinum frá samráðingunum um ráðgevarasáttmála við vinnandi SNA samtakið, ið fevnir um SNA umframt LBF og SMJ. Bygginevndin mælir til at høllin og hylurin verða breiðkað nakað, umframt at støða verður tikin til um verkætlanin eisini skal fevna um 2 terapihyljar.

Fylgjandi viðurskifti eru at viðgera nærri í sambandi við ráðgevarasáttmálan:

I. Stødd á langhylinum

Í sambandi við tilgongdina at gera ráðgevarasáttmála var 10. oktober 2018 fundur millum umsitingina, umboð fyri Svimjisambandið og Havnar Svimjifelag við Joaquin Pujol, formann í FINA (altjóða svimjisambandinum) Facilities Committtee um verkætlanina. Sí hjálagt fundarfrásøgn frá fundinum og niðurstøður.

Eftirfylgjandi hevur umsitingin fingið afturmelding frá Joaquin Pujol um, at frásøgnin er rættvísandi, og avtalað er, at tá nýtt skipanaruppskot er tøkt, ætlandi í fyrsta ársfjórðingi 2019, verða nýggj frágreiðing og tekningar sendar FINA til viðmerkingar, har støða er tikin til ymisku viðurskiftini, sum vóróu viðgjørd á fundinum í okt. 2018. Herundir sonevnt flow í høllini í sambandi við kappingar, um pláss til áskoðarar, miðlar, VIP etc. og um karmar til sjónvarp, lýsingar o.a.

Við støði í samskiftinum við FINA hevur bygginevndin viðgjørt, hvørt tað er hóskandi at breiðka hylin og høllina nakað. Semja er um, at tað er mest hóskandi at hava 10 geilar á 2,5 m. hvør, í staðin fyri 8 geilar á 2,5 m. umframt 0,5 m. skvatligeil í hvørjari síðu. Við hesi broyting verður hylurin betri egnaður til kappingar, umframt at hann fær enn betri nyttuvirði í mun til dagligu og fjølbroyttu nýtsluna hesi komandi 3-4 áratíggjuni. Vansin við hesi broyting er, at hylurin gerst størri, og harvið eisini vatnnøgdin, ið skal hitast og viðgerast størri, umframt at høllin gerst tilsvarandi breiðari. Nevndin er samd um at longdin framhaldandi verður 50 m., umframt 1 m. afturat til eina flytiliga brúgv, so til ber at býta hylin uppá ymiskan hátt bæði til 25 m. langar geilar og samansett 25 m./50 m. langar geilar.

Annað týðandi høvuðsmál er, at høllin má gerast nakað breiðri enn í verandi støðu. Hetta serliga við atliti til at kunna seta upp fyribils áskoðarapláss (rúma fleiri áskoðarum til serligar kappingar), pláss til officials, sjónvarping, lýsingar o.a. Í tí dagliga kann øki brúkast til venjingar, upphiting, avseting o.a. Samanlagt verður høllin breiðkað til umleið 46 m. Á hjáløgdu mynd sæst, hvussu bygningurin fyllir byggiøkið í plan. Kostnaðurin av hesi broyting er í lýstur í skjali x.

II. Nýggjur innandura smábarnahylur/terapihylur og uttandura terapihylur

Í kappingaruppskotinum, ið vann, var á tekningunum lýst ein loysn við uttandura terapihyli, umframt einum serligum heitvatns-terapihyli innandura í millumøkinum millum bygningarnar. Hesin er serliga hugsaður til smærri børn, umframt til onnur, ið ynskja møguleikan at vera í einum serliga heitum hyli við terapi og vælveru í huga. Hugsanin er, at rúmið skal vera lutfalsliga lágt og tætt, soleiðis at tað er lættari at halda ein høgan hita. Meirkostnaðurin av uttandura terapihylinum og innandura terapihylinum eru lýstir í skjali x.

Bygginevndin metir at gerð av hesum báðum ískoytisverkætlanum er áhugaverd í sambandi við at umgera Svimjihøllina til ein vatndepil við vælveru, rørslu og kappingum.

III. Fleiri brúsur og skiftirúmsviðurskifti

Í byggiskránni er viðgjørt viðv. táverandi heitvatnsskipan til brúsurnar og tørv á fleiri brúsum.

Í 2017 bleiv heitvatnsskipanin til brúsurnar endurnýggjað. Í 2019 er ætlanin at greina møguleikarnar fyri útbyggingum við fleiri brúsum (óheft av langhylsverkætlanini). Miðrúmini í skiftingarrúmunum, har tað áður vóru sólir, kunnu umgerast soleiðis, at har ber til at gera fleiri brúsur. Í 2018 eru skápini í skiftingarrúmunum endurnýggjaði, og ber lutfalsliga lætt til at økja um talið av skápum. Eisini eru viðurskiftini hjá fólki, ið bera brek, og sum hava tørv hjálp til skifting o.a. tørv á at gerast betri í verandi høll. Hetta verður eisini tikið upp í 2019.

III. Ráðgevarasáttmálin og kostnaður

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum. Samlaða upphæddin fyri projektering er ásett til tkr. 11.500. Í hjálagda skjali er greining mettu av kostnaðarviðurskiftunum fyri verkætlanina við teimum ymisku valmøguleikunum.

Verður avgjørt at verkætlanini eisini skal geva um báðar terapihyljarnar hækkar kostnaðurin fyri projektering til tkr. 12.400.

Umframt sáttmála við SNA-samtakið, er ætlanin at hava tilknýttar 2 byggiharraráðgevar t.e. Sp/f Ráð til almenna byggiharraráðgeving og byggileiðslu í sambandi við bygginginа, umframt DTI til ráðgeving og eftirlit í sambandi við hylja- og vatntøkniveiting. Hædd er tikin fyri hesum í kostnaðarmetingini.

Á løgukontu L57015 Svimjihøll eru umleið 4,9 mio.kr. tøkar til projektering o.a. Tørvur er á umleið 4 mio.kr. afturat í 2019 til projektering.

Sbrt. tíðarætlanini byrjar projektering í desember 2018 og gongur fram til á várið 2020. Hareftir skal støða takast til útbjóðing og er hugsandi at byggingin kann byrja í august 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja:

a). at hylurin og høllin verða breiðkað

b). og mæla nevndini til at ráðgevarasáttmálin fevnir um projektering av uttandura heitvatnshyli og innandura heittvatns/terapihyli, og við teimum tillagingum at innganga ráðgevarasáttmála við SNA-samtakið um projektering av langhyli. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Neyva sáttmálaupphæddin fyri ráðgevarasáttmálan (sbrt. samtykt í mentamálanevndini og fíggjarnevndini) er kr. 12.346.671.
**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Projektering av langhylsverkætlanini er í gongd. Til verkætlanina í ár eru 4.136 tkr. ætlaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg í 2019. Saman við framflyting á projektkontuni verða umleið 8.705 tkr. tøkar til verkætlanina í ár og verður tað mett hóskandi í mun til løgdu ætlan fyri projektering v.m.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4.136 tkr av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg á projektkontu L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundinum koma umboð fyri bygginevnd og ráðgeva at leggja fram nýggjasta skipanaruppskotið, kostnaðarmetingar o.a. Bygginevndin er í fer við at leggja seinasta hond á viðgerðina og er endaligt tilmæli ávegis.

Sí hjálagt skjal við skipanaruppskotinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórnin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða framløguna.
**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Umrøtt.
**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Tikið av skrá.
**Mentamálanevndin 24. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Bygginevndin (Serstaka nevndin fyri at fyrireika nýggjan svimjihyl) hevur á fundi 28. juni 2019 samtykt hjálagda skipanaruppskot. Tó so at bygginevndin ynskir at ráðgevin í víðari tilgongdini kemur við eini nøktandi takloysn, umframt kemur við uppskotum til møguligar sparingar og hvussu bygningurin kann fáa ein enn betri orkuprofil. Í mun til viðgerðina seinast, er uppskotið rættað til við støði í samtyktunum í málinum í nov-des. 2018. Harumframt hevur ráðgevin saman við bygginevndini gjøgnumgingið málið við eini longri røð av áhugapørtum innan svimjing t.e. skúlar, dagstovnar, feløg, sersamband, KVF etc. og rættað ymiskt til. Sbrt. galdandi mannagongdum skal skipanaruppskot í byggiverkætlanum góðkennast í avvarðandi nevnd, fíggjarnevnd og býráði.

Eisini er uppskotið viðgjørt við altjóða svimjisambandið FINA saman Svimjisambandi Føroya – sí hjálagt teirra metingar. Bygginevndin metir, at verkætlanin er slóðbrótandi og kann vera ein framtíðartryggjaður karmur um alskyns svimjivirksemi langt fram í tíðina og eisini gera tað møguligt at bjóða seg fram til eina røð av fleirlanda svimjikappingum.

Við støði í skipanaruppskotinum er gjørd kostnaðarmeting, sí hjálagt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja hjálagda skipanaruppskot og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Byggiskráin fyri langhylin fevnir ikki um at víðka um skiftirúms- og brúsuviðurskiftini. Skipanaruupskotið leggur upp, at øll almenn atkomu- og skiftirúmsviðurskifti framhaldandi verða í verandi høll.

Sum upplýst í málinum til býráðsviðgerðina í desember 2018 viðvíkjandi ráðgevarasáttmálanum, fer nýggja høllin at hava økt virksemi og økt tal av brúkarum við sær.

Metast má týðandi eisini við atliti at víðari prosjekteringini, at fingið verður til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, og sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum. Útreiðslur til hesa bygging liggur uttanfyri kostnaðarmetingina fyri langhylin annars.

Til tess at fáa uppskot til vega skal roknast við ávísum útreiðslum til ráðgeving v.m. Mælt verður til at geva umsitingini heimild til at biðja um tilboð hesum viðvíkjandi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fáa til vega ítøkiligt uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum, og at umsitingin fær heimild til at biðja um tilboð til ráðgeving hesum viðvíkjandi.

**Mentamálanevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at samtykkja skipanaruppskotið og tilmælinum um at fáa til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu, og at umsitingin fær heimild at biðja um tilboð til ráðgeving hesum viðvíkjandi. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Projekteringin av langhylsverkætlanini er nú komin væl áleiðis og verður væntandi liðug í mai 2020 og kemur málið um góðkenning av høvuðsprojektinum, umframt útbjóðing til støðutakan í nevndum og býráð.

Til verkætlanina í ár eru 4.000 tkr. ætlaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg í 2019. Harumframt verður væntandi í apríl 2020 ein framflyting av tøkari játtan á projektkontuni frá 2019. Upphæddin er ikki endalig tøk enn, men fer í høvuðsheitum til at gera projekteringina lidna. Játtanin í 2020 fer ætlandi til at kunna byrja útinningina av verkætlanini í heyst t.e. í høvuðsheitum talan um burturbeining av ÍSF-húsinum, rigga byggipláss til og byrjan uppá jørð- og lendisarbeiðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4.000 tkr av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg á projektkontu L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Í sambandi við fyrireiking av langhylsverkætlanini er søkt um byggiloyvi til útinning av verkætlanini.

18. mai 2020 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin í máli 20/01266 Umsókn um byggiloyvi til langhyl í Gundadali matr. 1268a, Tórshavn, at "at loyva umsitingini at geva byggiloyvi, treytað av at neyðug parkeringspláss verða gjørd og annars við teimum treytum, ið umsitingin setur." Sí hjálagt yvirlit yvir p-pláss í økinum.

Í málinum framgongur at tað skulu útvegast 80 p-pláss afturat. Í upprunaliga málinum er avrátt at p-viðurskifti í Gundadali skulu viðgerast í eini heild og inngongur m.a. í mál 18/03453 Skipan av Gundadali, ið ætlandi kemur til viðgerðar í juni 2020.

Hetta kravið er ein týðandi broyting í fyritreytunum í verkætlanini, bæði ráðleggingarliga, praktiskt og fíggjarliga. Hinvegin so má roknast við, at verkætlanin fær skotbrá inntil byggiverkætlanin er liðug til at fáa hesi útvegað, væntandi um ársskiftið 2022/23.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka til eftirtektar kravið um fleiri parkeringspláss sum liður í langhylsætlanini.

Málið verður beint til ummælis í teknisku nevnd.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti**
Projekteringin
Verkætlanin er nú liðug projekterað og fyriliggur nú eitt sonevnt høvuðsprojekt (t.e. fullfíggjað projektering), ið er blivið granskað innanhýsis í teknisku fyrisiting, umframt hjá øðrum uttanhýsis serkønum ráðgevum.

Mett verður at tilfarið nú hevur eina dygd, ið er nøktandi til útbjóðingina. Í løtuni verða seinastu smálutirnir passaðir til áðrenn útboð.

Byggiloyvið
Verkætlanin hevur fingið byggiloyvið (sí hjálagt skjal) og er har nú ásett at verkætlanin skal útvega 42 p-pláss í nærumhvørvinum. Mett verður, at hetta ber til at loysa í nærøkinum og fáa liðugt projekterað og útinnt í 2021/2022 áðrenn Langhylurin verður tikin í nýtslu. Tekniska deild og býarskipanardeildin undir teknisku fyrisiting mæla til og leggja fyri býarskipanarnevnd og teknisku nevnd eitt ella fleiri øki í ella nærhendis Gundadali til minst 42 pláss og verður hetta loyst sum ein atknýtt men fyri seg verkætlan at prosjektera og standa liðug áðrenn langhylurin verður tikin í nýtslu. Fyribils mettur kostnaður til hetta er um 6 mió. Eitt sindur skal játtast til fyrireiking og prosjektering fyrst.

Útbjóðingartilfar
Talan er um eina útbjóðing í høvuðsarbeiðstøku sbrt. ABF06. Skotið verður upp at bjóða 5 feløgum til at luttaka í innbodnari lisitatión.

Stálhyljaviðurskifti
Í útbjóðingartilfarinum verður tilskilað, at tilboð skal fáast frá tveimum útvaldum veitarum av stálhyljaloysnum og at høvuðsarbeiðstakarin hevur viðskiftini við veitaran um hendi, tó eftir nærri góðkenning byggiharrans. Hesir báðir veitararnir eru útvaldir eftir eina umfatandi tilgongd.

Ráðgevaraleiklutir
Sbrt. ráðgevarasáttmálanum við Sp/F SNA er fyrivarni tikið fyri at byggileiðsla kann vera latin til annað felag at útinna. Hetta m.a. fyri at tryggja eina sterkari stýrings- og eftirlitsskipan kring verkætlanina. Skotið verður tí upp at byggileiðslan í verkætlanini verður latin til annað felag. Ætlanin er at sama felag eisini veitir ávísa byggiharraráðgeving eftir tørvi í sambandi við sáttmálasamráðingar og onnur yvirskipaði viðurskifti.

Kostnaðarmeting
Í hjálagda fylgiskjali eru nærri greiningar og metingar viðv. kostnaðinum fyri verkætlanina, bæði hondverkaraútreiðslur (HVÚ) og aðrar útreiðslur í verkætlanini. Av kappingar- og marknaðarávum verða tølini ikki lýst í tekstinum og verður tí frámælt til varðsemi við at nevna tøl alment.

ÍSF-húsið
Víst verður til mál 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið, ið er til viðgerðar á hesum sama fundi. Ætlandi verður farið undir niðurtøku av húsinum í oktober 2020. Húsaumsitingin kemur at standa fyri arbeiðinum og verður útreiðslan goldin av langhylsverkætlanini.

Tíðarætlan
Útbjóðing av verkætlanini 25 august til ultimo september.
Samráðingar um sáttmála ultimo september til ultimo oktober.
Niðurtøka av ÍSF-húsinum oktober 2020
Spakin settur í – ultimo oktober 2020

Bygging til árskiftið 2022/2023.

Rúmari umstøður til skifting og brúsu
Vísandi til samtykt í máli 19/03559 verður spurningurin um rúmari umstøður til skifting og brúsur í verandi svimjihøll loyst serskilt. Málið kemur aftur fyri í nevnd í heyst.

Grannalagsviðurskifti
Umsitingin hevur í 2019 verið á fundi við grannarnar og greitt frá verkætlanini og viðurskiftini kring byggiarbeiðið v.m. Grannar hava sum heild ymisk fyrivarni fyri spronging, larmi, dusti v.m. í sambandi við byggiarbeiðið, umframt ivamál viðv. hæddini á bygninginum. Umsitingin hevur svarað hesum eftir besta førimuni. Onnur og meiri kunning verður eftir ætlan fyriskipað áðrenn og meðan arbeiðið er í gongd.

Innrættan av byggiplássi og trygd í økinum
Saman við ráðgevanum er gjørd ein ætlan, ið eisini tekur hædd fyri ferðsluni og trygdini í økinum sum heild. Henda ætlan verður partur av HTU-ætlanini í verkætlanini og fylgt upp regluliga saman við verkætlanarleiðsluni og leiðsluni í Svimjihøllini.

Bygginevndin
Bygginevndin fyri verktætlanina hevur viðgjørt málið á fundi 21. august 2020.

Bygginevndin hevur nýggjan fund mánadagin 24. august 2020.

Á fundi í bygginevndini 24. august 2020 varð samtykt at biðja um heimild at kunna bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku til 4-5 feløg
b). at heimila umsitingini at samráðast við bílígasta tilboðsgevara um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð, og
c). at heimila umsitingini at gera avtalu við ráðgeva um at hava byggileiðsluna um hendi.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 24. august 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at taka undir við:

a). at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku til 4 feløg
b) at heimila umsitingini at samráðast við bílígasta tilboðsgevara um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð, og
c). at heimila umsitingini at gera avtalu við ráðgeva um at hava byggileiðsluna um hendi.

Harumframt verður heitt á teknisku nevnd um at viðgera mál um fleiri parkeringspláss.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, atkvøður blankt vísandi til, at áðrenn arbeiðið verður boðið út, eiga fleiri ósvaraðir spurningar í málinum um langhylin at verða svaraðir.
**Fíggjarnevndin 25. august 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunnvør Balle, tekur undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt vísandi til, at áðrenn arbeiðið verður boðið út, eiga fleiri ósvaraðir spurningar í málinum um langhylin at verða svaraðir, herundir hvussu verkætlanin verður fíggjað.
**Býráðsfundur 25. august 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og 2 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

**Ískoyti:**
Licitatión
1. oktober 2020 var licitatión í sambandi við útbjóðing av verkætlanini. Fýra feløg vóru boðin við í innbodnari licitatión. Inn komu trý tilboð. Sp/f Húsavarðatænastan lat ikki inn boð, hóast fyritøkan hevði sagt seg vilja bjóða.

Øll tilboðini, herundir allir postar í tilboðslistanum eru eftirkannaði og gjøgnumgingin og verður mett at øll trý tilboðini lúka treytirnar í útbjóðingartilfarinum og at tilboðið hjá J&K Petersen framhaldandi er lægst.

Sí endaliga yvirlitið her:

| Arbeiðstakarar | Tilboðsupphædd HVÚ | Eíndarprísur / optiónir | Samlað tilboð | Nr. |
|---|---|---|---|---|
| Articon P/F | 145.121.780,00 | 3.558.791,00 | 148.680.571,00 | 2 |
| Búsetur Sp/f | 156.249.015,00 | 3.652.428,00 | 159.901.443,00 | 3 |
| J & K Petersen Contractors P/F | 144.753.761,73 | 2.541.420,25 | 147.295.181,98 | 1 |

Viðv. avtalu við Tórshavnar havn um grót
Eftir at licitatiónin hevur verið, er tað, sbrt. ætlan, eydnast at fáa í lag semju við Tórshavnar havn at lata umleið 20.000 m3 grót til bátahylsverkætlanina í Álakeri. Hetta inniber eina ávísa sparing, tí annars skuldi grótið koyrast á goymslu í Húsahaga. Langhylsverkætanin skal tí ikki rinda nakað fyri koyring v.m. av hesi nøgdini. Hetta er longu innroknað í kostnaðarmetingina, men er treytað av at verkætlanin fer í gongd í næstum.

Sáttmálasamráðingar
Við støði í gjøgnumgongdini sum umrødd omanfyri, var í oktober 2020 farið undir samráðingar við P/F J&K Petersen um sáttmála. Tað hava verið fýra tingingarfundir, har partarnir hava gjøgnumgingið tilboðið hjá J&K Petersen, herundir tey ymisku fakini fyri at eyðmerkja møguligar avbjóðingar, óvissur og evt. manglar í verkætlanartilfarinum, og eisini um møguleikar fyri at taka onkrar postar út úr veitingini ella vita, um tað ber til at gera møguligar tillagingar, ið kunnu antin betra verkætlanina og/ella minka um kostnaðin.

Tað vísir seg at vera nakrir upplagdir møguleikar fyri at minka um kostnaðin, og sum ikki broyta nakað av týdningi viðv. dygd og funktión. Samstundis er greitt, at í nøkrum førum eru eyðmerkt nøkur viðurskifti og veitingar, ið mangla í nøgdarlistanum og útboðstilfarinum. Hetta inniber ein ávísan meirkostna.

Eisini hava samráðingar verið fyri at kanna, um tað ber til at minka um óvissur við at læsa ymisk viðurskifti í sáttmálanum. Eitt nú óveðursdagar, prís- og lønarvøksur, ávísar nøgdir í nøgdarlistanum v.m., men hevur tað ikki eydnast at fáa eina nøktandi semju um hesar postar, m.a. vegna ov stutt skotbráð hjá bæði arbeiðstakara, ráðgevum og kommununi at fáa lýst hesar óvissur og at kostnaðarmeta tær.

Byggitíðin og trygd í økinum
Undir samráðingunum er eisini komið fram, at neyðugt verður at leingja byggitíðina, tó enn óvist hvussu nógvar mánaðir, hetta m.a. fyri at kunna tilrættisleggja lendis- og speingiarbeiðið meiri skynsamt í mun til umhvørvið kring byggiplássið og herundir fyri at hava trygdina í økinum í hásæti. Longd byggitíð vil bera eyka kostna við sær til byggiplássrakstur, sum full greiða ikki er á. Kostnaðarskjalið tekur hædd fyri møguligari longdari byggitíð.

Óvissur og váðar
Gjøgnumgongdin higartil hevur eisini eyðmerkt nakrar óvissur, ið eru loystar, men hevði tað tað eisini hevði verið ynskiligt at fingið greinað og avklárað nakrar aðrar óvissur nærri og soleiðis minkað um váðan. Talan kann vera um 2-3 mio.kr.

Til tess at nágreina hesi viðurskifti krevst ein tilgongd á nakrar vikur. Í tann mun tað ikki verður gjørt, vil tann óvissan fara av postinum til ókent.

Sáttmálaupphædd/hondverkaraútreiðslur (HVÚ)
Við tillaginunum sum nevndar omanfyri verður komið fram til eina sáttmálaupphædd (HVÚ) á 147.500 tkr. uttan kommunalt MVG.

Heildarkostnaður og fígging
Greitt verður á fundinum frá heildarkostnaðurin fyri verkætlanina. Til tess at fíggja verkætlanina verður neyðugt at seta av umleið 65 mio.kr í fíggjarætlanini fyri 2021. Restupphæddin verður at fíggjað í 2022 og 2023.

Gjalds- og tíðarætlan
Í sambandi við samráðingarnar hevur kommunan biðið J&K Petersen um at koma við eini gjalds- og tíðarætlan fyri verkætlanina. Henda er ikki komin enn, men verður ein fyritreyt fyri at inngang ein sáttmála. Mett verður at útreiðslurnar í 2020 í mesta lagi vera umleið 2.500 tkr og eru hesar tøkar á projektkontu L57015 Svimjihøll.

Manningarlisti – lyklapersónar
Sum liður at tryggja eina skikkaða manning í leiðsluni av verkætlanini, hevur J&K Petersen latið TK ein lista yvir lyklapersónar í felagum, ið koma at arbeiða við verkætlanini. Umsitingin er nøgd við listan.

Tryggingarviðurskifti
Til verkætlanina hevur Tórshavnar kommuna teknað eina projektábyrgdartrygging fyri projekteringina v.m. og kemur í sambandi við høvuðsarbeiðstøkuna at tekna eina arbeiðstøkutrygging, herundir spreingitrygging í sambandi við at arbeiðið byrjar.

**Atknýttar verkætlanir**
*- Brúsu- og skiftirúmsviðurskifti í verandi høll*
4. juli 2019 samtykti býráðið at fáa útvega ítøkiligt uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum. Málið er viðgjørt nakrar ferðir í mentamálanevndini og kemur endaligt tilmæli væntandi fyri á fundi í mentamálanevndini 16. november 2020 (sí mál 19/03559 Svimjihøllin í Gundadali: Rúmari umstøður til skifting og brúsu). Sí hjálagt tekning av loysn E og tilhoyrandi kostnaðarmeting. Talan er um eina verkætlan, ið kann fremjast í stigum t.d. yvir 2-3 ár.

*- Parkeringsviðurskifti*
Í summar var spurningurin um útvegan av 42 parkeringsplássum viðgjørdur og samtykt at serstakt mál skuldi fyrireikast til at loysa tað. Tilgongdin er byrjað og kemur tilmæli væntandi í fyrsta ársfjórðingi í 2021. Byggiloyvið treytar, at hesi eru tøk áðrenn ein komandi høll verður tikin í nýtslu – væntandi í 2023.

Hesar atknýttu verkætlanir eru ikki fíggjaðar í langhylsverkætlanini.

Viðgerð í bygginevndini
Bygginevndin hevur viðgjørt málið á nøkrum fundum og seinast á fundi 6. november 2020, og hóast stutt skotbrá, metir meirilutin (Bergun Kass, Birita Wardum, Brynhild Setberg og Sigurð Vang) av bygginevndini, at tað ber til at inngang sáttmála við P/F J&K Petersen, treytað av hóskandi upphædd til ókent og møgulig tilkeyp. Mett verður, at óvissurnar í verandi støðu, kunnu rúmast í avsettu upphæddini.

Ein minniluti í bygginevndini, Heðin Mortensen, tekur støðu á seinni fundi, vegna ov stutt skotbrá og vantandi heildarupplýsingar.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin vísa til lýsingina omanfyri og mæla til:

a). at taka støðu til høvuðsarbeiðstøkusáttmála á 147.500 tkr. (uttan mvg) við P/F J&K Petersen. Útreiðslurnar í 2020 vera at rinda av tøkari upphædd á løgukontu L57015 Svimjihøll.

b). at taka støðu til at játta 65.000 tkr. í fíggjarætlanini fyri 2021 og restina av fíggingini í 2022 og 2023, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. november 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, samtykti at taka undir við punkt a) hvat viðvíkur sáttmálaupphæddini og fíggingini í 2020 og b), og harumframt at heimila umsitingini at gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála við P/F J&K Petersen.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, tekur støðu á seinni fundi, vegna ov stutt skotbrá og vantandi heildarupplýsingar.
**Fíggjarnevndin 06. november 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við meirilutanum í Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 06. november 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í Fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Formaðurin setur málið á skrá.

Sum upplýst í málslýsingini til nevndar- og býráðsviðgerðina í november 2020, eru atknýttar verkætlanir, ið ikki eru fíggjaðar. Talan er um nýggj brúsu- og umklæðingarrúm, harundir eisini til tey, ið bera brek, og at útvega tey í byggiloyvinum kravdu parkeringsplássini.

Mett verður neyðugt at fáa hesar verkætlanir neyvari útgreinaðar og kostnaðarmettar, soleiðis at hesi viðurskifti kunnu verða fíggjað og klár at taka í nýtslu í seinasta lagi samstundis sum langhylurin er liðugt bygdur.

Viðvíkjandi tørvinum á nýggjum brúsu- og umklæðingarrúmum er ynskið ein loysn, sum ikki grípur inn í gomlu høllina, men soleiðis, at báðar hallirnar kunnu virka leysar av hvørjari aðrari.

Ynskið er harumframt at kanna møguleikarnar fyri einfaldari takkonstruktión.

Hesi viðurskifti – brúsu- og umklæðingarrúm, parkeringspláss, og einfaldari takkonstruktión, skulu kostnaðarmetast hvør sær og fyri samlaðu langhylsverkætlanina.

Ynskið er eisini um at fáa uppskot til, hvussu man kann betra um umstøðurnar og tilboðini til barnafamiljurnar.

Heitt kann verða á ráðgevan um at gera hesi uppskot og kostnaðarmetingar. Skotið verður upp at játta kr. 800.000 til endamálið fíggjað av verandi langhylsjáttan 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur.
**Mentamálanevndin 19. oktober 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk, Kristianna Winther Poulsen og Birgir Nielsen, tekur undir við at heita á ráðgevan um at gera hesi uppskot og kostnaðarmetingar, og at játta kr. 800.000 til endamálið fíggjað av verandi langhylsjáttan 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur. Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.
**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Ein minniluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, atkvøður blankt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.
**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, Annfinni Brekkstein og Heðini Mortensen, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 3 ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Annika Olsen

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen og Gunnvør Balle.

**Ískoyti:**
Arbeiðið á byggiplássinum í sambandi við gerð av langhyli v.m. hevur nú verið í gongd í eitt gott ár, og er verkætlan gjøgnumgingin við atliti il at tryggja dygdina v.m.

Tørvur er tí nú á at fáa staðfest heildarkosnaðin fyri verkætlanina. Metingin er enn óbroytt síðani viðgerðina og samtyktina um høvuðsarbeiðstakarasáttmála í endanum av 2020.

Bygginevndin hevur við støði í meting hjá bygningsdeildini og byggiharraráðgevnaum ásett heildarkostnaðin til 211.797 tkr. Á fundinum verður kostnaðarskjal gjøgnumgingið.

Mett verður at tørvur verður á fylgjandi upphæddum á fíggjarætlanum komandi árini:

2022 – 40 mio.kr.
2023 – 75 mio.kr.
2024 - 35 mio.kr.

umframt upphæddin parkering og møgulig upphædd í sambandi við skiftirúmsviðurskifti. Sí seinni í tekstinum.

Í sambandi við viðgerðina á heysti 2020 varð eisini viðgjørt evnini viðv. parkeringsviðurskiftum og skiftirúmum.

**Viðv. parkeringsloysn**
Umsitingin og ráðgevar hava verið í dialogi við byggimálsdeildina og hava funnið fram til eina loysn at nøkta nýggja tørvin á parkeringsplássum í nærumhvørvinum. Talan er um eina loysn har umleið helvtin av teimum 45 eyka plássunum verður funnin við Eysturskýlið á Tórsvølli og hin helvtin við Vestara skýlið við Ovara vøll.

Kostnaðarmetingin er umleið 4,9 mio.kr. til 45 nýggj pláss og kann vera framt í 2022 um tøk fígging verður og annars í 2023. Henda (hetta kemur afturat teimum 211.797 tkr.)

**Viðv. eyka skiftirúmum**
Í málunum er samtykt at kanna ymsar møguleikar, men er tað ikki komið á mál. Greitt verður á fundinum frá ymiskum hugsaðum loysum og mettum kostnaðum.

**Viðgerð í nevnd og býráð**
Vegna atlit til sáttmálaviðurskifti, útbjóðingar- og kappingarviðurskifti v.m. verður mælt til at málið verður viðgjørt á býráðsfundi fyri stongdum hurðum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja ein heildarkostnað fyri langhylsverkætlanina á 211.797.000 kr.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Samtykt, at heildarkostnaðurin fyri langhylsverkætlanina er kr. 211.797.000 við tí viðmerking, at upphæddin ikki fevnir um parkeringsloysn og nýggj skifti- og brúsirúm, harundir til rørslutarn. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býraðið við teirri viðmerking, at kostnaðurin er íroknaður kommunalt mvg.
**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Støðug gongd er á verkætlanini við langhyli og vælverudepli í Gundadali.

Í framskrivingum av útreiðslum, væntaðum og óvæntaðum, fer tó skjótt at sansa at. Hóast tað eru settir pengar av útyvir sjálvan arbeiðstøkusáttmálan, fer hetta at verða ov lítið.

Orsøkirnar eru fleiri. Sum nevnt í samtyktari málslýsing í november í 2020 eru útreiðslur til 42 parkeringspláss ikki við og fíggjaðar av verandi langhylsverkætlan. Upplýst varð í november 2020, tá onki prosjekt fyrilá, at hetta kundi koma at kosta uml kr. 8 mió. Hetta kann tó gerast væl bíligari. 42 p-pláss aftrat í Gundadalsøkinum umframt ábøtir á verandi Gundadalsveg nærhendis svimjihøllini kunnu gerast liðug fyri  tkr. 2.730. Ætlanin er góðkend av byggimálsdeildini.

Á sumri/heysti 2021 eru samráðingar millum TK og arbeiðstakara um verkætlanin skal steðga í eina tíð og møguliga gerast øðrvísi. Avtala er síðani gjørd millum partarnar, hvussu hesin parturin skal samsýnast. Í beinleiðis og avleiddum útreiðslum kostar hetta hetta verkætlanini tkr. 3.800. Hesin parturin er ei heldur fíggjaður av verandi karmi til lanhylsverkætlanina.

Nakað er sett í kostnaðarætlanini til prísvøkstur. Á leið tað sum plagar at verða sett av til prísvøkstur sammet við aðrar verkætlanir. Hendan upphædd hevur víst seg væntandi at verða ov lítil. Príshækkingar serliga á tilfari hava verðið væl størri enn mett eftir sáttmálasamráðingar og undirskrift í 2020. Framskrivingar siga, at hesin posturin kann fara væl uppum tað, sum er avsett. Ov tíðliga er tó at siga hvussu nógv.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og verkætlanarneliðari mæla til at játta tkr. 6.530 til p-pláss í økinum og samsýning fyri steðg vm. íløgujáttanini fyri 2024 til kontu 5775 løgukonta  L57015 Svimjihøll, og at verkætlanarleiðsla og bygginevnd venda aftur seinni við framskrivinum av prísvøkstri.
**Mentamálanevndin 30. november 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Arbeiðið við nýggju langhylsverkætlanini gongur rímiliga væl og enn eftir ætlan. Fyri framman standa stórar veitingar og bygningurin stendur fyri at verða innilokaður.

Í framskrivingum av útreiðslum, væntaðum og óvæntaðum, sansar nú at. Hóast tað eru settir pengar av útyvir sjálvan arbeiðstøkusáttmálan til aðrar útreiðslur í samlaðu kostnaðarmetingini, fer hetta í summum førum at verða ov lítið.

Orsøkirnar eru nakrar.

- Sum nevnt í samtyktari málslýsing í november í 2020 eru útreiðslur til 42 parkeringspláss ikki við í kostnaðarætlanini av verkætlanini. Upplýst varð í november 2020, tá onki prosjekt fyrilá um parkeringspláss, at hetta kundi kom at kosta um 5 mió kr. Tað vísir seg, at hetta tó kann gerast bíligari.
  Ætlan við 42 p-pláss afturat í Gundadalsøkinum umframt nakrar ábøtir á verandi Gundadalsveg nærhendis svimjihøllini, kann gerast liðugt fyri 2.700 tkr

- Á sumri og heysti 2021 eru samráðingar millum TK og høvuðsarbeiðstakara um verkætlanin skal steðga í eina tíð og møguliga gerast øðrvísi. Avtala er seinni gjørd millum partarnir hvussu hesin parturin skal samsýnast. Í beinleiðis útreiðslum verða tað 2.500 t.kr og í avleiddum útreiðslum til

eftirlit, byggileiðslu og prísvøkstri av tíðarleinging aðrar 1.300 t.kr. Hetta er ikki fíggjað av verandi karmi til verkætlanina við langhyli

- Nakað er sett í samlaðu kostnaðarætlanini til prísvøkstur. Á leið tað sum plagar verða at sett av til prísvøkstur sammet við aðrar verkætlanir. Hendan upphædd vísir seg væntandi at verða ov lítið. Og hetta er tað sum rakar búskettið harðats. Príshækkingar á serliga tilfari hava verðið væl størri enn mett til sáttmálasamráðingar og undirskrift í 2020. Framskrivingar siga at hesin posturin kann fara væl uppum tað sum er avsett. Framskrivingar siga um 23 mió tilsamans í príshækkingum, og settar eru bara um 7 mió av til hetta í verandi kostnaðarætlan.

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri, trivnaðarstjórin, leiðarin á byggideildini og verkætlanarleiðarin mæla til at játta 6.500 tkr. til p-pláss í økinum og samsýning fyri arbeiðssteðg v.m., og at játta 16.000 tkr. til príshækkingar, t.e. tilsamans 22.500 tkr, til løgukontu 5775 Ítróttaanlegg L57015 Langhylur, og at upphæddin verður játtað í fíggjarætlanini fyri 2024.
**Mentamálanevndin 07. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Kári Johansen og Elsa Berg, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Kunning um óvanligar príshækkingar, sí frágreiðing: Langhylurin – prísregulering.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Bygningsdeildini mæla bygginevndini til at umrøða frágreiðingina.

**Mentamálanevndin 11. mars 2024:** Málið umrøtt og samtykt at beina málið í fíggjarnevndina til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Málið umrøtt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin vísir til ásetingarnar í ABF06, sum eru galdandi fyri høvuðsarbeiðstøku-sáttmálan millum kommununa og J&K Petersen, og mælir til at velja ástøðumann at meta um kravið á prísregulering í byggitíðarskeiðnum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Útsett.

**Ískoyti:**
Formaðurin ynskir málið á skrá.

Á seinasta bygginevndarfundi varð ætlan og kostnaður umbiðin um at víðka verandi brúsurúm við fleiri brúsum. Økið, sum arbeiðast skuldi við vóru rúmini, har solarium einaferð var. Sambært uppskotinum kunnu gerast tilsamans 26 brúsir (13 til hvørt skiftingarrúmið m/k). Sambært kostnaðarmetingini kemur at arbeiðið at kosta uml. 2,83 mió v/mvg. Sí eisini hjáløgdu framløgu.

Fígging er ikki til endamálið í játtanini til langhylin, og játtan er heldur ikki sett av á løguætlanini fyri grein 5 ítrótt. Tað merkir, at skal samlaði fíggjarkarmurin økjast við hesi upphædd, krevst onnur fígging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin taka undir við sjálvari ætlanini við fleiri brúsum, men hava ikki fígging at vísa á.

**Mentamálanevndin 15. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og taka fíggingina av ókendum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmælið til fíggjarnevndina 17. apríl 2024. Síðani tá hevur kommunan fingið løgfrøðiliga meting av kravinum um óvanligar príshækkingar. Sí skjøl.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri vísir til tilmælið til fundin 17. apríl 2024 um at velja ein ástøðumann.

**Fíggjarnevndin 30. mai 2024:** Samtykt at heimila umsitingini at gera semju um kr. 6,5 mió til fulla og endaliga uppgerð av samlaðu verkætlanini við avhendan. Málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Annika Olsen biður um at fáa málið um eyka brúsur til langhylin á skrá til býráðsfundin.

**Býráðsfundur 20. juni 2024:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Vísandi til tilmælið og samtyktina í Mentamálanevndini tann 15. mai, har víst varð á seinasta bygginevndarfund, har ætlan og kostnaður varð umbiðin um at víðka verandi skiftingarrúm við fleiri brúsum og hentleikum.

Økið, sum arbeiðast skuldi við, vóru rúmini, har solarium einaferð var. Sambært uppskotinum kunnu gerast tilsamans 26 brúsur (13 til hvørt skiftingarrúmið m/k).

Sambært kostnaðarmeting kostar arbeiðið uml. 2,83 mió v/mvg.

Fígging er ikki til endamálið í játtanini til langhylin, og játtan er heldur ikki sett av á løguætlanini fyri grein 5 ítrótt. Tað merkir, at skal samlaði fíggjarkarmurin økjast við hesi upphædd, krevst onnur fígging.

Mett verður, at fígging kann fáast til vega av tí, sum er játtað til Dagstovnin á Hamrinum, men ikki verður brúkt í ár. Upphæddin má tó játtast verkætlanini aftur í sambandi við fíggjarætlanina 2025.

Tí verður skotið upp at flyta kr. 2.830.000 av løgukontu 3175 L31011 Dagstovnurin á Hamrinum til nýggj løgukontu 5775 Ítróttaanlegg til løguverkætlan "Víðkan av skiftingarrúmum".

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at játta kr. 2.830.000 av verkætlan 3175 L31011 Dagstovnurin á Hamrinum sum eykajáttan til nýggja verkætlan 5775 Ítróttaanlegg Víðkan av skiftingarrúmum, og beina málið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 03. juli 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beina víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð at játta kr. 2.830.000 av løgukontu 3175 L31011 Dagstovnurin á Hamrinum til nýggj løgukontu 5775 Ítróttaanlegg til løguverkætlan "Víðkan av skiftingarrúmum".

# 211/24 Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 14.01.2016 | 10/16 | 15/04352-4 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 9/16 | 15/04352-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 12/16 | 15/04352-4 |
| 4 Tekniska nevnd | 10.02.2016 | 13/16 | 15/04352-4 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 77/16 | 15/04352-4 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 69/16 | 15/04352-4 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 112/16 | 15/04352-4 |
| 8 Ferðslunevndin | 23.03.2016 | 29/16 | 15/04352-4 |
| 9 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 42/16 | 15/04352-4 |
| 10 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 140/16 | 15/04352-4 |
| 11 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 116/16 | 15/04352-4 |
| 12 Tekniska nevnd | 03.11.2016 | 107/16 | 15/04352-4 |
| 13 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 112/16 | 15/04352-4 |
| 14 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 428/16 | 15/04352-4 |
| 15 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 343/16 | 15/04352-4 |
| 16 Tekniska nevnd | 10.01.2017 | 5/17 | 15/04352-4 |
| 17 Fíggjarnevndin | 18.01.2017 | 6/17 | 15/04352-4 |
| 18 Tekniska nevnd | 14.02.2017 | 9/17 | 15/04352-4 |
| 19 Tekniska nevnd | 04.06.2019 | 38/19 | 15/04352-4 |
| 20 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 48/19 | 15/04352-4 |
| 21 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 65/19 | 15/04352-4 |
| 22 Tekniska nevnd | 09.06.2020 | 25/20 | 15/04352-4 |
| 23 Tekniska nevnd | 06.10.2020 | 43/20 | 15/04352-4 |
| 24 Tekniska nevnd | 13.03.2023 | 10/23 | 15/04352-4 |
| 25 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 79/23 | 15/04352-4 |
| 26 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 73/23 | 15/04352-4 |
| 27 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 97/23 | 15/04352-4 |
| 28 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 165/23 | 15/04352-4 |
| 29 Tekniska nevnd | 02.09.2024 | 52/24 | 15/04352-4 |
| 30 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 206/24 | 15/04352-4 |
| 31 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 211/24 | 15/04352-4 |

Málslýsing
Íbúgvar í Traðabrekku vísa á truplu atkomuviðurskiftini, tí brekkan til økið er so brøtt, serliga um veturin, tá kavi og hálka er. Tí vísa teir á møguleikan at binda eystara enda av Traðabrekku í Hoyvíksvegin. Økið millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin, matr. nr. 726c, er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Tekniska nevnd skal taka støðu til um farast skal undir fyrireikandi arbeiði at gera vegakomu á matr.nr. 726c, Tórshavn og sostatt knýta Traðabrekku í Hoyvíksvegin.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur eingin ítøkilig fíggjarlig meting av arbeiðinum at gera vegatkomuna, men væntast kann at kostnaðurin verður uml. 1 mió. kr.

Spurningurin um ferðsluviðurskifti á vegamótinum við Hoyvíksvegin/Stoffalágvegin er ikki viðgjørdur enn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at knýta Traðabrekku í Hoyvíksvegin og at farast skal undir planleggingararbeiðið at leggja fyri nevndina. Mælt verður eisini til at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið við atliti til fígging av kto. 8175 aðrar vegaætlanir 2016.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ferðslunevndin 14. januar 2016:** Umsitingin arbeiðir víðari við málinum. Ferðsluteljingar verða gjørdar.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Málið beint aftur í teknisku nevnd vegna ógreið viðurskifti viðvíkjandi ognini 726c og áður samtyktum ætlanum við økinum.

**Ískoyti:**
Málið um matr. nr. 726c, Tórshavn, tók sín uppruna í 2002, tá ið kommunan keypti ognina við tí endamáli at fáa vegasamband millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 14/03899, har tað framgongur, at málið um vegatkomu í byggi- og býarskipanarnevndini 10. oktober 2014 var broytt til at fevna um gøtusamband og p-pláss umframt eitt stykki til at selja. Fíggjarnevndin hevur síðani tikið undir við byggi- og býarskipanarnevndini, har stykki til møguliga sølu verður uml. 500 fermetrar til víddar og at írestandi økið út móti Hoyvíksvegnum verður lagt út til alment parkeringsøki.

Víst verður harumframt til mál nr. 14/0385, 2010-1738 og 2010-1513, har borgarar hava sýnt ognini áhuga.

Málið er sostatt ongantíð komið til teknisku nevnd

**Tekniska nevnd 10. februar 2016:** Nevndin staðfestir samtyktina frá 13. januar 2016 og beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Víst verður til hesi mál:
1) mál nr. 2002-1884, Tórshavnar kommuna hevur keypt matr.nr. 726c, Hoyvíksvegur 41a. Húsini eru millum Hoyvíksvegin og Traðabrekku, við tí endamáli, at taka húsini niður og føra Traðabrekku út í Hoyvíksvegin.
2) Mál nr. 14/03899, Fíggjarnevndin hevur samtykt at skipa økið sambært tekning, við gøtusambandi millum Hoyvíksvegin og Traðabrekku, einum sethúsagrundøki á uml. 500 $m^2$ og alment parkeringsøki.

Vísandi til mál nr. 14/03899, har býarskipanardeildin hevði eina søguliga gjøgnumgongd av málinum og vísti á, at Tórshavnar kommunnu í 2004 keypti ognina matr. nr. 726c, Hoyvíksvegur 41a, við tí endamáli, at taka húsini niður, og føra Traðabrekku út í Hoyvíksvegin. Mælt var til, at beina málið í teknisku nevnd og ferðslunevndina til støðutakan um vegagerð yvir matr. nr. 726c frá Traðabrekku til Hoyvíksvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við teknisku nevnd at fyrireika vegagerð yvir matr. nr. 726c og um pláss er fyri tí, at leggja øki av til eitt sethúsagrundøki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarevndini.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**

Ferðsluteljingar eru gjørdar við vegamótið Hoyvíksvegur/Stoffalág. Teljingin var frá 02.03 – 09.03. 2016. Tá koyrt verður frá býnum, eru tølini: 3963 áðrenn snarað verður inn á Stoffalágvegin, og 3119 eftir vegamótið. Tølini eru ársdøgnmiðalferðsla.

**Ferðslunevndin 23. mars 2016:** Nú ferðsluteljingar eru gjørdar, metir nevndin, at einki er til hindurs fyri at gera eina íbinding.

**Tilmæli:**
Í framhaldi av tilmælinum til teknisku nevnd 13. januar 2016 og tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina 4. mars 2016, mælir byarverkfrøðingurin til at játta kr. 300.000,- av íløgum fyri vegaætlanir 2016, konto 8175, til at fyrireika vegagerð yvir matr. nr. 726c og um pláss er fyri tí, at leggja øki av til eitt sethúsagrundøki og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu:
Jógvan Arge.

**Ískoyti:**
Ráðgevi hevur eftir áheitan frá umsitingini útvegað kommununi uppskot og kostnaðarmeting til vegagerð millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin ávikavist við og uttan 10 parkeringspláss (sí j. nr. 15/04352-24 og 26.).

Umboð fyri grannalagið kring Traðabrekku eru kunnað um uppskotið og í skrivi, dagf. 22. oktober 2016, sum er stílað til teknisku nevnd, siga umboðini seg taka undir við uppskotinum (sí j. nr. 15/04352-25).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at tikið verður undir við uppskotinum við 10 parkerings plássum, at arbeiðið verður sett í útboð millum innboðin, og innkomin tilboð verða løgd fyri nevndina til støðutakan.

**Tekniska nevnd 03. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera vegin og 10 parkeringspláss var boðið út til fýra arbeiðstakarar, trý tilboð komu inn og vóru tey hesi:

- P/F Articon kr. 1.232.307,- uttan MVG
- Sp/f Maskinkoyring kr. 1.464.545,- uttan MVG
- Sp/f R. J. Brockie kr. 1.072.958,- uttan MVG

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting við støði í tilboðnum frá Sp/f R. J. Brockie, sum vísir at útbodna arbeiðið kann gerast fyri tilsamans kr. 1.737.271,- tá MVG, útboð, byggileiðsla, fakeftirlit, trygging umsiting og óvæntað er íroknað (sí j.nr. 15/04352-33).

Undanfarin játtan til arbeiðið er kr. 300.000,- og írestandi upphæddin er sostatt kr. 1.437.271,- fyri at takast kann av tilboðnum frá Sp/f R. J. Brockie uppá arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at heimila umsitingini at gera sáttmála við Sp/f R. J. Brockie um arbeiðið, at játtaðar verða kr. 1.440.000,- afturat til arbeiðið, fíggjað av ætlaðum íløgum til vegir í 2017 og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Eftir at kunnað var um ætlaðu vegagerðina í skrivi dagf. 11. november 2016 til grannar við Láarvegin og Hoyvíksvegin og sum liggja uppat ætlaðu vegagerðini, vendir ein granni aftur tann 29. november 2016 við áheitan um innlit og umbøn um skotbrá til at gera viðmerkingar til ætlaðu vegagerðina.

Nevndi granni vendir síðani aftur við mótmælisskrivi, dagf. 8. desember 2016, (sí j. nr. 15/04352-39) og vísir m.a. á, at íbúgvar við Traðabrekku framanundan hava atkomu frá Traðavegnum og Láarvegnum og at tað koma at verða fýra vegir sum møtast millum húsini, har sýnið farmanundan er sera vánaligt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin staðfestir samtykt nevndarinnar frá 29. november 2016.

**Tekniska nevnd 10. januar 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.
**Fíggjarnevndin 18. januar 2017:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd við atliti til at viðgera innkomin mótmæli.

**Ískoyti:**
Í í skrivi, dagf. 14. januar 2017, hava átta borgarar við Traðabrekku vent sær til kommununa at mótmæla ætlaðu vegagerðini, sum eftir teirra fatan ger umstøðurnar verri tá talan er um m.a. ferð og parkering og biðja samstundis um fund, at finna bestu loysnina.

Á fundi tann 3. februar 2017 høvdu umboð fyri nevndu borgarar høvið at greiða kommunalu fyrisitingini frá sínum sjónarmiðum og vístu m.a. á øtusamband millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin sum betri loysn.

**Tilmæli:**
Við fyriliti fyri trygdini í hálku á Traðabrekku, mælir tekniski stjórin til, at nevndin gongur meirilutanum av teimum sum hava vent sær til kommununa á møti, við at staðfesta samtykt nevndarinnar frá 29. november 2016.

**Tekniska nevnd 14. februar 2017:** Tikið av skrá.
**Tekniska nevnd 04. juni 2019:** Samtykt at umsitingin kannar hvussu nógv parkeringspláss kunnu skipast á økinum.

**Ískoyti:**
Ráðgevi hevur eftir áheitan frá umsitingini útvegað kommununi uppskot til skipan av økinum til parkering, har tilkoyringin ávikavist er frá Hoyvíksvegnum og frá Traðabrekku.

Á økinum, sum er góðar 1000 fermetrar til víddar, er eftir hesum uppskotum í báðum førum pláss fyri 31 Parkeringsbásum (sí ávikavist j. nr. 15/04352-53 og j. nr. 15/04352-51).
P-plássið við tilkoyring frá Hoyvíksvegnum hevur ráðgevi kommununnar kostnaðarmett til kr. 1.930.000,- uttan MVG, prosjektering, trygging, byggileiðslu, fakeftirlit v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til, at uppskotini um parkering verða latin grannalagnum til hoyringar.
**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Skriv varð sent grannalagnum við Traðabrekku á 25 adressum, við umbøn um viðmerkingar til tey tvey uppskotini til skipan av økinum millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin til parkering uttan gjøgnumkoyring, men við tilkoyring frá Hoyvíksvegnum ella í øðrum lagi frá Traðabrekku.

12 svarskriv, sum komu aftur, umboða ymisk sjónarmið og grundgevingar, men kunnu í høvuðsheitum bólkast nakað soleiðis:

1. Eingin ynskir P-pláss við innkoyring frá Traðabrekku og mótmælt verður staðiliga hesi loysn.
2. Flestu seta seg ikki ímóti, at P-pláss kemur við innkoyring frá Hoyvíksvegnum og nøkur viðmæla hesi loysn, men ynskja kunning áðrenn nakað verður sett í verk.
3. Fleiri ynskja, at P-plássið undir ongum umstøðum verður gjørt við gjøgnumkoyring.
4. Nøkur ynskja, at P-plássið verður gjørt við gjøgnumkoyring til Traðabrekku og at brekkan av trygdarávum verður stongd til blindveg.

Ad 1:
Mótmælið móti at P-pláss verður gjørt við innkoyring frá Traðabrekku verur grundgivið við tilvísing til at ferðslutrýstið á Traðabrekku vil økjast munandi til ampa fyri ferðslutrygdina í økinum. Millum tey sum mótmæla hesi loysn, eru umleið 50 íbúgvar við Láarvegin omanfyri, har tilkoyring er til Traðabrekku og hava hesi latið mótmæli inn við undirskriftum til mótmæli av hesum.

Ad 2:
Nøkur vísa á, at tørvur er á P-plássum í økinum og onkur sigur seg  kunna nýta P-plássið, tá kavi er.

Ad 3:
Grannarnir á eystur síðuni á Traðabrekku 4-26 næst møguligum P-plássi, umboðandi 8 adressur, hava latið mótmæli inn við undirskriftum til mótmæli av hesum.

Ad4:
Víst verður til at grannalagið upprunaliga vendi sær til kommununa  orsakað av vánaligu trygdini í brøttu brekkuni og at tey, tá kavi er, eru uttan vanligar tænastur so sum neyðsendarakfør, læknavitjan, renovatión og TAXA til t.d. læknaørindi v.m. og at eitt P-pláss á ongan hátt nøktar henda tørv.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at at parkeringspláss verður gjørt við atkomu frá Hoyvííksvegnum, at grannarnir verða kunnaðir um avgerðina, at arbeiðið verður boðið út og at tilboðini verða løgd fyri nevndina aftur.
**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Samtykt at senda málið til grannakunning og til ferðslugrannskoðan.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til grannakunning og til ferðslugrannskoðan.

Megin niðurstøðurnar  frá ferðslugrannskoðanini eru hesar (sí j. nr. 15/04352-83):

- P-plássið eigur at verða gjørt við gjøgnumkoyring frá Hoyvíksvegnum til Traðabrekku.

- Traðabrekka eigur av trygdarávum at verða gjørd til blindveg, móti ávikavist Láarvegnum og Traðarvegnum.
- At gøta, sum skilur gangandi frá bilferðluni, eigur at verða gjørd framvið P-plássinum.
- At vegamótið millum P-plássið og Hovíksvegin eigur at verða flutt nakað norðureftir fyri at fáa frástøðu til vegamótið Stoffalág – Hoyvíksvegur.

Umsitingin hevur útvegað skitsuuppskot frá ráðgeva, sum er í samsvar við niðurstøðurnar frá ferðslugrannskoðanini. Eftir hesum uppskoti verða 23 P-pláss á økinum (sí j. nr. 15/04352-84).

Skitsuuppskotið hevur við sær, at umleið 52 fermetrar av lendi mugu útvegast burturav grannamatriklinum 727c norðan fyri P-økið og hevur ánarin av nevnda matrikli, sagt seg sinnaðan at selja lendið til kommununa eftir nærri avtalu.

Sunnan fyri ætlaða P-økið hevur ánarin av grannamatriklinum 726h ynski um marknaumskipan móti P-økinum, soleiðis at P-økið verður nakað longur burturfrá sethúsum hansara. Skitsuuppskotið til P-økið hevur fyrilit fyri hesi marknaumskipan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

1. At parkeringspláss verður gjørt við støði í nevnda skitsuuppskoti, sum er í samsvari við niðurstøðurnar frá ferðslugrannskoðanini og at grannarnir verða kunnaðir um avgerðina.
2. At umsitingin tekur stig til at fáa í lag tillaging av matrikulmarki samsvarandi skitsuuppskotinum.
3. At játtaðar verða kr. 150.000,- av konto 8110 Rakstur av vegum 2020, til prosjektering og útboð av arbeiðinum.
   At innkomin tilboð verða løgd fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 09. juni 2020:** Samtykt taka undir við tilmælinum, tó so at eingin gjøgnumkoyring verður til Traðabrekku frá parkeringsplássinum.

**Ískoyti:**
Ánarin av grannamatriklinum nr. 726h sunnan fyri ætlaða P-økið hevur fráfallið ynski sínum um marknaumskipan móti P-økinum.

Ánarin av grannamatriklinum nr. 727c, norðan fyri P-plássið, sigur seg sinnaðan at lata lendi til innkoyringina frá Hoyvíksvegnum, men ikki fyri pening.
Ístaðin er ynski hansara, at kommunan steinsetur tann partin av hansara grundøki, sum er vátlendi og mold verður løgd á steinsetingina, soleiðis at grundøkið hansara hereftir verður væl drenað og vætan burturbeind.
Um ynski um steinseting og drening av grannastykkinum skal gangast á møti, er neyðugt at gera verkætlan við forkanningum og virðismeting v.m., sum skal góðtakast av pørtunum.
Um ætlanin, at gera innkoyringina til P-økið yvir grannamatrikulin 727c, verður slept og uppskotið um P-plássið verður umskipað, soleiðis at innkoyringin frá Hoyvíksvegnum ístaðin verður gjørd yvir kommunalt lendi, gerst málið um P-plássið munandi einfaldari og helst eisini bíligari at fáa í lag.

Ráðgevi kommununnar hevur á skitsuuppskoti lýst hvussu P-plássið kann skipast við innkoyring frá Hoyvíksvegnum yvir kommunalt lendi og 31 P-plássum (sí j. nr. 15/04352-91).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

1. At parkeringspláss verður gjørt við støði í nevnda skitsuuppskoti við innkoyring frá Hoyvíksvegnum yvir kommunalt lendi (sí j. nr. 15/04352-91 P-pláss uttan gjøgnumkoyring).
2. At játtaðar verða kr. 150.000,- av konto 8110 Rakstur av vegum 2020, til prosjektering og útboð av arbeiðinum.
   At innkomin tilboð verða løgd fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 06. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
Borgarar í og við Traðabrekku hava víst á viðurskifti við skitsuuppskotinum (sí. Jnr. 15/04352-91 (P-pláss uttan gjøgnumkoyring)), sum ikki eru samsvarandi við tey ynskir, sum borgararnir upprunaliga ynsktu fyri gøtuna.

Í januar 2023 hava borgararnir í gøtuni latið umsitingini undirskriftir, har víst verður á, at ynski enn er um at gera ábøtur á ferðsluligu viðurskiftini í gøtuni.

Á borgarafundi 31.01.2023, har býarverkfrøðingurin og formaðurin í teknisku nevnd eisini luttóku, vóru sjónarmiðini hjá borgarunum í gøtuni løgd fram. Samanumtikið varð víst á, at borgararnir í gøtuni ynskja, at:

1. Trygdin fyri bilaferðsluna verður raðfest, soleiðis at koyrandi verður beinleiðis í Hoyvíksvegin.
2. Trygdin fyri gangandi verður raðfest soleiðis at:
   a. Trygg gonguleið verður millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin
   b. Trygg gonguleið verður gjørd millum Láarveg og Traðaveg við hóskandi gongubreyt og rekkverki.
3. Avvatningin á brekkuni millum Lágarveg og Traðaveg verður dagførd, soleiðis at hálka í størri mun verður fyribyrgd.

**Skjøl**
15/04352-100 traðarbrekka-hoyvíksvegur 2-0

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 8175 | | | Dagføring av Traðabrekku |

| **Upphædd** |
|---|
| 1.800.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.800.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarvekfrøðingurin mæla til, at:
- heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við ráðgeva um prosjektering, og við arbeiðstakara um fremjan av hesum arbeiðum innan ein karm á tilsamans kr. 1.800.000.
- hetta verður fíggjað á nýggja verkætlan, Dagføring av Traðabrekku, av konto 8175 Vegir (íløgur) LK 81999 Vegaverkætlanir.
  málið verður beint í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Tikið av skrá.
**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Av tí at ósemja er millum borgarar á Traðabrekku um, at vegurin verður íbundin Hoyvíksvegin, verður hesin parturin ikki gjørdur á hesum sinni.

Tað sum skal gerast nú, er gelendari á eystursíðuni á brekkuni millum Láarveg og Traðaveg og asfaltering á vestara borð á strekkinum millum Láarveg og Traðabrekku.

Arbeiðið er mett at kosta 350.000,-, og verður fíggjað av stovnsnummar 8175, LK81999, Vegaverkætlan (karmur), á verkætlanina Dagføring av Traðabrekku.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverk-ætlanir (karmur) | 8175 | | | Dagføring av Traðabrekku | 350.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At játta kr. 350.000,- av stovnsnummar 8175, LK81999, Vegaverkætlanir (karmur), á verkætlan Dagføring av Traðabrekku.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 02. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 212/24 Dagføring av Jøkulstræti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 17/19 | 19/00853-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 19/20 | 19/00853-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 02.05.2022 | 41/22 | 19/00853-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 131/22 | 19/00853-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 124/22 | 19/00853-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 68/22 | 19/00853-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 257/22 | 19/00853-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 245/22 | 19/00853-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 02.09.2024 | 51/24 | 19/00853-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 207/24 | 19/00853-1 |
| 11 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 212/24 | 19/00853-1 |

**Upprunin til málið:**
Nú Landavegurin er dagførdur, so treingir síðugøtan Jøkulstræti til at dagførast. Eisini er stórur tørvur á p-plássum í økinum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til dagføring av Jøkulstræti. Uppskotið umfatar strípað gongubreyt í niðara borð á 1,5 m, eina vegaføring á 2*2,75 m, p-pláss vinkulrætt á vegalinjuna framvið matr. nr. 910ap og 910æ, Tórshavn, og eina gongubreyt á 1,5 m í ovara borð. Síðst nevnda gongubreyt er ætlað til sjónveik, sum ferðast til og frá Føroya Blindastovn.

Ætlanin er eisini at taka hond um kloakkføringarnar í økinum, soleiðis at regnvatn verður tikið burtur úr skittvatnskloakkini. Sum nú er, fer regnvatn í skittvatnskloakkina. Eisini er økið sera vátt oman fyri Jøkulstræti. Her er ætlanin at leggja ein drenleiðing framvið í ovara borð.

Verkætlanin verður prosjekterað innanhýsis, og tilfarsveitingar verður byggiharraveiting fyri at gera verkætlanina bíligari.

Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ferðslulógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Staðseting av stórari mastur hjá FT-Net.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ætlanin er at leggja uppskotið til loysn fyri ferðslunevndina.
Byggi- og umhvørvisdeildin og býarskipanardeildin verða kunnaðar um verkætlanina.

**Skjøl**

Plantekningar Plantekning nr. 1
Plantekning nr. 1A
Fíggjarskjøl Kostnaðarmeting_HVÚ
Kostnaðarætlan C

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

Um roknað verður við einum meturkostnaði á 5.500,- kr./m, so verður kostnaðurin fyri handverkaraútreiðslur umleið kr. 570.000,- u/mvg fyri umleið 103 m av vegi.
Samlaði kostnaðurin íroknað projektering og eftirlit og 6,25% mvg verður uml. kr. 1,0 mió.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at dagføra Jøkulstræti og samstundis at gera minst 27 nýggj parkeringspláss á økinum, at innheinta 2 undirhondsboð uppá arbeiðið og at játta kr. 1,0 mió. til arbeiðið av íløgukarminum fyri vegir og parkering, konto.nr. 8175, løgunummar L00001.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Ráðgevi hevur m.a. í samráð við grannalagið, vegna kommununa tillagað prosjekt at dagføra Jøkulstræti og sett arbeiðið at gera vegin í útboð.

Tilboð verða tøk 5. mars 2020, at leggja fyri nevnd á fyrstkomandi nevndarfundi.

**Tilmæli:**
Tilmæli um tilboð og fígging v.m verða tøk á fundinum.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Lisitatión um vegarbeiði at dagføra Jøkulstræti og útvega fleiri p-pláss varð hildin 05.03.2020.

Sp/f Ráð hevur staðið fyri útbjóðingini. Tríggir arbeiðstakarar vóru bodnir at geva tilboð og allir lótu tilboð inn.

Innkomnu tilboðini vóru hesi.
1) Tilboð frá Tórhalli Hansen uppá kr. 2.399.200,- uttan mvg
2) Tilboð frá RTS Contractors uppá kr. 2.893.372,- uttan mvg
3) Tilboð frá KONSAX uppá kr. 2.625.977,- uttan mvg

**Ískoyti:**

Samlaði kostnaðurin er væl oman fyri metingina frá mars 2019. Arbeiðið varð ikki mett átrokandi tá, og peningur varð ikki tøkur tá.
Nú sethús eru bygd við niðara borð á Jøkulstræti, verður boðað frá avvatnings trupulleikum, ið einast kunnu loysast við at dagføra vegin.
Arbeiðið kann tillagast og bjóðast út av níggjum.
Ein tillaging er gjørd av umsitingini, og er metingin 1,9 mió. v. 6,25% mvg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

- Samráðast við Tórhall Hansen, ið átti lægsta boðið, um eina tillagaða loysn, mett til 1,9 mió. v. mvg.
- Játta 815.000 kr. av 6875, L00002 framfluttur løgukarmur ógreinað, 639.000 kr. av 6875, L00001 Løgukarmur fyri árið, og 546.000 kr. av 6875, LK 68999, Kloakkir.
- Beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 02. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at umsitingin útinnir tær tillagingar, sum nevndin ynskir.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ein tillagað loysn er gjørd, og hevur Tórhallur Hansen givið eitt tilboð uppá hesa, ið er 2.313.300 kr. v. 6,25% mvg.

Tilboðið er væl hægri enn mett varð, og grundgevingin fyri hesum er, at kostnaðarstøðið er hækkað sera nógv síðan metingin varð gjørd, hetta orsakað av støðuni úti í heimi.
Tilboðið er kannað, og eru einleika prísirnir hækkaðir millum 5 og 11%, og er hetta mett at vera í lagi, vísandi til kostnaðarstøði í dag.

Eykakostnaðurin er mettur til 500.000 kr. Tá er óvæntað eisini íroknað.

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | L68041 | Dagføring av kloakk í Jøkulstræti | | 500.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 500.000 kr. av 6875 LK68999 til verkætlanina dagføring av kloakk í Jøkulstræti, 6875 L68041 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er liðugt og avhendað til Tórshavnar kommunu við einum samlaðum avlopi á kr. 400.422,- sum skal flytast á 6875, LK68999, Kloakkir (karmur), og verkætlanin skal lokast.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | L68041 | Dagføring av Jøkulstræti | 6875 | LK68999 | Kloakk (karmur) | | 400.422 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At flyta avlopið frá verkætlanini 6875, L68041, Dagføring av kloakk í Jøkulstræti, kr. 400.422,-, á 6875, LK68999, Kloakk, og verkætalnin skal lokast.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Tekniska nevnd 02. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>19. september 2024 | Blað nr.: 933 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# 213/24 Ferðslutrygd við Eysturskúlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.05.2021 | 28/21 | 20/04029-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.09.2021 | 51/21 | 20/04029-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 222/21 | 20/04029-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 229/21 | 20/04029-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 26.04.2022 | 38/22 | 20/04029-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 27.04.2022 | 121/22 | 20/04029-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 96/22 | 20/04029-1 |
| 8 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 123/22 | 20/04029-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 02.09.2024 | 54/24 | 20/04029-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 208/24 | 20/04029-1 |
| 11 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 213/24 | 20/04029-1 |

**Upprunin til málið**
Foreldur at næmingum á Eysturskúlanum eru ótrygg við ferðslutrygdina á staðnum.

**Lýsing av málinum**
Foreldur og foreldraráð á Eysturskúlanum hava heitt á kommununa um at finna eina haldgóða loysn, so ferðslutrygdin kann verða so góð sum til ber.

Umsitingin hevur gjørt eitt ávegis uppskot, 20/04029-2, til hvussu ferðsluviðurskiftini kunnu gerast betri.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | x | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at arbeiða víðari við uppskotinum 20/04029-2.

**Tekniska nevnd 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eitt endaligt uppskot, 20/04029-4, og gjørt eina kostnaðarmeting av at ferðslutryggja vegirnar við Eysturskúlan.
Uppskotið fevnir eisini um at fáa til vegar 29 p-pláss til Eysturvøll. Hetta tí íbúgvarar í grannalagnum kæra sína neyð um parkerings óskil við vøllin.

T.v.s. at arbeiðið er klárt at bjóða út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

Fíggjartørvurin er mettir til 1,8 mill. kr. og kann fíggjast av íløgukonto 8175.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:
- Tikið verður undir við, at nevnda verkætlan kann byrja.
- At flyta kr. 1.800.000 kr. av konto 8175, LK81043 (Parkeringstunnil), á nýggja verkætlan «Ferðslutrygd við Eysturskúlan» undir konto 8175
  Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Tó skal vegateinurin fram við eysturvølli og parkeringsøkið vestan fyri eysturvøll ikki gerast og um peningur er eftir, skal restin brúkast til skúlagarðin við Eysturskúlan.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið í útboði, og lægsta boð átti Maskingrevstur v/Allan og var 2.306.764 kr. v. 6.25% mvg.
Aftrat hesum kemur ferðslutrygdarátøk á 260.000 kr.
Óvæntað roknast til 10% svarandi til 250.000 kr.
Fíggjartørvurin er íalt 2.816.764 kr. v. 6.25% mvg.
Áður játtað 1.300.000 kr., írestandi tørvur er 1.517.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:
- Tikið verður undir við, at nevnda verkætlan kann byrja.
- At flyta kr. 900.000 av 8175, LK81999, Vegaverkætlanir, og 617.000 kr. av 6875, LK68999, Kloakkir
- Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 26. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti**
Arbeiðið er liðugt og avhendað til Tórshavnar kommunu við einum halli á kr. 774.610,-
Frágreiðingin uppá hallið er hendan:
Eftir at tilboðið hjá Maskingrevstur var kannað, varð komið fram á, at posturin fyri 2 løg av asfalti var alt ov lágur. Prísurin er settur til 190 kr/$m^2$, og er hetta langt undir tann vanliga prísin fyri hetta arbeiðið.
Maskingrevstur greiðir frá, at hann hevur fingið skeivan prís frá undirveitaranum, sum er Kreton.
Rætti prísurin er 390 kr./m2, men Kreton vil ganga við til eina lækking í kostnaðinum niður í 330 kr./$m^2$.
Eftir hesum verður tilboðskostnaðurin kr. 2.317.512,- uttan mvg.
Næstlægsta tilboðið frá JEP-Smíð er uppá 2.470.681,75 uttan mvg. (Asfalt 460,90 kr./$m^2$)
Hóast feilin átti Maskingrevstur lægsta boðið.

Annað, sum hevur dýrkað verkætlanina, er tann nýggja ferðslutrygdarskipanin, sum ikki er roynd fyrr í Føroyum, við ljósum í gonguteigastrikunum, sum tendra, tá fótgangari ger seg til reiðar at fara yvir um vegin. Eisini eru «skolepatruljeblink» sett upp, eisini nýtt í Føroyun. Eyka grevstrararbeiði í sambandi við omanfyrinevnda hevur viðført nógv eykaarbeiði. Løgreglan góðtók ikki, at vegurin partvís var opin, meðan arbeitt varð, men at vegurin/vegamótið við skúlan var stongt. Hetta førdi við sær, at arbeiðið mátti gerast um páskahøgtíðina og aðrar dagar, tá skúlin var stongdur.

Aðrar upphæddir so sum prosjektløn (umsitingin), útreiðslur til prosjekt og eftirlit, eykaarbeiði og mvg eru eisini væl meira enn væntað.

Omanfyri nevnda hall kann fíggjast við at játta 774.610,- av stovnsnummar 8175, LK81999, Vegaverkætlanir (karmur), á verkætlanina 8175, L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan fyri at dekka undirskotið og málið skal lokast.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir (karmur) | 8175 | L81046 | Ferðslutrygd við Eysturskúlan | | 774.610 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 3.591.610 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2021 til 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At játta kr. 774.610,- av stovnsnummar 8175, LK81999, Vegaverkætlanir (karmur), á verkætlanina 8175, L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan fyri at dekka undirskotið
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 02. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 214/24 Dagføring av Norðara Ringvegi við Norðurlandahúsið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 02.06.2021 | 11/21 | 21/02118-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 34/21 | 21/02118-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 159/21 | 21/02118-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 187/21 | 21/02118-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 07.02.2022 | 5/22 | 21/02118-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 44/22 | 21/02118-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 43/22 | 21/02118-1 |
| 8 Tekniska nevnd | 02.09.2024 | 53/24 | 21/02118-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 209/24 | 21/02118-1 |
| 10 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 214/24 | 21/02118-1 |

**Lýsing av málinum**
Norðari Ringvegur hevur tørv á einari dagføring. Ferðslan, sum skal snara til vinstru inn til Norðurlandahúsið, er til ampa fyri ferðsluna, sum skal eystureftir á Norðara Ringveg.

Tað er tøvur á einum busslumma í sunnara borði av vegnum. Í dag steðgar bussurin mitt á vegnum, tað ger eisini, at ferðslan má steðga og fólk, sum koma úr bussinum, ikki vita hvar tey skula fara yvir um vegin.

Í sambandi við hesa dagføring er eisini nøktandi øki til súkklubreyt í sunnaru síðu, frá Áargeil 17 til rundkoyringina við Sundsvegin

Av tí at SEV er í holt við at leggja ein elkaðal í sunnaru gongubreyt, er tað eitt upplagt høvi at breiðka Norðara Ringveg nú.

Kostnaðarmetingin fyri prosjektið er uml. 1.500.000 kr. v/ kommunalum mvg.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kort j.nr. 21/02118-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Blað nr.: 938<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Talan er um dagføring av ringvegnum við Norðurlandahúsið.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 1.500.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 1.500.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato: aug-okt 2021 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| Upphædd íalt | Á | | | Av | | | Lokað verkætlan | Eykajáttan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Deild | Verkætlan | | Deild | Verkætlan | | | |
| Dkk 1.500.000 | 8175 | nýggj | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Ferðslubólkurin mælir til at taka undir við at Norðari Ringvegur verður dagførdur og breiðkaður, so pláss verður fyri vinstrasvingsbreyt til Norðurlandahúsið fyri ferðsluni eystureftir, buss lumma í sunnaru síðu, súkklubreyt í sunnaru síðu og gonguteigi við miðoyggj.

**Ferðslunevndin 02. juni 2021:** Ferðslunevndin tekur undir við tilmælinum frá ferðslubólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At taka undir við samtyktini hjá ferðslunevndini
- At seta verkætlanina í gongd
- At fíggja verkætlanina við kr. 1.500.000,00 av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, nýggj verkætlan "Dagføring Norðari Ringvegur við Norðurlandahúsið"
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið við at dagførða Ringvegin framvið NLH er nú boðið út og lægsta boð átti J&K, sum er kr. 1.905.449,00 v. 6,25% mvg. Hetta er væl hægri enn tær 1,5 mió. kr., sum higartil eru játtaðar. Hædd skal eisini takast fyri óvæntað, 10%
Uppgongutíðin, ið er, hevur við sær at kostnaðarstøði er áleið 25% hægri enn vanligt. Tað sæst eisini á øðrum verkætlanum.
Um arbeiðið skal setast í verk, er neyðugt við einum ískoyti á kr. 600.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At taka undir við samtyktini hjá ferðslunevndini
- At seta verkætlanina í gongd
- At fíggja ískoyti við kr. 600.000,00 av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, nýggj verkætlan "Dagføring Norðari Ringvegur við Norðurlandahúsið"
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Arbeiðið er liðugt og avhendað til Tórshavnar kommunu við einum samlaðum avlopi á kr. 154.000,-, sum skal flytast á 8175, LK81999, Vegaverkætlanir (karmur) og verkætlanin skal lokast.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 8175 | L81043 | Dagføring av Norðara Ringvegi | 8175 | LK81999 | Vegaverk-ætlanir (karmur) | | 154.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At flyta avlopið frá verkætlanini 8175, L81043, Dagføring av Norðara Ringvegi við Norðurlandahúsið, kr. 154.000,-, á 8175, LK81999, Vegaverkætlanir og verkætlanin skal lokast.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 02. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 215/24 Miðoyggj og gonguteigur á Løgmannabreyt, millum Atlagøtu og Kirkjustræti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 06.03.2024 | 7/24 | 24/00543-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 03.06.2024 | 44/24 | 24/00543-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 210/24 | 24/00543-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 215/24 | 24/00543-1 |

**Upprunin til málið**
Áheitan komin frá borgarum, um at fáa ein gonguteig á Løgmannabreyt, millum Atlagøtu og Kirkjustræti. Hetta er leiðin, har børn ganga, tá tey skulu í skúla, verður sagt.

**Lýsing av málinum**
Longri uppi í svinginum er ein gonguteigur, men hesin er nakað ótryggur vegna tess, at útsýnið ikki er so gott.
Skal ein gonguteigur gerast á nevnda stað, eigur ein miðoyggj at verða gjørd og vegurin breiðkaður samsvarandi, tí ferðslan gongur skjótt eftir Løgmannabreyt.
Umsitingin hevur gjørt uppskot til omanfyri nevndu loysn.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

**Tilmæli:**
Ferðslubólkurin mælir til at taka undir við uppskotinum, og beina málið í teknisku nevnd.

**Ferðslunevndin 06. mars 2024:** Tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at breiðka vegin og at gera eina miðoyggj er mett at kosta 750.000 kr. v. kommunu-MVG.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

| | **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Blað nr.: 942<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverk-ætlan | 8175 | | | Breiðkan og miðoyggj á Løgmann-abreyt | 750.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At játtaðar verða kr. 750.000 av konto 8175, Vegagerðir, LK81999, Vegaverætlanir, á konto 8175, nýggj verkætlan "Breiðkan og miðoyggj á Løgmannabreyt"
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina og ferðslunevndina.

**Tekniska nevnd 03. juni 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Bjørg Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Av tí at málið er viðgjørt í ferðslunevndini, skal tað beinleiðis í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og ferðslunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

## 216/24 Umbøn um eykajáttan til kontu 6510

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.04.2024 | 71/24 | 24/01618-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.05.2024 | 101/24 | 24/01618-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.06.2024 | 108/24 | 24/01618-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 11.06.2024 | 163/24 | 24/01618-1 |
| 5 Býráðsfundur | 20.06.2024 | 158/24 | 24/01618-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 24/01618-1 |
| 7 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 216/24 | 24/01618-1 |

**Upprunin til málið**
Leiðarin av kirkjugørðunum í Tórshavnar Kommunu hevur dagført metingina av árliga kostnaðinum at reka kirkjugarðarnar í kommununi, soleiðis at kirkjugarðarnir frameftir verða riknir við tí tign og virði, ið hoyrir til henda raksturin. Metingin tekur støði í búskettinum fyri 2024, sum staðfestir, at ov lítið er sett av til játtanina til 6510 í fíggjarætlanini 2024. Tí verður við hesi umbøn biðið um eykajáttan til konto 6510 Kirkjugarðar í 2024.

**Lýsing av málinum**
Dagligi raksturin av kirkjugørðunum í Tórshavnar Kommunu fevnir um tilsamans 13 kirkjugarðar, har kirkjugarðurin við Velbastaðvegin, sum er nógv víðkaður og útbygdur hesi seinastu árini, er nógv tann størsti kirkjugarðurin í kommununi.

Hinir kirkjugarðarnir liggja spjaddir í ymsu bygdunum, ið eru komnar upp í Tórshavnar Kommunu gjøgnum árini. Eisini er onkur nýggjur kirkjugarður komin afturat, t.d. nýggi kirkjugarðurin í Hoyvík.

Í kjalarvørrinum av hesi gongdini er umsitingin, røktin og viðlíkahaldið av kirkjugørðunum vorðin rættiliga umfatandi, men játtanin til konto 6510, Kirkjugarðar, hevur ikki verið dagførd samsvarandi hesi gongdini tey seinastu árini.

Ætlanin var at fremja hesa dagføringina í fjør heyst í sambandi við fyrireikingarnar til fíggjarætlanina 2024, men tað bar tíverri ikki á mál, áðrenn uppskotið til fíggjarætlan 2024 var liðugt. Játtanin í fíggjarætlanini 2024 varð tí, uttan grundgevingar, sett til góðar 4 mió. kr., ið er væl lægri enn játtanin árini frammanundan.

Leiðarin fyri kirkjugarðarnar í Tórshavnar Kommunu hevur nú gjørt búskett, sum vísir játtanarliga tørvin á konto 6510 Kirkjugarðar í 2024, sí uppsetingina niðanfyri:

| | |
|---|---|
| **Játtan 2024** | **4.082.000 kr.** |
| Meting av rakstarkostnaði í 2024 | -6.201.000 kr. |
| Dagføring av amboðum og rakstrargøgnum | -280.600 kr. |
| Meirnýtsla í 2023 | -379.651 kr. |
| **Munur** | **-2.779.251 kr.** |

Sambært búskettinum omanfyri er samlaða játtanin til kirkjugarðarnar í Tórshavnar Kommunu tilsamans 2,8 mió. kr. ov lítil í 2024.

Búskettið fyri raksturin er sett upp við støði í kostnaðum frá 2023, tó dagført og regulerað við kendum faktorum so sum lønir. Uttanhýsis veitingar eru framskrivaðar við 5% hækking. Metingin av rakstrarkostnaðinum tekur sostatt bert hædd fyri at varðveita verandi tænastustøði.

Viðvíkjandi dagføringunum av amboðum og rakstrargøgnum eru bert tær mest átrokandi dagføringarnar í 2024 tiknar við. Harumframt var ein meirnýtsla á konto 6510 á næstan 380 t.kr. í 2023, sum skal fíggjast í ár.

Í hesi umbøn um eykajáttan verður biðið um tilsamans 1,9 mió. kr. til konto 6510 Kirkjugarðar.

Eykajáttanin er útreiðsluneutral, tí hon verður fíggjað við at flyta 1,9 mió. kr. av løgujáttanini 6575 Kirkjugarðar.

Restin av teimum 2,8 mió. kr., sum kirkjugørðunum tørvar í 2024, svarandi til 900 t.kr., verða fíggjaðar við at flyta við eykajáttan av øðrum kontum á tekniska økinum, tá ið framflytingarnar frá 2023 verða avgreiddar í sambandi við góðkenningina av ársroknskapinum 2023 hjá Tórshavnar Kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | x | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |

| Upphædd |
|---|

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6575 | L65006 | Kapellið, umvæling og útbygging | 6510 | | Kirkjugarðar | | 1.900.000 |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á bygningsdeildini og leiðarin á kirkjugørðunum mæla til at játta 1,9 mió. kr. í eykajáttan til konto 6510 Kirkjugarðar við at flyta 1,9 mió. kr. av løgujáttanini 6575 L65006 Kapellið, umvæling og útbygging inn á 6510 Kirkjugarðar, og beina málið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. apríl 2024:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Avgerð er tikin um at skifta høvuðshurðina til Kapellið, ið er gomul og ótøtt og hampa bæði wc'ini áðrenn vit at flyta løgujáttan 6575 L65006 Kapellið, umvæling og útbygging inn á Kirkjugarðar. Kostnaðarmetingin fyri hesi arbeiði er 200.000 túsund krónur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á bygningsdeildini og leiðarin á kirkjugørðunum mæla til at játta 1,7 mió. kr. í eykajáttan til konto 6510 Kirkjugarðar við at flyta 1,7 mió. kr. av løgujáttanini 6575 L65006 Kapellið, umvæling og útbygging inn á 6510 Kirkjugarðar, og beina málið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mai 2024:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. juni 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heita á umsitingina um at koma við einum uppskoti um, hvussu raksturin í kirkjugørðunum í kommununi kann verða skipaður í framtíðini, á komandi fundi.

**Fíggjarnevndin 11. juni 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 20. juni 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 217/24 Grasagarður - Spælipláss 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 145/21 | 21/03668-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.10.2021 | 240/21 | 21/03668-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 201/21 | 21/03668-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 292/21 | 21/03668-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 298/21 | 21/03668-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.02.2022 | 51/22 | 21/03668-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 23.02.2022 | 61/22 | 21/03668-1 |
| 8 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 38/22 | 21/03668-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.09.2024 | 146/24 | 21/03668-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 203/24 | 21/03668-1 |
| 11 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 217/24 | 21/03668-1 |

**Upprunin til málið:**
Politiskt ynski er at dagføra spæliplássið í Grasagarði.

**Lýsing av málinum:**
Grasagarður, millum Steinatún og Kongagøtu, varð í 2015 innrættað til eitt “klassiskt” spælioki við spælitólum í miðbýnum. Økið er uml. 2.000 $m^2$ til víddar og fevnir um partar av matriklunum 335, 337 og 338. Umframt spælipláss eru skúlatannlæknastovan og Tilhaldið, sum er savningarstaður hjá teimum eldru í býnum, á matriklunum.

Økið var fyrr tveir vakrir urtagarðar við høgum grótlaðaðum grótgørðum uttanum, men seinni árini eru garðarnir lagdir saman, gøtur skipaðar og grótgarðar lækkaðir. Áðrenn spælipláss varð skipað á økinum, hýsti Grasagarður barnafagnaði, brúðarvígslum, topp-popp konsertum og hátíðarhaldið fyri pisum á Føroya Handilsskúla var eisini vorðin ein fastur táttur. Harumframt var Grasagarður brúktur til ótálmaðan drykkjuskap, grafitti máling og hissini sproytur. Ofta ótespiligt aftaná vikuskiftir, men í dag hevur Grasagarður fingið nýtt andlit og verður nýttur til spæl, uppihald og gjøgnumgongd.

Á økinum eru stór og gomul vøkur trø, mest ahorn, umframt runnar av ymiskum slag, blómur og staudir. Í miðbýnum er av bestu vakstrarmøguleikum og hartil veðurgott, sum er við til at skapa ein fjálgan hugna á staðnum.

Standurin í Grasagarði
Samtykt varð í 2015 at skipa grasplenurnar í Grasagarði til spælioki hjá børnum. Flag og mold varð gravað av teimum stóru grasplenunum, økið varð drenað og bygt uppaftur við stabilum tilfari, og gummifallundirlag varð lagt á. Skráar á grasplenu vórðu skipaðir við timbursititrappu. Arbeiðið varð boðið út sum heildararbeiðstøka, ið fevndi um jørð- og timburarbeiði, dren- og vatnavveiting, útvegan og uppseting av ljósútgerð og spæliútgerð (klatrinet, trampolinir v.m.) og fallundirlag. Neyðugt var við umfatandi drenings- og lendisarbeiði, og varð tað mesta av fíggingini nýtt til hetta arbeiðið. Úrslitið varð, at fíggingin til spæliútgerðina varð skerd, og gjørdist úrvalið av spæliútgerðini tí einfaldari enn ætlað.

Spæliplássið er nógv vitjað seinastu árini, og sær spæliútgerðin út til at vera í góðum standi uttan at hetta er grundað í eini støðulýsing. Netið í trampolinunum er skift út 1-2 ferðir, men er gummiundirlagið sera litfarið, og er óynsktur gróður á undirlagnum, sum kemst av vantandi viðlíkahaldi. Men ein stórur eftirspurningur er eftir at fáa størri úrval og áhugaverdari spælioki og útgerð.

Heildarætlan

Ynskið frá umsitingini í 2014 var at gera eitt heildaruppskot fyri allan garðin og ikki bert grasplenurnar, men varð hetta tá avvíst. Hetta sæst aftur sum ein avbjóðing við økinum í dag, tí økið tykist sera sundurbýtt, og grundað á vantandi samanhangin gerast nøkur øki ikki serliga áhugaverd at vera í. Ovari vøllur verður ikki nógv brúktur mótsett niðara vøll, har nógv børn spæla. Harumframt verður skálin lítið brúktur, hóast hann varð dagførdur við einum klatriveggi.

Í sambandi við eina dagføring av spæliplássinum í Grasagarði er ynskiligt at gera eitt heildaruppskot, sum eisini verður skipað í mun til nærumhvørvið og virksemið í økinum. Hyggjast eigur eftir nýtsluni, hvat riggar og ikki, og út frá hesum velja, hvat skal varðveitast, dagførast og endurnýtast.

Í samsvar við barna- og ungdómspolitikkin hjá Tórshavnar kommunu og tær tilráðingar, ið knýttar eru at børnum og ungum, skal spæliøkið vera ódefinerað í síni innrætting. Hetta grundað á, at tað skal eggja brúkarunum at nýta hugflogið, og skapar spæliplássið sostatt eisini eitt betri haldføri í mun til ta tíðina, sum nýtt verður á økinum. Tað sama ger seg galdandi í mun til litir. Økið skal ikki vera doyvt við alskyns litum.

**Lógir, ásetingar o.a.:**

**Upplýsingar frá umsitingini:**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum):**

**Skjøl:**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at innheinta hugskot til heildaruppskot fyri Grasagarð, at játtaðar verða kr. 100.000 av konto 6275, L62044, Spælipláss í kommununi, og at beina málið í fíggjarnevndina umvegis mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at málið verður lagt fyri nevndina aftur á næsta fundi liðugt at taka støðu til.

**Mentamálanevndin 06. oktober 2021:** Útsett.

**Ískoyti:**
Grasagarður er einasta almenna kommunala spæliplássið í Tórshavn, og ynskið er tí, at hetta skilur seg burtur frá spæliplássunum á dagstovnunum og úti í eigarafeløgunum.

Umsitingin hevur sett seg í samband við útlendskan veitara, sum hevur tilvísingar at vísa á um allan heimin, og eru spæliplássini bæði forvitnislig, nýskapandi og øðrvísi í mun til tað klassiska spæliplássið við siðbundnu spæliútgerðini, sum somuleiðis er í samsvari við tilráðingarnar í barna- og ungdómspolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

Umboð fyri veitara hevur vitjað í Føroyum, og verður eitt heildaruppskot fyri Grasagarð í løtuni tilevnað. Heildaruppskotið verður tøkt til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini, og verður tá gjøgnumgingið fyri nevndarlimunum.

**Skjøl:**
Heildaruppskotið verður lagt fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at fara undir at dagføra Grasagarð sambært heildaruppskotinum, og at 2 mió. kr. verða játtaðar til gerð av spæliplássinum, harav kr. 500.000 verða játtaðar av L62044, Spælipláss í kommununi og kr. 1,5 mió. av íløguætlan fyri 2022 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at játta kr. 2 mió. av íløguætlan fyri 2022.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ikki bar á mál at finna fram til eitt endaligt heildaruppskot frá danska veitaranum, og varð samstarvið tí endað. Verkætlanin at skipa og gera nýtt spælipláss í Grasagarði varð tí boðin út í alment útboð.

Verkætlanin varð boðin út sum ein heildararbeiðstøka, og fevnir verkætlanin um allar tilfars- og arbeiðsveitingar í sambandi við skipan og gerð av spæliøki í Grasagarði sambært heildaruppskoti.

Seks tilboð vórðu latin inn, og er príslegan nakað ójøvn:

| | |
|---|---|
| - Hjálpirót | kr. 5.313.799,59 |
| - Arta/Grønt&Grátt | kr. 5.200.000 |
| - Inventartænastan | kr. 3.621.054 |
| - NDO/Havin | kr. 9.773.185 |
| - Innspark/Urtagarðstænastan | kr. 5.992.465,59 |
| | kr. 4.918.045,59 (alternativt tilboð) |

Innkomnu tilboðini eru mett út frá hesum metingarstøði:
- góð skipan av økinum sum heild.
- kappingarførur prísur.
- góðska av tilfari sum verður nýtt.
- gjøgnumførd samanseting av spælireiðskapi.
- atlit til dygdirnar í spæliplássinum.
- áhugaverdar loysnir.

Vinnarin av tilboðnum gjørdist Arta/Grønt&Grátt, sí metingarskjalið.

Roknast skal við áleið 10% til óvantaðar útreiðslur, og er ein mettur kostnaður fyri verkætlanina áljóðandi kr. 5.720.000 (íroknað 10% til óvantað).

Fundur hevur verið við Javna, har víst varð á teirra sjónarmið í sambandi við spæl og atkomu fyri børn við rørslutarni. Vinnandi uppskotið er sera fevnandi fyri øll, bæði í mun til atkomu og spæl á øllum økinum, men kunnu nakrar smávegis tillagingar gerast í tilgongdini, fyri at fáa Grasagarð enn betur fyri førleikaskerd børn/ung.

Fundur hevur somuleiðis verið við fyritøkuna AFRY um at ljóssseta Grasagarð, soleiðis at spæliøkið eisini er innbjóðandi í myrku tíðini. Tilfar um hetta kemur til fundin.

**Skjøl:**
Grasagarður - Meting av tilboðum, journal nr. 21/03668-13
Grasagarður - Heildaruppskot (úrdráttur úr tilfari), journal nr. 21/03668-14

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at fara undir at dagføra Grasagarð sambært heildaruppskotinum, at heimila umsitingini at fara undir samráðingar og gera sáttmála við Arta/Grønt&Grátt um verkætlanina og at írestandi 3,7 mió. kr. verða játtaðar til gerð av spælplássinum, harav kr. 3 mió. verða játtaðar av LK62995, Spælipláss, og kr. 700.000 av LK62996 Miðbýarætlan. Peningurin skal flytast á kt. 6275, L62051, Grasagarður og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sáttmáli varð í 2022 gjørdur við Arta/Grønt&Grátt í sambandi við arbeiðið at dagføra spæliplássið í Grasagarði. Sambært sáttmálatíðarætlanini skuldi verkætlanin avhendast 20.07.2022, men hava verið avbjóðingar við seinkaðum tilfarsveitingum og manglum, sum seinni í tilgongdini skuldi vísa seg at vera grundað á, at Sp/f Arta var farið á húsagang. Verkætlanin varð tí tillagað nakað í mun til meir- og minniveitingar.

Minniveitingarnar fevna um 3 stk. heingikoyggjur og integrerað ljós í spælireiðskapi, men varð avtala fingin í lag um, at arbeiðstakari veitti kommununi eina reiggju til rørslutarnað sum eina meirveiting uttan tilkeyp. Harafturat hevur Sp/f Steinlag, undirveitari hjá Sp/f Arta, bjóðað kommununi at skifta ein part av gummifallundirlagnum út, sum ikki var gjørt sambært sáttmála. Hetta arbeiðið verður vantandi gjørt á sumri 2025.

Endalig uppgerð er nú avgreidd við kurator og tryggingina, og er arbeiðið at dagføra spæliplássið í Grasagarði so statt liðugt við einum halli á verkætlanini áljóðandi kr. 3.381.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 6275 | L62051 | Grasagarður - Spælipláss | | | 3.381 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til
- at loka verkætlanina L62051, Grasagarður - Spælipláss,
- at fíggja meirnýtsluna á kr. 3.381 av karminum LK62999, Fríðkan av býnum, og
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 218/24 Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 5.1 og øki 5.2

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2024 | 13/24 | 23/06318-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.01.2024 | 19/24 | 23/06318-2 |
| 3 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 16/24 | 23/06318-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.06.2024 | 132/24 | 23/06318-2 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.09.2024 | 153/24 | 23/06318-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 204/24 | 23/06318-2 |
| 7 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 218/24 | 23/06318-2 |

**Upprunin til málið**
Heildarætlan er gjørd fyri part av matr.nr. 256, Kirkjubøur oman fyri Argjahamar. 26. januar 2023 samtykti býráðið í mál nr. 22/07223, *Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging,* at heimila umsitingini at fara undir at bjóða part av matr.nr. 256 út til bygging. Lendini, sum eru boðin út, eru

1. Øki 3 til bygging av raðhúsum og/ella íbúðum, sí øki 3 á tekning – bygging á vestaru síðu av linju 2. Eitt tilboð er innkomið.
2. Øki 4 til bygging av vinnubygningi við íbúðum á ovaru hæddunum og felags parkering, sí øki 4 á eystaru síðu av linju 2. Eitt tilboð er innkomið.
3. ***Øki 5.1 til bygging av raðhúsum, sí øki 5.1 á tekning, bygging á eystaru síðu av linju 2 – 3 tilboð eru innkomin.***
4. ***Øki 5.2 til bygging av raðhúsum, sí øki 5.2 á tekning, bygging á eystaru síðu av linju 2 – eitt tilboð er innkomið.***
5. Øki 6.1 til bygging av íbúðarhúsum, sí øki 6.1 á tekning – bygging á vestaru síðu av linju 2 – Einki tilboð innkomið og feistin er farin.
6. Øki 1 bleiv lutað út til sethúsagrundstykkir, sí øki 1 á tekning – bygging á eystaru síðu av linju 1.

Sí fylgiskjal 23/06318-*6 Yvirlitskort skipan útstykking oman fyri Argjahamar dagf16juni2023 og Fylgiskjal 23/06318-5 Útbjóðingartilfar øki 5.1 og Fylgiskjal 23/06318-7 Útbjóðingartilfar øki 5.2.*

**Lýsing av málinum**
Í septembur 2023 beyð Tórshavnar kommuna øki 5.1 og øki 5.2 út til bygging av raðhúsum. Tá freistin at lata tilboð inn tann 25. oktobur 2023, kl. 12, var farin, vóru trý tilboð innkomin til øki 5.1 og eitt alternativt tilboð upp á øki 5.2.

Tilboðini fyri øki 5.1 eru frá;

- Sp/f SH Ráðgeving 4.360.000 kr. pr. raðhúsaeind 10 raðhúsaeindir
- Sp/f Høgni Mikkelsen 3.995.000 kr. pr. raðhúsaeind 10 raðhúsaeindir
- Sp/f Jóan Petur Vang 3.900.000 kr. pr. raðhúsaeind 11 raðhúsaeindir

Alternativa tilboðið fyri øki 5.2 er frá;

- Sp/f Jóan Petur Vang

**<u>Øki 5.1</u>**
Sambært útbjóðingartilfarinum verður økið selt fyri ásettan, fastan, mettan prís áljóðandi;

**kr. 4.131.163.**

Umframt hetta var í útbjóðingartilfarinum sett treyt til, at tilboðsgevi lat inn;

- váttan frá peningastovni um tøka fígging til keyp av lendi

- tekningar og frágreiðingar av verkætlanini
- frágreiðing um toymi

Í útbjóðingartilfarinum verður upplýst, at innlatnu tilboðini verða mett út frá niðanfyri standandi punkum, í fylgjandi raðfylgju;

- Endarkostnaður fyri hvørja búeind
- Byggilist
- Skipanin av økinum í sambandi við nærumhvørvið
- Væntað tíðarætlan fyri arbeiðstøku

Umsitingin hevur gjøgnumgingið innlatna tilfarið, bæði innanhýsis og saman við øllum tilboðsveitarum, og hevur síðani endaliga mett um tilboðini, sí fylgiskjal 23/06318-4 metingarskjal sambært krøvum.pdf.

Innlatnu uppskotini/tilboðini eru rættiliga lík, tá hugsað verður um, hvat eindarkostnaðurin fyri eindirnar er mettur at gerast. Sniðini á raðhúsunum eru kend í føroyskum høpi, og hava mennararnir hvør í sínum lagi latið uppskot inn, sum teir áður hava roynt at byggja. Sí innlatnu uppskotini, journal nr. 23/06318-1.

Niðurstøðan hjá dómsnevndini var, at uppskotið frá sp/f Jóan Petur Vang var mest fullfíggjaða tilboðið/uppskotið, bæði tá hugsað verður um sniðið á raðhúsunum og uttanumøkið, umframt at upplýsti eindarkostnaðurin á raðhúsaeindini er lægstur.

**Uppskot hjá Sp/f Jóan Petur Vang**
Uppskotið hjá Sp/f Jóan Petur Vang er við Kontrast sum heildarráðgeva.

Innlatna tilfar teirra er fullfíggjað og lýsir væl skipanina av uttanumøkinum umframt tilfarsval og tankar handan byggilistina. Uttanumøkið kring bygningina er væl umhugsað og vendir rætt í mun til sólargang.

Raðhúsaeindirnar hava eina óintrættaða kjallarahædd og innrættaða stovu- og loftshædd. Eindirnar kunnu gerast í trimum sniðum;

A) Uppskot við 4 kømurum
B) Uppskot við 3 kømurum, størri stovu og køk
C) Uppskot við 3 kømurum, bryggers í framhald av køki

Miðhæddin er í øllum uppskotunum innrættað við duri, bæðirúmi, køki og stovu í einum, umframt trappu. Loftshæddin er í øllum uppskotunum innrættað við 3 kømurum, baðirúmi og einari loftsstovu, sum leiðir út á stóru suðurvendu terrassuna. Undir terassuni er ein carport. Kjallarahæddin hevur tøkni og vaskirúm, men er annars óinnrættað. Eisini hevur hvørt raðhús altan og garð framman fyri húsið í ein norðan oman móti barnagarðinum.

Talan er um modulbygging, har hvør hædd er 82 $m^2$, og hvørt raðhús er samanlagt 246 $m^2$ til støddar (íroknað óinnrættaða kjallarahædd).

Bygningin leggur seg í lendið, og hækkar við lendinum/vegnum, soleiðis at 2 og 3 hús standa saman. Bygningin hevur smáar forskjótingar í framsíðunum. Í innlatna uppskotinum verður víst á møguleikan við listaklæðing og at seta lit á fasaduna. Raðhúsabygningin hevur mønutekju við einum halli á uml. 20 gradir. Tilboðsgevin er sinnaður at samstarva við kommununa um møguligar tillagingar í uppskotinum, so sum val av tilfari osfr.

Tilboðsveitari upplýsir, at arbeiðið kann byrja 1. apríl 2024, og miðað verður ímóti, at alt verður liðugt í 2026.

**Eindarkostnaðurin:**
Seinastu árini er bústaðarkostnaðurin hækkaður heilt nógv í Tórshavnar kommunu, og sýnist tað torført hjá vanligum fólki at seta búgv í kommununi.

Hetta útboðið er fyrsta royndin at bjóða eitt byggilendi út til mennarar at byggja, har eitt av krøvunum er at lata inn ein endarkostnað fyri bústaðareindirnar. Henda treyt varð roynd fyri at vita, um kommunan saman við einum tilboðsveitara kann byggja nakrar bústaðir við hámarkskostnaði.
Vinnandi tilboðið fevnir um bústaðareindir á 246 m$^2$, har eindarkostnaðurin er mettur til kr. 3.900.000 pr. bústaðareind. Hetta gevur ein fermetrakostnað áljóðandi kr. 15.854.

Umsitingin metir, at um samtykt verður at selja øki 5.1 til sp/f Jóan Petur Vang, so eigur ein endalig samráðing at fara fram við tilboðsveitaran um at tryggja ein fastan eindarkostnað, sum báðir partar kunnu góðkenna, áðrenn endaligt skeyti verður skrivað.

**Søla av raðhúsunum:**
Áhugamálini hjá Tórshavnar kommunu eru at nøkta bústaðartørvin í kommununi, og harvið tryggja, at bústaðirnir koma borgarum, ið hava tørv á einum bústaði, til góðar. Hetta kann tryggjast við, at kommunan ávísir ein keyparaskara til tilboðsveitara, t.d. við at áhugaði skriva seg upp á ein lista, har kommunan setir treytir til, hvør kann skriva seg upp, og at kommunan eftirfylgjandi lutar raðhúsaeindirnar út millum tey áhugaðu.
Ein annar møguleiki er, at tilboðsveitarin stendur fyri allari sølu, og tá er truplari hjá kommununi at tryggja, at tað eru tey, sum veruliga hava ein bústaðartørv, sum sleppa framat at keypa. Tað økir um vandan fyri spekulatión.
Politisk avgerð skal tískil takast um, hvussu ein søla skal fara fram.

**Øki 5.2**
Saman við tilboðnum uppá øki 5.1. letur Sp/f Jóan Petur Vang eitt alternativt boð inn uppá øki 5.2, ið er økið lagt av til 16 raðhúsaeindir. Hetta var einasta tilboð, sum kom inn uppá økið 5.2.
Sambært útbjóðingartilfarinum, verður økið selt fyri fast mettan prís áljóðandi;

**9.208.363 kr.**

Alternativa uppskotið er soljóðandi, sí somuleiðis s. 30 í uppskotinum frá JPV og Kontrast, journal nr. 23/06318-1:
"Tilboðsgevi bjóðar sama prís fyri hvørt grundstykki á øki 5.2 sum á 5.1. Tvs. at keypari ynskir at bjóða 375.560,30 kr/raðhús x 16 raðhús =

**6.008.964,80 kr uppá økið 5.2**"

Tilboðsgevi meinar, at eitt fríøki á 2373 m$^2$, sum eru krøvini á øki 5,2, er ov nógv í mun til tað, sum man kann byggja á. Av tí sama ynskir hann ein lægri fermetrakostnað.
Annars ynskir tilboðsgevi at brúka sama skitsuuppskot uppá økið 5.2 sum á 5.1, men at treytir við túnagøtu og grøna økið skal samskipast við kommununa.

Á fundi við tilboðsgeva tann 3. januar 2024, bleiv gjørt greitt, at tað ikki er møguligt at broyta prísin fyri lendið. Prísurin avhongur av, hvat tað kostar at gera samlaðu útstykkingina.

Raðhúsaeindirnar á økið 5.2. koma at kosta 575.510,20 kr, sum er 199.949,90 kr. meiri enn fyri raðhúsaeindina á økið 5.1. Í hesum sambandi bleiv umrøtt, um tað kundi verið ein møguleiki at býtt munin millum raðhúsaeindirnar á øki 5.1. og 5.2. og somuleiðis hækka fasta søluprísin pr. raðhúsaeind eitt sindur.

Umsitingin metir, at av tí at tilboðið er alternativt, og sølukostnaðurin er fastur, so eigur ein verulig samráðing at fara fram við tilboðsveitaran fyri at náa fram til eina sølu av stykkinum, soleiðis at somu tættir verða galdandi fyri bústaðarbyggingina.
Tískil verður mælt til at selja sp/f Jóan Petur Vang øki 5.2, treytað av at samráðingarnar koma á mál, har sølukostnaðurin heldur og tilboðsveitarin kann veita ein fastan nøktandi eindarkostnað fyri bústaðareindirnar.

Viðmerkjast skal, at alternativa uppskotið uppá øki 5.2 ikki telur við í niðurstøðuni hjá dómsnevndini uppá øki 5.1, men at uppskotini hava verið mett út frá hvør sínum fortreytum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr.nr 256 liggur í umráðisparti A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt. Uppskot til serstaka byggisamtykt liggur til hoyringar fram til 7. februar. Ásetingarnar fyr i øki 5.1. eru soljóðandi:

1. Øki E verður lagt til raðhúsabygging.
2. Raðhúsastykkir skulu vera í minsta lagi 200 $m^2$.
3. Byggingin skal verða sett samsvarandi einari góðkendari heildarætlan fyri økispartin. Heildarætlanir skulu gerast fyri hvønn økispart sær. Góðkendar heildarætlanir verða lagdar sum fylgiskjal til serstøku byggisamtyktina.
4. Mest loyvda byggistig er 0,35.
5. Mest loyvda nýtslustig er 1,05.
6. Byggjast kunnu í mesta lagi 3 hæddir og byggingin skal hava mønutekju, sum er javnfjarð við vegin. Niðasta hædd skal vera undir veghædd.
7. Mest loyvda hædd er 9 m til hægsta punkt við útvegg og 10,5 m til mønuna, mált frá planeringshædd.
8. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu vera í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/07223, Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/06318-1 spf RH Ráðgeving
23/06318-1 Høgni Mikkelsen
23/06318-1 Kontrast og JPV
23/06318-4 Metingarskjal sambært krøvum
23/06318-6 Yvirlitskort skipan útstykking oman fyri Argjahamar dagf16juni2023
23/06318-5 Útbjóðingartilfar øki 5.1.
23/06318-7 Útbjóðingartilfar øki 5.2
23/06318-14 Raðhús á Hamrinum øki 5.1 VOL 6
23/06318-24 Fundarfrásøgn Hanus Olsen 04.07.2024
23/06318-32 Metingarskjal 21.08.2024

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Søla av lendi

| | **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Blað nr.: 955<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## Játtan:

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | | 6475 | L64019 | Útstykking oman fyri Argjahamar | | 4.131.163 |
| | | | 6475 | L64019 | Útstykking oman fyri Argjahamar | | 9.208.363 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 13.339.526 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

Hetta málið er partur av útstykkingarverkætlanini oman fyri Argjahamar. Um endaligu samráðingarnar koma á mál við tilboðsgeva, so skal sølu-upphæddin flytast á L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at selja og sundurbýta økið 5.1 til tilboðsgevara, Sp/f Jóan Petur Vang, tá endaligu samráðingarnar við tilboðsgevara eru komnar á mál.
- at selja og sundurbýta øki 5.2 til tilboðsgeva, Sp/f Jóan Petur Vang, treytað av at samráðingarnar við tilboðsgeva koma á mál.
- at Tórshavnar kommuna stendur fyri at savna ein keyparaskara og lutar raðhúsaeindirnar út millum hesi og harvið tryggjar tilboðsveitaranum ein nøktandi keyparaskara.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. januar 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Samráðingarnar við Jóan Petur Vang (JPV) bóru ikki á mál, og tí verður farið víðari við tilboðnum frá Hanusi Olsen (HO).

**Grundgeving**
Tilboðini eru samanborin, og kann staðfestast, at tilboðini frá JPV og HO eru rímiliga jøvn, sí j. nr. 23/06318-32, Metingarskjal 21.08.2024.

Báðir tilboðsveitarar hava endurskoðað tilboð síni og eru komnir við eini príshækking upp á raðhúsaeindirnar, og tilboðið hjá JPV liggur kr. 50.000,00 lægri enn tilboðið hjá HO.

JPV innrættar ikki kjallarahæddina, men harafturímóti ger bilskýli og altan. Hetta svarar væl til, at HO innrættar allar hæddirnar – eisini kjallarahæddina, men byggi ikki bilskýli og altan móti vegnum.

JPV trekkir seg tó frá samráðingunum, tí hann er í samráðingum um aðra verkætlan, og tí verður farið víðari við tilboðnum hjá Sp/f Ráðgeving.

**Uppskot frá Hanusi Olsen oktober 2023**
Talan er um 10 raðhúsaeindir við mønutekju, ið eru innrættaðar á øllum trimum hæddum. Samlaða víddin er 220,5 fermetrar. Allar búeindir hava altan á miðhæddini, og í kjallarahæddini er atgongd út í bakgarðin. Høvuðsinngongdin fyri hvørja íbúð sær er trekt inn, so ein fær kensluna av eini meira privatari inngongd. Her kunnu veggirnir við inngangsøkið eisini hava hvør sín serstaka lit.

Byggingin er býtt sundur í tvær minni eindir fyri at skapa miðsavnan millum byggingina og fyri at bróta fasaduna upp. Fríøkið er væl umhugsað í sambandi við veður og vind, við góðari staðseting millum eindirnar, og tað vendir "rætt", tá ið hugsað verður um suður-/norðurvenda sólargangin. Fríøkið liggur niveaufrítt, og er atkoma tí góð hjá fólki við tarni.
Tíðarætlanin er 15-18 mánaðir frá tí, at arbeiðið kann byrja.

**Samráðingarfundur tann 04.07.2024**
Á samráðingarfundi tann 04.07.2024, sí j.nr. 23/06318-24, Fundarfrásøgn 04.07.24, vísti HO lagaligheit viðvíkjandi tilfarsvali og sniði á bygging. Avtalað varð, at býarskipanardeildin kemur við uppskoti um litsamanseting fyri klædning, vindeygu og tekju.

Eisini er HO kunnaður um, at TK ynskir, at keypsskarin skal vera 'fyrstuferðskeyparar', t.e. fólk, sum mangla bústað, og ikki íleggjarar, umframt at bústaðarskylda verður ásett á t.d. 3 ár á raðhúsunum. Somuleiðis varð kunnað um, at keypsskarin skal finnast við treytum frá TK. HO mælir til, at TK finnur keyparar, so skjótt sum byggiloyvið er givið, at keypari setir trygd, og at felagið setir móttrygd. Hetta merkir, at keyparin fær pengarnar aftur, um felagið ikki megnar at gjøgnumføra verkætlanina.

Uppskot til treytað skeyti er sent Hanusi, har tað somuleiðis verður kunnað um, at ætlanin er at seta orðing inn í skeytið um søluprís av raðhúsunum, umframt áseting um sjálva sølutilgongdina av raðhúsunum. Hanus vísir eftirfylgjandi á, at hann ikki hevur viðmerkingar til skeytið.

**Skjøl:**
- j. nr. 23/06318-32, Metingarskjal 21.08.2024
- j.nr. 23/06318-24, Fundarfrásøgn 04.07.24

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Søla av lendi

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Lokað verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | 6475 | L64019 | Útstykking oman fyri Argjahamar | | 4.131.163 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 4.131.163 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

Hetta málið er partur av útstykkingarverkætlanini oman fyri Argjahamar. Sølu-upphæddin skal flytast á L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til:
- at selja og sundurbýta økið 5.1 til tilboðsgevara, Sp/f SH Ráðgeving við Hanusi Olsen
- at Tórshavnar kommuna stendur fyri at savna ein keyparaskara og lutar raðhúsaeindirnar út millum hesi og harvið tryggjar tilboðsveitaranum ein nøktandi keyparaskara.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 219/24 Skeltisreglugerð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2022 | 127/22 | 22/02144-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 30.05.2022 | 45/22 | 22/02144-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 31.05.2022 | 28/22 | 22/02144-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2022 | 175/22 | 22/02144-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 58/22 | 22/02144-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.10.2022 | 41/22 | 22/02144-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 05.10.2022 | 206/22 | 22/02144-1 |
| 8 Vinnunevndin | 06.10.2022 | 27/22 | 22/02144-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 224/22 | 22/02144-1 |
| 10 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 205/22 | 22/02144-1 |
| 11 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 240/22 | 22/02144-1 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.11.2023 | 206/23 | 22/02144-1 |
| 13 Býráðsfundur | 14.12.2023 | 314/23 | 22/02144-1 |
| 14 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 219/24 | 22/02144-1 |

**Upprunin til málið**
Fyri vinnurekandi er skelting ein sera týdningarmikil partur av teirra virksemi. Skeltið er fyrsta ávirkanin kundin fær av virkseminum. Skeltið er andlitið úteftir og skal verða sjónligt umframt senda góð signal, soleiðis at tað dregur kundar til. Skelting er tó meiri enn andlitið úteftir hjá virkseminum. Skeltini eru eisini ein eyðsýndur partur av tí samlaðu heildarfatanini av býarmyndini. Tórshavnar kommuna, saman vit teimum vinnurekandi, hava ábyrgd av at laga skeltingina til eina størri heild, t.d. til miðbýin og bústaðarøkini í kommununi, soleiðis at vit kunnu fáa eina kommunu, har trivnaður, kunning, og tey býarskipanarligu virðini kunnu ganga hond í hond.

Fyri at náa hesum málið er ein skeltisreglugerð orðað. Umframt at stuðla marknaðarføringingini hjá vinnuni og samstundis verja heildarfatanini av býarmyndini, skal reglugerðin leiðbeina umsøkjara, umframt skipa og lætta um umsitingararbeiði í Tórshavnar kommunu sí *Skeltisreglugerð kjakupprit 31.08.2022*.

Ein slík skeltisreglugerð er ikki statisk, men kann blívur lagað til, um umstøður í kommununi ella ásetingar í byggisamtyktini verða broyttar.

**Lýsing av málinum**
Skeltisreglugerðin er býtt í fimm partar;

1. Endamál við reglugerðini
   - Í hesum partinum verður innihaldið í skeltisreglugerðini lýst, harumframt mannagongdir og leiðbeiningar.

2. Skeltishættir
   - Í hesum partinum verður skilað ímillum aktiv skeltir og passiv skeltir, ið eru ávikavist elektroniskir skermar og vanlig statisk skeltir úr ymsum tilfari.

3. Endamál við skeltinum

- Í hesum partinum, verða tey trý skeltissløgini, sum Tórshavnar kommuna loyvir, lýst. Hetta eru; Virkis- og tænastuskeltir, kunningarskeltir og lýsingarskeltir.

4. Meginreglur fyri snið, uppsetan og staðseting
   - Í hesum partinum verða yvirskipaðir tættir innan snið, uppsetan og staðseting av skeltinum lýst umframt ymiskir hættir at skelta uppá, so sum húsaveggskelti, hangandi skelti, tilklistrað vindeygu, vanlig og størri leys skelti, navnaskelti á bústaðarøki, tíðaravmarkað skelting, talgildir skermar og kunningarskelti.

5. Óbygt øki – 4. Grundumráði
   - Í hesum partinum verður undirstrikað, at skelting í 4. Grundumráði vanliga ikki er loyvd.

Fyri at gera reglugerðina bindandi og fyri at Tórshavnar kommuna skal kunna handhevja innihaldið eru ásetingarnar um skelting rótfestar í almennu byggisamtyktini, ið síðani vísir til sjálva skeltisreglugerðina.

Eitt kort verður knýtt til reglugerðina, soleiðis at umsøkjarin á ein smidligan hátt lætt kann síggja hvørjar ásetingar eru á teimum einstøku økjunum í kommununi sí *Kort við økisásetingum*

Skeltisreglugerðin er galdandi frá tí hon verður samtykt og fram.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/02144-2 Skeltisreglugerð kjakupprit 31.08.2022
22/02144-3 Kort við økisásetingum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til skeltisreglugerðina og beinir málið víðari í teknisku nevnd, náttúru- og umhvørvisnevndina, mentamálanevndina, vinnunevndina, fíggjarnevndina og býráðið til umrøðu og støðutakan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2022:** Útsett.

**Tekniska nevnd 30. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 31. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Sambært *løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir* er einasta bindandi amboðið, kommunur hava, tá tað snýr seg um bygging, herundir eisini skelting, byggisamtyktir.

Fyri at gera skeltisreglugerðina bindandi fyri borgaran er tí neyðugt at knýta hana at byggisamtyktini.

Umráðispartarnir í tí almennu byggisamtyktini eru økir, ið eru ætlað ávísum virksemi, og hava byggiregulerandi ásetingar hesum viðvíkjandi. Almenna byggisamtyktin er býtt upp í 26 ymiskar umráðispartar við ymsum nágreinaðum ásetingum.

Líkasum við ásetingunum um umhvørvisflokking verða ásetingarnar um skelting fyri viðkomandi umráðispartar í byggisamtyktini. Víst verður síðani til skeltisreglugerðina, ið m.a. nágreinar stødd, staðseting og snið av skeltum.

Á henda hátta fáa vit eina bindandi skeltisreglugerð, sum kommunan hevur heimild til at brúka sum eitt virki amboð í mun til skelting í kommununi.

Sí punkt, ið verða sett inn undir hvønn umráðispart í almennu byggisamtyktini niðanfyri:

**§ 2. Ásetingar fyri 1. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | x | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 3. Ásetingar fyri 2. grundumráði.**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 5. Ásetingar fyri umráðispartarnar A1 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | X, einans "Skelti – virki í egnum bústaði " |

**§ 6. Ásetingar fyri umráðispartarnar A2 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | ○ X, einans "Skelti – virki í egnum bústaði " |

**§ 7. Ásetingar fyri A3 í 3. Grundumráði**

Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | ○ X, einans "Skelti – virki í egnum bústaði " |

**§ 8. ásetingar fyri umráðispart B1 í 3. Grundumráði**

Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 9. Ásetingar fyri umráðispart B2 í 3. Grundumráði**

Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 10. Ásetingar fyri umráðispart B3 í 3. Grundumráði**

Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 11. Ásetingar fyri umráðispart B4 í 3. Grundumráði**

Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 12. Ásetingar fyri umráðispart B5 í 3. Grundumráði**

Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 13. Ásetingar fyri umráðispart B6 í 3. Grundumráði**

Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 14. Ásetingar fyri umráðispart B7 í 3. Grundumráði**

Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 15. Ásetingar fyri umráðispart B8 í 3. Grundumráði**

Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 16. Ásetingar fyri umráðispart B9 í 3. Grundumráði**

Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|

| | | | |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 17. Ásetingar fyri umráðispartarnar B10 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 18. Ásetingar fyri umráðispartarnar B11 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 19. Ásetingar fyri umráðispartarnar C1 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | x | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 20. Ásetingar fyri umráðispartarnar C1A í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 21. Ásetingar fyri umráðispart C2 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 22. Ásetingar fyri umráðispartin C3 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

**§ 23. Ásetingar fyri umráðispartar D í 3. Grundumráði**
Eingin skelting er loyvd í umráðispartið D1 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu, undantikið almenn skelting/ privat skelting ikki loyvd í D1 umráðispartið.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | |

Loyvd skelting í umráðispartið D2 er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | x | |
| Passiv skelting | x | x | x |

Loyvd skelting í umráðisparti D3 er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

**§ 24. Ásetingar fyri umráðispartar E í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

**§ 25. Ásetingar fyri umráðispartin F í 3. Grundumráði** Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

**§ 26. Ásetingar fyri 4. Grundumráði**
Eingin skelting er loyvd í 4 grundumráði sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu, undantikið almenn skelting/ privat skelting ikki loyvd í D1 umráðispartið.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | (x) |

Tilgongdin tá broytingar verða framdar í almennu byggisamtyktini er henda:
Tá allar nevndir og býráðið hava samtykt skeltisreglugerðina, verður uppskotið um ásetingarnar um skelting í byggisamtyktini lagt til almenna hoyring í 6 vikur. Um ongar viðmerkingar eru frá almenninginum, verður uppskotið til broyting av byggisamtyktini sent til góðkenningar hjá landsmyndugleikanum. Um landsmyndugleikin goðkennir uppskotið, verður skeltisreglugerðin eitt bindandi skjal, heimilað í byggisamtyktini.

Um viðmerkingar eru, skal umsitingin viðgera hesar og leggja málið aftur til politiska støðutakan.

**Tilmæli**
Víst verður til tilmælið frá 30.05.2022.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Bjørg Dam luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Vinnunevndin 06. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

## Ískoyti:

Í sambandi við at Skeltisreglugerðin fyri Tórshavnar kommunu hevur verið til almenna hoyring frá 7. septembur 2023 til 19. oktobur 2023, eru 10 hoyringsskriv innkomin. Samanumtikið eru flestøll fegin um, at ein skeltisreglugerð er í gerð, og sæð verður fram ímóti, at eins reglur verða galdandi á marknaðinum í Tórshavnar kommunu.

Umsitingin hevur viðgjørt innkomnu hoyringsskrivini og mælir til at ganga 8 av 15 viðmerkingum á møti, sí broytingina við reyðum í fylgiskjali 22/02144-26 *Skeltisreglugerð við broytingaruppskotum 23.11.2023.* Summar av viðmerkingunum vísa á somu viðurskifti og verða tí flokkað saman. Niðanfyri eru viðmerkingarnar skipaðar og lýstar soleiðis:

- Heiti á viðmerkingini, víst við feitari skrift, sum er temaið fyri viðmerkingina
- Viðmerkingin yvirskipað lýst.
- Svar frá umsitingini**.**

**1. Tíðarbil fyri lýsingar á talgildum skermum**
**Viðmerking:**
Praksis í Norðurlondum er, at lýsingar verða vístar á talgildum skermum millum 6 og 10 sek., og átti Tórshavnar kommuna at fylgt hesum norminum.

**Svar frá umsitingini:**
**Ad 1.** Vejdirektoratet (VD), sum er eitt stýri undir Transportministeriet í DK, mælir til, at lýsingar verða vístar á skermum í intervallum upp á í minsta lagi 6-10 sekund. Um fleiri lýsingar eru á teininum, eigur intervallið at verða í minsta lagi 10 sekund. Umsitingin mælir til at fylgja donskum standardum innan hetta økið og at broyta Pkt. 12 Talgildir skermar – lýsingarskelti í reglugerðini sambært hesum:

At strika orðingina niðanfyri:
- ~~*Hvør lýsing skal vera á skerminum í minsta lagi 30 sek, áðrenn myndin skiftir*~~

At seta orðingina niðanfyri ístaðin:
- *Hvør lýsing skal vera á skerminum í minsta lagi 6-10 sekund, áðrenn myndin skiftir. Um fleiri lýsingar eru á einum teini, skulu lýsingarnar vera á skerminum í minsta lagi í 10 sekund, áðrenn myndin skiftir.*

**2. Stilla ljósstyrkina heldur enn at sløkkja talgilda skermin**
**Viðmerking:**
Ljósstyrkin kann stillast soleiðis, at hon skiftir ávís tíðarskeið á døgninum. Soleiðis kann skermurin vera tendraður og aktivur, men ikki til ampa.

**Svar frá umsitingini:**
**Ad 2.** VD mælir til at hava somu krøv til talgildar skermar sum til variablar vegtalvur sambært treytum í lógini *Bekendtgørelse om anvendelse af vejafmærkning, § 10*. Umsitingin mælir til at fylgja donskum standardum innan hetta økið, og at fáa gjørt eina vegleiðing (sí fylgiskjal aftast í Skeltisreglugerðini) tillagað føroysk viðurskifti, ið vísir hvussu ljósstyrkin á talgildum skermum skal mátast umframt stillast og at broyta pkt. 12 Talgildir skermar – lýsingarskelti í reglugerðini sambært hesum:

At strika orðingina niðanfyri:
- ~~*Skermurin skal ikki vera tendraður millum kl. 22 og 06.*~~
- ~~*Skermarnir kunnu í mesta lagi lýsa við 6500 nits í fullum dagsljósi og í mesta lagi 50 - 300 nits í myrkri, mátað vatnrætt út frá eini flatu við hvítum ljósi, mátað við 25m frástøðu.*~~

- ~~*Ljósstyrkin skal sjálvvirkandi stillast í mun til kringumstøðurnar.*~~

At seta orðingina niðanfyri ístaðin:
- *Eftir at talgildi skermurin er settur upp, skulu mátingar gerast av ljósstyrkini, og skermurin skal stillast eftir hesum, sí fylgiskal.*
- *Ljósið verður mátað í eindini Footcandles (fc), og skal munurin á ljósstyrkini á skerminum og ljósstyrkini í umhvørvinum ikki vera meiri enn 0,3 fc sí fylgiskal aftast í reglugerðini.*
- *Fyri at endaligt skeltingarloyvi kann latast, skulu mátingarnar verða sendar Tórshavnar kommunu til góðkenningar.*
- *Skermurin skal hava ein følara, sum sjálvvirkandi stillar ljósstyrkina svarandi til ljósstyrkina í umhvørvinum ymsu tíðspunktini á døgninum.*

**3. Skifti millum lýsingar á talgildum skermum**
**Viðmerking:**
Skiftið millum lýsingarnar eigur at henda líðandi yvir t.d. 3-5 sekund. Summar lýsingar eru myrkar, og summar eru ljósar, og hetta kann vera til ampa, tá skiftið fer fram.

**Svar frá umsitingini:**
**Ad. 3** VD mælir til, at skiftið millum lýsingarnar tekur í mesta lagi 1 sekund, og at skiftini fána líðandi við tí í hyggju at sleppa undan ljósdálking og -bleikstran. Umsitingin mælir til at fylgja donskum standardum innan hetta økið og at leggja orðingina niðanfyri afturat Pkt. 12 Talgildir skermar – lýsingarskelti;
- *Skiftið millum lýsingarnar skal fána líðandi fyri at sleppa undan ljósbleikstran.*
- *Tíðarbilið frá, at fyrra myndin á skerminum er týðilig, til at næsta myndin á skerminum er týðilig, skal í mesta lagi vera 1 sekund.*
- *Tá talan er um lýsingar, sum skifta í liti v.m., kann talan vera um ljósdálking, og tá kann Tórshavnar kommuna seta tillagandi krøv, soleiðis at lýsingin ikki er til ampa.*

**4. Ljóssett skelti**
**Viðmerking:**
Ljósið (eitt nú spottar) á ljóssettum skeltum eigur at stillast til ymsu tíðspunktini á døgninum.

**Svar frá umsitingini:**
**Ad. 4** Umsitingin mælir til, at ljósið á ljóssettum skeltum skal stillast eftir somu krøvum sum ljósið á talgildu skermunum – sí fylgisjal – og at broyta Pkt 1. Yvirskipað, sambært hesum:

At broyta orðingina niðanfyri soleiðis
- *Hvítt / neutralt kastljós kann varpast á skeltið~~, og skal ikki vera blendandi fyri ferðslu ella bústaðir~~, skal tað stillast sambært ljósstyrkina í umhvørvinum tað er í, ymsu tíðspunktini á døgninum, sambært mátingum sum víst í fylgiskali.*

**5. Verandi skelti**
**Viðmerking:** Verandi skelti eiga at fáa loyvi at vera verandi, og eigur tað at verða ásett ein skiftistíð fyri umleggingina av skeltunum, soleiðis at tey lúka treytirnar í reglugerðini.

**Svar frá umsitingini:**
**Ad. 5** Umsitingin mælir til, at hendan orðingin verður løgd afturat í parti 0.0 Skeltisloyvi og skráseting:
- *Verandi skermar og skelti, fáa loyvið at verða verðandi. Tó, skulu treytirnar, sum verða settar til ljósseting (sí fylgiskjal aftast í skeltisreglugerðini) lúkast. Tórshavnar kommuna setur eina skiftistíð upp á 1 ár, eftir at Skeltisreglugerðin er góðkend av Umhvørvismálaráðnum, fyri nær allir skermar og skelti skulu vera umløgd til at lúka treytirnar fyri ljósseting. Kortið verður ikki tillagað verandi skermunum og*

*skeltum, men fáa hesi eitt frávik frá Skeltisreglugerðini. Verða skermarnir ella skeltini tikin niður (undantikið til umvæling og útskiftan), so fellur loyvið burtur*

**6. Skelting fram við landsvegi**
**Viðmerking:** Tað skal gerast týðiligari, bæði í teksti og á korti, at skelting fram við landsvegi skal viðgerast av avvarðandi myndugleika

**Svar frá umsitingini:**
**Ad. 6** Umsitingin mælir til at broyta Pkt. 1 Yvirskipað í reglugerðini sambært hesum:
At strika orðingina niðanfyri:

- ~~*Bert ferðsluskelti góðkend av ferðslu- myndugleikanum mugu verða við almennan vegjaðara.*~~

At seta orðingina niðanfyri í staðin:

- *Skelting fram við vegjaðara skal góðkennast av avvarðandi myndugleika.*

**7. Kunningarskelti – vegvísing**
**Viðmerking:**
§30 í lóg um ferðslumerkingar verða krøv ásett um góðkendar myndatalvur. Hesi verða í lógini kallað 'tænastuskelting', og átti tað í skeltisreglugerðini tí eisini at havt sama heiti – tvs. 'Kunningarskelti' skift út við heitið 'Tænastuskelti.'

**Svar frá umsitingini:**
**Ad. 7.** Umsitingin mælir til at taka undir við viðmerkingini og broyta heitið til tænastuskelti, soleiðis at Tórshavnar kommuna fylgir standardum, ið verða brúktir kring landið. Hetta merkir tó, at heitið 'Virkis- og tænastuskelti' í Skeltisreglugerðini eisini skal broyta heiti – og her mælir umsitingin til 'Vinnu- og stovnsskelting'. Eisini merkir hetta at eitt pkt. 14 Kunningarskelti, skal gerast, soleiðis at vit eisini røkka teimum, ið ynskja at seta kunning upp um eitt nú farleiðir ella kunna um eitt ávíst stað. Eisini verður mælt til at leggja afturat í parti 5 Óbygdt øki – 4 grundumráði, s 25, at loyva ávísum undantøkum fyri kunningar- og tænastuskelting afturat vinnu- og stovnsskelting í 4. Grundumráði.
Mælt verður til at seta orðingina niðanfyri afturat sum síðsta punkt á s. 22:

**Pkt. 14. Kunningarskelti**

- Stovnar og áhugafeløg kunnu seta kunningarskelti upp, ið eitt nú lýsa farleiðir ella kunna um ávís støð.
- kunningarskelti skal tillagast í mun til tað umhvørvi, sum tað verður sett í. Her verður serliga hugsað um støddarlutfall, lit, og ljósseting
- Umsitingin ger eina ítøkiliga meting av hvørjum einstaka kunningarskelti
- Skeltið skal altíð hugsast sum ein partur av heildini, tað verður sett í. t.e. húsaveggin ella øki.
- Avsendarin av kunningini skal verða nevndir á skeltinum.

**8. Húsaveggjaskelti í bústaðarøkjum**
**Viðmerking:** Sniðið á húsaveggjaskeltum í bústaðarøkjum skal vera útskornir bókstavir settir beinleiðis á húsaveggin ella á eina klára plátu. Hetta reglubrotið eigur at verða strikað, tí tað er ov restriktivt, og er tað torført at skera út búmerki.

**Svar frá umsitingini:**
**Ad. 8.** Umsitingin mælir til at halda fast í ásetingini um, at húsaveggjarskelti í bústaðarøkjum skulu vera útskornir bókstavir settir beinleiðis á húsavegg ella á klára plátu. Tó kann undantak verða givið til búmerki, ið eru torfør at skera út. Mælt verður tí til at seta undirstrikaðu orðingina í kursiv niðanfyri afturat Pkt. 9. Húsaveggjaskelting í bústaðarøki – virkis- og tænastuskelti.

- Sniðið á húsaveggjaskeltum í bústaðarøkjum skal vera útskornir bókstavir settir beinleiðis á húsaveggin ella á eina klára plátu. <u>Detaljerað búmerki, kunnu skerast út, har tað ber til. Umsitingin metir í hvønn mun tað er møguligt at skera búmerki út.</u>

**9. Aktiv virkis- og tænastuskelti og kunningarskelti**

**Viðmerking:** Heldur enn at skyna millum aktiv og passiv skelti eigur heldur at verða skynað millum skíggjar við skiftandi myndum og skelti við ljósi. Av somu orsøk eiga krøvini um, at virkis- og tænastuskelti og kunningarskelti bert kunnu vera passiv, at verða strikað.

**Svar frá umsitingini:**
**Ad. 9** Treytir eru settar til ljósstyrkina á skeltum. Umsitingin mælir tí til at halda fast í heitunum 'aktiv skeltir' fyri talgildar skermar og 'passiv skeltir' fyri skeltir, ið ikki eru talgild. Eisini verður hildið fast í, at einastu skelti, ið verða loyvd sum aktiv skelti, eru lýsingaskelti, undantikið variabul ferðsluskelti. Orsøkin til hetta er at avmarka, at tað verður ov stutt millum ljósskeltini, tí hetta kann skapa ljósdálking í býarrúminum.

**10. Talgildir lýsingaskíggjar í bústaðarøkjum**
**Viðmerking:** At loyva aktivari skelting í bústaðarøkjum, men at ljósregulerandi krøv verða sett, so at skeltini ikki órógva. Nógvar føroyskar fyritøkur hava skrivstovur í bústaðarøkjum, og tær kunnu ikki longur gera vart við sítt virksemi. Hetta er í okkara metan alt ov restriktivt.

**Svar frá umsitingini:**
**Ad. 10** Í bústaðarøkjunum í Tórshavnar kommunu kunnu fyritøkur gera vart við seg umvegis passivari skelting, undir hesum húsaveggjaskelting, leysum skeltum og film/foliu klistrað á vindeygu. Hesi øki eru í høvuðsheitum til bústaðir, og atlit skal tí takast at hesum, tá skeltað verður í økinum. Tí mælir umsitingin til, at hildið verður fast í ikki at loyva aktivari skelting í bústaðarøkjum.

**11. Pkt. 9. Stødd á húsaveggjaskelting í bústaðarøki – virkis- og tænastuskelti**
**Viðmerking:**
At reglubrotið um at húsaveggjaskelti fyri virkjum í bústaðarøkjum kann í mesta lagi vera 0,25 $m^2$ til víddar verður strikað, tí hetta er ov restriktivt.

**Svar frá umsitingini:**
**Ad. 11** Í bústaðarøkjunum í Tórshavnar kommunu verða smærri virksemi loyvd. Tó eru hesi øki í høvuðsheitum til bústaðir, og atlit skal tí takast at hesum, tá skeltað verður í økinum. Tí mælir umsitingin til, at hildið verður fast í, at húsaveggjaskeltini í bústaðarøkjum ikki kunnu vera størri enn 0,25 $m^2$ til víddar.

**12. Pkt. 10 Uppáklistrað vindeygu í bústaðarøkjum – virkis- og tænastuskelti**
**Viðmerking:**
At strika reglubrotið um, at virkir í bústaðarøkjum kunnu klistra við filmi/foliu á í mesta lagi 0,25 $m^2$ av vindeyganum, tí hetta er ov restriktivt.

**Svar frá umsitingini:**
**Ad. 12** Í bústaðarøkjunum í Tórshavnar kommunu verða smærri virksemi loyvd. Tó eru hesi øki í høvuðsheitum til bústaðir, og atlit skal tí takast at hesum, eitt nú tá skeltað verður í økinum. Tó er tórført at umsita hvat verður klistra í vindeyguni í bústaðarøkjum og mælir umsitingin til, at strika punkt. 10 Pkt. 10 Uppáklistrað vindeygu í bústaðarøkjum – virkis- og tænastuskelti

**13. Pkt. 13. Kunningarskelti – vegvísing**
**Viðmerking:**
At strika reglubrotið um at tað ikki er loyvt at seta búmerki, lýsing ella tílíkt á kunningarskelti, tí tað er ov restriktivt.

**Svar frá umsitingini: Ad.13** Sambært §30 í lóg um ferðslumerkingar eru krøv um at nýta góðkendar myndatalvur ísambandi við skelting. Umsitingin mælir til, at Tórshavnar kommuna fylgir standardum, ið verða brúktir kring landið, og at halda fast í, at tað ikki er loyvi at seta búmerki ella lýsing á eitt kunningarskelti(nýggja heitið: tænastuskelti).

**14. Aktiv skelting**
**Viðmerking:**
Ynskiligt er at loyva aktivari skelting á Bøgøtu.

**Svar frá umsitingini:**
**Ad.14** Bøgøta er fevnt av ásetingunum fyri 2. grundumráði. Í 2. grundumráði eru í stóran mun bústaðir, og skulu atlit takast at hesum, eitt nú tá skeltað verður í økinum. Tí mælir umsitingin til ikki at loyva aktivari skelting í hesum økinum.

**15. Grannaløg ávirkað av talgildum skermum**
**Viðmerking:**
At stóri reklamuskermurin við gavlin á húsunum við Mannbrekku /Hvítanesvegin verður tikin burtur.

**Svar frá umsitingini:**
**Ad.15** Skeltisreglugerðin setir krøv til ljósstyrkina á skermum ávís tíðarrúm í døgninum, og harumframt tryggjar hon, at skiftini millum lýsingarnar skulu fána líðandi, soleiðis at tað verður eitt mildari umskifti millum lýsingarnar. Almenna hoyringin av Skeltisreglugerðini er við tí í hyggju at fáa hoyringsskriv inn til sjálva skeltisreglugerðina og ikki til einkultmál.

Ynskið um at fáa stóra reklamuskermin við gavlin á húsinum við Mannbrekku /Hvítanesvegnum tiknan burtur er tí sent víðari til viðgerðar hjá byggimálsdeildini.

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla nevndini til at samtykkja dagførdu skeltisreglugerðina við broytingaruppskotunum og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 14. desember 2023:** Málið beint aftur í nevnd, og samtykt at hava felags fund um reglugerðina fyri allar býráðslimir.

**Ískoyti:**
Skeltisreglugerðin varð løgd fram fyri býráðslimum á kunningarfundi 28. august 2024. Mett varð ikki neyðugt við nýggjari viðgerð í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at viðgera málið vísandi til samtyktina hjá byggi- og býarskipanarnevndini 27. november 2023.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

## 220/24 Bygdastrategiir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 304/23 | 23/05924-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.09.2024 | 154/24 | 23/05924-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 205/24 | 23/05924-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 220/24 | 23/05924-1 |

**Upprunin til málið**
Í kommunuætlanini frá 2020 verður víst á, at arbeiðið við at gera ætlanir fyri bygdirnar, er ígongd og kemur við í næstu kommunuætlan. Núverandi kommunuætlan fevnir einans yvirskipað um bygdirnar, og tøvur er á ætlanum, ið vísa á, hvussu menningin skal fara fram, soleiðis at umsiting og politikarar hava betri grundarlag at leggja langtíðarætlanir í bygdunum og viðgera umsóknir og fyrispurningar í bygdunum.

Allar bygdir í Tórshavnar kommunu eru búsettar, og kommunan hevur tí eina skyldu til at taka støðu til, hvørji tiltøk skulu fremjast, fyri at hesum støðum skal verða lív lagað. Hetta veri seg innan skúla- og dagstovnatilboð, eldrasambýlir, bústaðarmenning, undirstøðukervi og trivnaðin á staðnum.

Tær 14 bygdirnar í Tórshavnar kommunu eru sera ymiskar og hava tær ymiskan tørv, tá tað kemur til menningaátøk. Talan er um bygdir, sum søguliga, mentanarliga og landafrøðliga eru ymiskar. Heldur ikki er fólkatalið, vinnuvirksemið og jarðarviðurskiftini lík í bygdunum, og teimum tørvar tí hvør sína sjálvstøðugu viðgerð.

**Lýsing av málinum**
Nú vit skriva 2023 er ynskiligt at seta arbeiðið ígongd. Mælt verður til at umsitingin fer í holt við at gera strategiir fyri bygdirnar.

Bygdastrategiin skal ikki bara lýsa menningarøki, men skal eisini seta kós fyri, hvussu framtíðarmenningin av bygdunum skal síggja út fram til 2035.

Ætlanin er, at arbeiðið endar í politiskum strategium fyri hvørja bygd, har býráðið leggur fram síni yvirskipaðu mál fyri framtíðar menning av bygdunum. Bygdastrategiin skal taka støði í ítøkiligu bygdini og leggja ætlan útfrá hesum. Ætlanin skal taka støðu til framtíðar menning á staðnum, har búseting, stovnsvirksemi, trivnaður og møguligt vinnuligt virksemi verður lýst, hetta fyri at skapa tryggleika, trivnað og tað góða lívið.

Til at loysa hesa uppgávu er í fyrsta lagi neyðugt at taka útgangsstøði í tí neyðugu vitan um staðið, har byrjað verður við at tosa við staðkend fólk, hyggja eftir hagtølum fyri bygdina fyri at skapa eitt yvirblikk. Hareftir er ynskiligt við innanhýsis politiskum fundum um ynskiligu menningina fyri bygdirnar, staðbundnum bygdafundum, har áhugaði kunnu koma við sínum sjónarmiðum og hugskotum í skrift og talu, umframt samskifti og fundum við stovnar, ið hava tilknýti til staðið.

Mett verður, at arbeiðið at gera ætlanirnar kemur at kosta uml. sum niðanfyri standandi.

**Fíggjarætlan**

| | | |
|---|---|---|
| Framleiðan av viðkomandi hagtølum | kr. | 30.000 |
| 9 x bygdafundir við orðstýrara | kr. | 90.000 |
| Grafisk uppsetan | kr. | 50.000 |
| Óvissur | kr. | 30.000 |
| **Tilsamans** | **kr.** | **200.000** |

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í samgonguskjalinum hjá Landstýrinum er samtykt at endurskoða útoyggjaálitið frá 2001, og farið verður undir hetta arbeiðið í næstum. Álitið er ein lýsing og ein viðgerð av, hvat skal til fyri at skapa virksemi og trivnað á útoyggj. Í álitinum er orðað eitt uppskot til ein útoyggjapolitikk, sum tekur støði í økismenning á útoyggj og smáplássum í Føroyum. Álitið fevnir um níggju oyggjar umframt Gásadal. Við eru m.a. Hestur, Koltur og Nólsoy, sum eru oyggjar í Tórshavnar kommunu.

Bygdirnar í TK hava nógvar av somu avbjóðingum sum tær í útjaðaranum og útoyggj, og vit sum høvuðsstaðarkommuna eiga at fylgja tropp við arbeiðinum hjá landinum. Í øllum førum at tryggja okkum, at menningin ikki fer í hvør sína ætt. Tí verður mælt til, at umsitingin fær í lag samstarv ella samskipan við arbeiðsbólkin hjá Landstýrinum um hetta arbeiðið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
Arbeiðið at fremja kommunuætlan og herundir bygdastrategiir verður fíggjað av konto 1313.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stórin og býararkitekturin mæla til arbeiðið at menna bygdastrategiir fyri bygdirnar í Tórshavnar kommunu verður sett í gongd.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Arbeiðið við bygdaætlanum er í gongd, og mett verður, at neyðugt er, at framhaldandi arbeiðið verður sett í meiri ítøkiliga skipan.

Bygdaætlanirnar eru ískoyti til Kommunuætlan 2020, og tí verður bygnaður og snið endurnýtt, so at tað gerst eyðsæð, at ætlanirnar hoyra saman. Kapitlarnir verða sostatt:

- Fólk og bústaðir

- Náttúra, varðveiting og umhvørvi
- Vinna
- Undirstøðukervi
- Mentan, frítíð og útilív
- Tænastuøki

Ætlanin er at skipa arbeiðið við bygdaætlanum í tveimum stigum:

1. **Fakliga grundarlagið og politska skjalið**

- Skjalið lýsir yvirskipaðu menningina í bygdunum fakliga og politiskt. Ætlanin verður so statt um politiskt fylgiskjal, ið samstundis virkar sum virkisskrá hjá sitandi býráði komandi 4 árini. At enda í hvørjum kapitli verða tilmæli/avgerðir løgd fram um at seta ymisk arbeiði í verk fyri at røkka málum um framtíðar menning av bygdunum og fyri at kunna seta hol á næsta stig av arbeiðinum – tær serstøku bygdaætlanirnar.

2. **Níggju serstakar bygdaætlanir** fyri ávikavist: Kollafjørð, Kaldbak, Hvítanes, Nólsoy, Norðradal, Syðradal, Velbastað, Kirkjubø, Hest.

- Fyri hvørja bygd sær verður ítøkilig bygdaætlan gjørd, har teir seks omanfyri nevndu kapitlarnir verða viðgjørdir. Summar bygdir eru undir einum pressi í mun til landafrøði og flytføri, meðan aðrar liggja væl fyri í mun til infrakervi og hentleikar. Bygdaætlanirnar verða tí ymiskar í vavi, og summar verða meiri avmarkaðar enn aðrar. Ætlanirnar skulu gerast í tøttum samstarvi við bygdafólkið úr einstøku bygdunum.

**Fyrisitingarlig skipan av arbeiðinum:**
Fyri at koma víðari við arbeiðinum, er ynskiligt at skipa arbeiðið við einum stýrisbólki og einum arbeiðsbólki.

Býráðið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av kommunuætlanini og harvið eisini bygdaætlanunum. Býráðið skal góðkenna endaligu bygdaætlanirnar. Tá tørvur er á politiskum metingum av innihaldinum, støðutakan til, hvørja kós ætlanin skal taka, ella tá avgerðir skulu takast millum ymisk áhugamál, sum stríða móti hvørjum øðrum, skal stýrisbólkurin koma við tilmælum til avvarðandi nevnd.

**Stýrisbólkur**
Mælt verður til, at stýrisbólkurin hevur evstu fyrisitingarligu ábyrgd, umframt ábyrgdina av:

- Uppfylgjan av tilgongdini
- Taka yvirskipaðar avgerðir
- Skipa fyri, at arbeiðsbólkurin er mannaður
- Tryggja samskipan til aðrar funktiónir og verkætlanir í kommununi

Í stýrisbólkurin eru:

- Umboð úr samgonguni
- Umboð úr andstøðuni
- Kommunustjóri
- Tekniski stjóri
- Trivnaðarstjóri
- Heilsu- og umsorganarstjóri

Ætlanin er, at stýrisbólkurin verður settur sum skjótast, soleiðis at arbeiðið kann halda fram sum ætlað.

**Arbeiðsbólkur**
Arbeiðsbólkurin hevur ábyrgdina av:

- At framleiða bygdaætlanirnar, bæði grundarlagið og ítøkiligu bygdaætlanirnar
- Innsavnan av vitan og niðurstøðum bæði á stýrisbólkastigi og á politiskum stigi
- At samskipa arbeiðið út ímóti avvarðandi pørtum, bæði fakligu pørtunum, ítøkiligu bygdasamfeløgunum og staðbundnu nevndunum

Arbeiðsbólkurin er mannaður við umboðum frá:
- Býarskipanardeildini (samskipari)
- Mentamáladeildini
- Tórshavnar Havn
- Stjórnarskrivstovuni
- Teknisku deild
- Umhvørvisdeildini

Við hesi tilgongd fáa vit eina ætlan, ið er í samljóð við verandi politikkir og ætlanir í TK, og sum í stóran mun er gjørd sambært ynskjum frá samfelagnum og við politisku skipanini í TK sum avsendara.

**Tilmæli**

Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at arbeiðið við bygdaætlanunum verður skipað, sum omanfyri lýst,
- at omanfyri nevndi bygnaður fyri bygdaætlanirnar verður leisturin, sum arbeitt verður eftir,
- at arbeiðið at seta stýrisbólk og arbeiðsbólk verður sett í verk,
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>19. september 2024 | Blað nr.: 973 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# 221/24 Umsókn um yvirtøku av vegi, matr. nr. 1106g og matr. nr. 1106q, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.09.2024 | 55/24 | 24/00551-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 211/24 | 24/00551-3 |
| 3 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 221/24 | 24/00551-3 |

**Upprunin til málið**
Borgari hevur vent sær til kommununa og spyr, um kommunan kann yvirtaka partar av Fjalstúni, matr. nr. 1106g (stødd 296 m²) og matr.nr. 1106q (stødd 170 m²), Tórshavn

**Lýsing av málinum**
Fjalstún, ein síðuvegur til Undir Gráastein er privatur vegur. Talan er um ein gamlan veg. Níggju matriklar hava atgongd til Fjalstún.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fólk frá umsitingini hava verið á staðnum og gjørt støðumeting av vegnum. Niðurstøðan er, at vegurin er í góðkendum standi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Umsitingin mælir til at yvirtaka privata partin av Fjalstún og at leggja matr. nr. 1106g, Tórshavn, og matr. nr. 1106q, Tórshavn, saman við vegnum Undir Gráasteini, litra do, Tórshavn.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei
Fíggjarligu útreiðslurnar í sambandi við marknaumskipanina Tórshavn, eru millum 5.000 og 10.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at kommunan yvirtekur privatar partar av vegnum Fjalstún, matr. nr. 1106g, Tórshavn, og matr. nr. 1106q,Tórshavn.

- at kostnaður í sambandi við marknaumskipan verður fíggjaður av konto 8115, Vegir, planlegging o.a..
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 02. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 222/24 Broyting av byggisamtykt fyri matr. nr. 193 og 191b, Gr. Kambansgøta 11, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 150/21 | 21/00804-6 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2024 | 11/24 | 21/00804-6 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 53/24 | 21/00804-6 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2024 | 64/24 | 21/00804-6 |
| 5 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 64/24 | 21/00804-6 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.09.2024 | 148/24 | 21/00804-6 |
| 7 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 222/24 | 21/00804-6 |

**Upprunin til málið**
Umsókn er send Tórshavnar kommunu viðv. bygging og niðurtøku á matr. nr. 193 og 191b. Søkt verður um at byggja íbúðarhús við trimum íbúðum umframt at loyva eini kjallarahædd móti Vágsbotni við útvendum virksemi. Talan er um byggimál, ið ikki er gingið á møti, tí umsókn ikki er í tráð við almennu byggisamtyktina. Frávikið kann hava positiva býarskipanarliga ávirkan á økið í Vágsbotni, tískil er ein møgulig tilgongd at gera nýggja serstaka byggisamtykt tikin upp.

**Lýsing av málinum**
Á fundi 24. februar 2021 varð uppskot lagt fram við ynski um at byggja íbúðarhús við trimum hæddum umframt eina kjallarahædd við hátúni móti vegnum í Vágsbotni. Ognin vendir móti suðri, og er beinleiðis samband við gongubreytina, sum leiðir ein frá Skálatrøð og yvir til torgið í Vágsbotni. Talan er um kjallarahædd ætlað til matstovu, café, spælistað ella líknandi virksemi. Kjallarahæddin vil á henda hátt verða við til at knýta økið frá Smiðjuni í Lítluvík saman við torginum í Vágsbotni og út í Bakka.

Kjallarahæddin er ikki í tráð við almennu byggisamtyktina hjá Tórshavnar kommunu, og má serstøk byggisamtykt gerast sambært almennu byggisamtyktini, um loyvi skal gevast til kjallarahæddina og ætlaða virksemið út móti Vágsbotni.

Talan er um eina góða býarskipanarliga loysn, sum kann gerast eitt bindilið millum Skálatrøð og Vágsbotn. Deyð strekki, eins og hetta, eru sambært miðbýarætlanini lýst sum avbjóðingar í miðbýnum. Grundað á vantandi býarlív og virksemi, er strekkið keðiligt at ferðast ígjøgnum, og tykist frástøðan millum Skálatrøð og Vágsbotn tí eisini longur, enn hon í veruleikanum er.

Lagt verður upp til at nýta tilfar og litir úr nærumhvørvinum, og eru tilvísingar til gomlu bygningarnar í økinum. Framsíðan móti Vágsbotni verður í uppskotinum myndað við grótlaðing, timbri og svartari tjøru tó við eini nútímans útsjónd, sum skapar eina býarkenda framsíðu, sum somuleiðis tillagar seg til søguliga nærumhvørvið, sí skjal *VD – Tekningar 01.07.2021.pdf*.

Grundað á omanfyri standandi, mælir umsitingin til at gera nýggja serstaka byggisamtykt fyri økið í Vágsbotni, sum fevnir um matriklarnar 193, 191b og grannaognir, sí kortskjalið *Økið í Vágsbotni*. Talan er enn bert um eina umsókn, men kann hetta økið lættliga styrkjast, um hugsað verður í eini størri heildarmynd, sum fevnir um grannaognir, p-pláss, trappur, uppihald og samband til nærindis gøtur. Hugsast kann, at talan gerst um hugnaligt umhvørvi til trivnað og uppihald, har til ber at uppliva maritima dámin í Vágsbotni.

Mælt verður til í eini nýggjari serstakari byggisamtykt:
- at býta økið í trý, t.v.s. ávikavist bygningarnir móti p-økinum á Skálatrøð, p-øki frammanfyri bátabrúgvarnar og bygningarnir móti torginum í Vágsbotni.

- at seta krøv til útvent virksemi á niðastu hæddini móti Bøgøtu (Glitnir), bátabrúgvunum og torginum í Vágsbotni.
- at seta krøv til mest loyvdu hæddarkotu ístaðin fyri mest loyvdu hæddir.
- at seta krøv til útsjónd (framsíður), sum verður sera eyðkend í býarmyndini.
- at seta krøv, sum taka atlit til neystavirksemið (neyst er við síðuna av Sirkus).

Harumframt skal kannast, hvørjar treytir skulu setast til varðveiting av verandi trøum og gróðri í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er fevnt av 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu. Ásetingarnar fevna um:

> *2. grundumráði verður alt, sum tað er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, smáhandverk, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
>
> *Hús mugu ikki verða bygd hægri enn 8 m til hægsta punkt við útvegg og 10 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*
>
> *Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum takið, kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 8 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 10 $m^2$.*
>
> *Kortini er gjørligt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3, 4 og 5 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrliga avmarkað øki. Tó má nýtslustigið fyri hetta økið sum heild ikki fara upp um 1,25.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Umsókn um byggiloyvi til bygning á matr. nr. 193 og 191b, Gr. Kambansgøta 11, Tórshavn*, journal nr. 20/03530.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Einki

**Skjøl**
- *VD – Tekningar 01.07.2021.pdf,* journal nr. 21/00804-3
- *Økið í Vágsbotni,* journal nr. 21/00804-7

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til, um arbeiðast skal víðari við uppskoti til serstaka byggisamtykt fyri økið, sum víst á kortskjali *Økið í Vágsbotni*.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at arbeiðast skal víðari við uppskoti til serstaka byggisamtykt fyri økið, sum víst á kortskjali *Økið í Vágsbotni.*

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við broyting av serstakari byggisamtykt fyri økið millum Vágsbotn, Gríms Kambans gøtu og Bøgøtu og hevur framleitt eitt uppskot, sum bæði tekur atlit til fyriliggjandi umsóknir, sum gagnýta og aktivera økið meira, samstundis sum at núverandi styrkir í økinum verða varðveittar, sí skjal *Megintættir – serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Gr. Kmbansgøtu 22.12.23*. Tey viðurskifti, ið fyrst og fremst verða regulerað í serstøku byggisamtyktini, og sum víkja frá ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri økið, eru tal av hæddum, nýtslustig og nýtsla húsanna.
Sambært nýggju serstøku byggisamtyktini verður økið framvegis nýtt til blandað mistaðar- og bústaðarendamál, har útvent virksemi skal vera í niðastu hædd oman móti Vágsbotn-vegnum. Krav verður ikki sett til atknýtt bilstøðupláss í sambandi við nýggja bygging.

*Økið verður sundurbýtt í smærri eindir, nevndar Øki A, B og C.*

Øki A: umfatar matriklarnar nr. 186, 187 og 188, sum hava mark við Vágsbotn-torgið.
Her verður byggistigið sett til 0,9, og nýtslustigið 1,8. Hæddarmarkið frá grundplani til hægsta punkt á tekjuni er 10m. Hæddarmarkið frá grundplani til ovasta punkt á húsaveggi er 8m. Umvælingar á verandi bygningar eru loyvdar, men stórvegis broytingar mugu fyrihalda seg til ásetta nýtslustigið. Hetta merkir so statt, at um talan verður um umvælingar, skulu núverandi bygningar ikki gerast hægri enn teir eru í dag. Orsøkin er, at bygningarnir avmarka sólarljósið til Vágsbotn-torgið og trappuna.

*Øki B umfatar matriklarnar nr 190 og 191b, sum verða nýmatrikuleraðir sum byggilendi.*

Her verður byggistigið 0,9 og nýtslustigið 2,2. Byggjast kann út í mark, men grundhæddin skal nýtast til útvent virksemi. Har fleiri hæddir verða bygdar, skal grundhæddin verða trekt inn frá markinum á framsíðuni, sum vendir oman ímóti sjónum. Økið framman fyri matrikkulin oman ímóti sjónum skal innrættast til uppihald. Hetta kann gerast eftir avtalu við kommununa. Um talan er um stórvegis broytingar á verandi bygning, so sum broyting av tekjuhædd og skapi, skal bygt verða við mønutekju. Hæddarmarkið frá grundplani til hægsta punkt á mønuni er 10m. Kvistar, og kvistaskap eru loyvd bæði oman ímóti sjónum og niðan ímóti Gríms Kambans gøtu. Hæddarmarkið frá grundplani til ovasta punkt á húsaveggi er 8,5 m, undantikið har húsaskjøldrar og kvistar eru.

*Øki C umfatar matriklarnar nr. 191b, 192, 193 og 195*

Her verður byggistigið 0,5, og nýtslustigið 1,4. Tá tað snýr seg um nýbygging ella heildarumvæling av verandi bygningum skal niðasta hædd verða avsett til útvent virksemi. Grundhæddin skal verða trekt inn frá teirri framsíðuni á bygninginum, sum vendir oman ímóti sjónum. Økið oman ímóti sjónum skal innrættast til uppihald.
Um talan er um stórvegis broytingar á verandi bygningar, so sum broyting av tekjuhædd og skapi, skal bygt verða við mønutekjuskapi. Hæddarmarkið frá grundplani til hægsta punkt á mønuni er 13,5m, mált frá Vágsbotn-vegnum. Kvistar eru loyvdir bæði oman ímóti sjónum og niðan ímóti Gríms Kambans gøtu. Hæddarmarkið frá grundplani til ovasta punkt á húsaveggi er 11,5m, mált frá Vágsbotn-vegnum, undantikið har húsaskjøldrar og kvistar eru.

Serstaka byggisamtyktin gevur pláss fyri heildarætlan, har nýggj lendistrappa millum Gríms Kambans gøtu, og Vágsbotn, knýtir Tróndargøtu at nýggjari bryggjugøtu, og at pláss er fyri meira útvendum virksemi fram við Vágsbotn-vegnum. Samanumtikið er hugsjónin, at økið framyvir verður skipað við øktum tættleika, uttan at hetta órógvar miðingarlinju til serstaka útsýnið yvir Vestaru víg, og at hægri bygging avbyrgir

sólarljós. Hetta er í samsvari við Miðbýarætlanina og virkar til, at økið fram við Vágsbotn-vegnum kann gerast eitt býarskipanarligt bindilið millum Vágsbotn-torgið og Skálatrøð.

Allir eigarar í økinum verða kunnaðir um ætlanina og fáa møguleika at viðmerkja.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tvær ítøkiligar umsóknir eru um bygging í økinum, sum uppskotið til serstaka byggisamtykt fevnir um, sí viðløgdu skjøl VD – Tekningar 01.07.2021.pdf og Drangin í Vágsbotni_Prosjektuppskot_20220307.pdf. Við smáum tillagingum, so rúmast hesi bæði uppskotini til bygging í uppskotinum til serstaka byggisamtykt.

**Skjøl:**
21/00804-26 Megintættir - Serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Gr. Kmbansgøtu 22.12.23
21/00804-3 Nýtt tilfar frá umsøkjara
22/01370-2 Uppskot - Drangin í Vágsbotni

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera serstaka byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð sambært meginreglunum lýstar omanfyri og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2024:** Samtykt at útseta málið til komandi fund.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri treyt, at tá hoyringsfreistin er farin, verður málið lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina aftur.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Uppskot um nýggja serstaka byggisamtykt varð lagt fram til almenna hoyring í tíðarskeiðnum 7. mai og 18 juni (sí skjal *Serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð.pdf,)*, og eftir umbøn frá 17 grannum, niðast á Tróndargøtu, gjørdi umsitingin av at leingja freistina til aftaná summarsteðgin. Somuleiðis hevði umsitingin ein kunnandi fund fyri hesum somu grannum, har kunnað varð um málið.
Aftaná longdu freistina 16. august 2024 hevði kommunan móttikið 11 hoyringarskriv.

*Viðmerking, Tjóðsavnið:*
Í skrivi frá Tjóðsavninum verður frámælt at loyva hægri/meira bygging, tí høga hæddin, serliga fyri øki C, kann fáa neiliga avleiðing fyri býlingin hinu megin Grím Kambans gøtu og Smiðjuna í Lítluvík. Sum heild sóknast Tjóðsavnið eftir, at serstaka byggisamtyktin leggur meira dent á varðveitslu. Skapið á gomlu pakkhúsunum er eyðkent og sokallaði Gamle Danmark bygningurin og gamla neystið í Vágsbotni eru somuleiðis varðveitingarverd, sambært Tjóðsavninum.

Víst verður á, at áseting um útvent virksemi kann seta krøv til verandi nýtsluna av neystabygninginum í Vágsbotni, sum broytir eyðkenda neystið. Hetta hevur eigari av neystinum (matr. nr. 186) eisini gjørt vart við í samskifti við umsitingina.

*Viðmerking, eigarar av matr. nr. 190:*
Skrivið tekur útgangstøði í krøvum fyri nýggja bygging á matr. nr. 190, og víst verður á, at í trimum førum er samsvar ikki millum ásetingar í byggisamtyktini og í fylgiskjali 3.

- Á tekningini á síðu 3, sæst hvussu framsíðan móti sjóvarmálanum kann trekkjast aftur, tó verður hetta ikki nevnt í serstøku byggisamtyktini.

- Samsvar er ikki millum nýtslustigið í málslýsingini (2,2) og í serstøku byggisamtyktini (2,1)
- Samsvar er ikki um hæddaráseting til hægsta punkt við útvegg í málslýsingini (8.5 m) og í serstøku byggisamtyktini (8 m).

Ein annar feilur er, at matr nr. 191b verður nevndur í fylgiskjalinum, sum partur av øki B, hóast hesin er í øki C.

Víst verður eisini á, at eigarin hevur ynski um at integrera takterassu saman við mønusniðinum á tekjuni, og eigarin spyr, um hetta átti at skrivast inn í serstøku byggisamtyktina.

Í fylgiskjalinum stendur eisini, at partur av nýggja matriklinum skal ikki byggjast hægri enn upp í veghædd á Gríms Kambans gøtu, og at økið skal nýtast til alment býarrúm.
Spurt verður, um tað ber til at skriva inn í serstøku byggisamtyktina, at almenna økið ikki telur við í nýtslustiginum.

Eigarar av matr. nr. 190 skrivaðu í øðrum hoyringarskrivi, at teimum dámar væl uppskotið og ætlanirnar um nýggja trappu, sum bindur Grím Kambans gøtu við sjóvarmálan, og tey mæla til, at Tórshavnar kommuna ger eina ætlan og regluverk fyri náttarlívið í Havn, til tess at fyribyrgja neiligar fylgjur av at knýta bústaðardeplar tættari at miðstaðarøkjum.

*Viðmerking, eigari av matr. nr. 187 og 188.*
Mótmælt verður, at serstaka byggisamtyktin krevur útvent virksemi á niðastu hædd. Bygningarnir hava havt ymiskt útvent virksemi gjøgnum tíðina, men ongin veit, hvat tørvurin verður í framtíðini, og tí er hetta kravið óneyðugt, sambært eigaranum.

*8 Mótmælir, umboðandi grannar:*
- Trappa/tilhaldsstað

Mest endurtikna mótmælið snýr seg um ætlanina at byggja eina lendistrappu og knýta Tróndargøtu tættari at sjóvarmálanum/Vágsbotni. Grannar mótmæla staðiliga, at kommunan skapar eitt tilhaldsstað og ger tað lættari at koma beinleiðis til og frá býnum á hesum staðnum, og óttast, at lættari atkomuviðurskiftini fara at styrkja neiligu avleiðingarnar, sum náttarlívið hevur havt á býlingin omanfyri Grím Kambans gøtu seinastu árini.

- Ov nógv náttarlív

Atfinningarnar eru eisini grundaðar á, at uppskotið leggur upp til meira útvent virksemi, og um talan verður um fleiri skeinkistøð, so kann, sambært hoyringskrivinum, gamla grannalagi broytast frá einum bústaðarøki til ein býling, har flestu ognirnar nýtast til stutttíðarleigu.

Heitt verður á kommununa, um at stýra núverandi náttarlívi við at eitt nú ikki geva loyvi til meira virksemi millum Vágsbotn og Skálatrøð, og at ístaðin spjaða náttarlívið kring býin.

- Hæddin á matr. nr 193

Grannar mótmæla byggiloyvi til matr. nr. 193, og óttast at byggingin fer at taka ein munandi part av útsýninum og myrkja um partar av grannalagnum.

- Hæddin á matr. nr 190

Grannar yvirav matr nr. 190 mótmæla ætlanum at nýggjur bygningur verður bygdur vestureftir og eina hædd upp frá Grims Kambans gøtu, tí at hetta hevur sera neiliga ávirkan á útsýnið og harvið á virðið á ogn teirra (matr. nr. 283).

**Umsitingin hevur hesar viðmerkingar til hoyringsskrivini:**

*Til Tjóðsavnið:*

Umsitingin er samd í, at fleiri bygningar í og kring økið hava stórt søguligt virði, og Fyligskjal 1 greiðir m.a. frá søguligu gongdini á matr. nr 192, har sokallaði “Gamle Danmark” stendur í dag, og um neystið á matr. nr 186, sum upprunaliga er frá miðskeiðis í 18’indu øld.
Galdandi fyri hesar báðar bygningarar er, at bygd er útum mest loyvda nýtslustig, og tí verður ikki byggiloyvi givið til útbyggingar, og teir fara tí sannlíkt at varðveita skapið, eisini eftir at hendan byggisamtyktin kemur í gildi.
Umsitingin er samd í, at dagføra uppskotið, soleiðis at dentur verður lagdur á at varðveita júst hesar bygningarnar, men viðvíkjandi innihaldinum, so er tað av størri týdningi at bygningarnir eru viðkomandi og kunnu tillaga seg til tørvin nú og í framtíðini. Tí viðmælir umsitingin at halda fast í kravinum um útvent virksemi, og metir hetta vera rímiligt, av tí at staðsetingin er miðskeiðis í Havnini.

*Til eigara av matr. nr 190*
Umsitingin ásannar, at tað er ein feilur at kunngjørda nýtslustigið og hæddarásetingin ikki samsvarar við uppskotið fyri serstaka byggisamtykt og tað sum framgongur í málslýsingini omanfyri. Sostatt skulu hesar ásetingar broytast í serstøku byggisamtyktini.
Viðv. at lýsa ítøkilig hvussu framsíðan móti sjóvarmálanum skal sniðgevast, so metur umsitingin ikki, at tað er neyðugt at skriva ítøkiliga í serstøku byggisamtyktini. Byggisamtyktin vísir til fylgiskjalið, sum lýsir intentiónirnar fyri øki, og har hetta framgongur.
Somuleiðis verður byggisamtyktin rætta til at fevna um røttu matrikkul nr.
Umsitingin er kunnað um, at eigari av matr. nr. 190 hevur ætlanir um at gera eina takterrassu, og er tað einki í serstøku byggisamtyktini, sum forðar hesum. Tí verður ikki mett neyðugt, at skriva hetta ítøkiliga serstøku byggisamtyktina.
Til viðmerkingina um hvørt nýtslustigið á almenna býarrúminum telur við ella ikki, so er at siga, at galdandi bygningskunngerð ásetur, at undantøk ikki kunnu gerast fyri útrokningarreglur í almennum ella serstøkum byggsamtyktum. Hetta skal skiljast sum at $m^2$ á almenna býarrúminum telja við í nýtslustiginum fyri viðkomandi matrikkul.

*Til eigara av matr. nr. 187 og 188.*
Eitt av aðalmálunum hjá kommununi og býarskipanini, er at skapa lív í býnum. Hóast niðastu hæddirnar á matr. nr. 187 og 188 hava havt ymiskt útvent virksemi gjøgnum tíðirnar, so er ikki vist at hetta kemur at halda fram í framtíðini. Staðsetingin av hesum ognum er sera miðsavnandi kring eitt av okkara høvuðstorgum, og er ynski at økið skal upplivast sum eitt alment atkomuvinarligt økið. Endamálið við kravinum í byggisamtyktini er at tryggja hesi viðurskifti í býnum í framtíðini.
Hóast kravið í byggisamtyktini, so er byggisamtyktin galdandi frá tí hon er endaliga samtykt, og merkir hetta somuleiðis, at kravið verður galdandi frá tá broytingar verða framdar á ítøkiligu matrikklunum.

*Til grannarnar:*
Umsitingin skilur, hvussu ein nýggj lendistrappa og tilhaldsstað niðast á Tróndargøtu kann skapa lív og ferðslu, sum um næturnar kann órógva bústaðarøkið niðast á Tródnargøtu.
Kommunan hevur ikki politiskt avgjørt at miðsavna náttarlívið við skeinkistøðum millum bryggjubakka og Skálatrøð, og er hetta ein so líðandi menning, sum kann broytast í framtíðini.
Umsitingin er til reiðar at arbeiða við einum “náttarlívpolitikki”, sum hevur til endamáls at tryggja at fleiri borgarar kunnu búgva og trívast í miðbýnum, samstundis sum at størsti parturin av náttarlívinum eisini er miðsavnaður har.
Fleiri ítøkilig átøk, so sum skelting, portur, betri bjálving av bygningum við skeinkilovyum, umframt ein endurmeting av galdandi afturlatingartíðum, kunnu gerast í hesum sambandi.
Í hesum sambandi fer umsitingin fyribils at frámæla nýggja lendistrappu millum Grím Kambans gøtu og Vágsbotn, og at hendan kann endurhugsast eftir at fyribyrgjandi átøk eru sett í verk, sum tálma verandi neiligu ávirkanir frá náttarlívinum, sum vera lýstar í teimum mongu mótmælunum frá grannunum.

*Viðvíkjandi hæddini á matr. nr 193*.
Byggiloyvið til bygging av bygningi í trimum hæddum frá Grím Kambandsgøtu er longu givið, sí mál nr: 20/03530. Sostatt kann serstaka byggisamtyktin ikki gera nakað ítøkiligt við givna loyvið. Tó kann upplýsast, at í tilgongini við at gera serstøku byggisamtyktina fyri økið, hava fundir verið millum ymisku eigarnar í økinum og kommununa, har kommunan hevur roynt at lækka byggingina, sum byggiloyvið er

givið til. Hesum kom kommunan ikki á mál við, og tískil ásetur serstaka byggisamtyktin ikki eina lægri hædd.
Serstaka byggisamtyktin ger tað møguligt á hesum matrikklinum at byggja og innrætta enn eina hædd móti sjóvarmálanum, tvs. undir ætlaðu byggingina, sum byggiloyvið er givið til. Krav verður sett um, at hendan hæddin verður við útvendum virksemi.
Eitt av aðalmálunum hjá kommununi og býarskipanini er at skapa lív í býnum. Hendan broytingin er sostatt gjørd fyri at aktivera økið móti sjóvarmálanum.

*Viðvíkjandi hæddini á matr. nr 190*
Vísandi til, at økið, sum talan er um, er staðsett í 2. grundumráðið í almennu byggisamtyktini, so hevur økið, eisini áðrenn serstøku byggisamtyktina, ligið sum byggiøkið við teimum ásetingum, sum 2. grundumráðið ásetur.
Við hesi serstøku byggisamtyktini, so verður økið ítøkiliga skipað og harvið avmarka til einans at kunna byggja á ávísum økjum.
Í greiningartilgongdini av økinum hava sjónar-ásir verið rættiliga stýrandi fyri endaliga uppskotið til skipan av økinum og hvat mælt verður til at leggja sum byggiøki og ikki.
Harafturat er talan um øki mitt í Tórshavnar miðbýi, har tað frammanundan er lutfalsliga tætt millum bygningarnar. Hetta merkir sostatt eisini, at grannar og bústaðir ikki altíð varðveita sítt útsýni so hvørt býurin mennist.
Grundleggjandi metir umsitingin, at tað týdningarmikið at halda fast í megintáttunum fyri skipanina av økinum, og ikki at tillaga byggilinjur o.a. sum víkja frá hesum. Men ynskiligt er at gøtan Grím Kambansgøta við møguligum útvendum virksemið varðveitir sum mest av sólarljósi, samstundis sum at býurin mennist og meirbygging verður framd. Mælt verður til at endurskoða byggilinjuna.

**Nýggj skjøl:**
- *Serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð.pdf,* journal nr 21/00804-51.
- *Viðmerking, Tjóðsavni,* journal nr. 21/00804-50.
- *Viðmerking, eigarar av matr. nr. 190.* journal nr. 21/00804-50.
- *Viðmerking, eigari av matr. nr. 187 og 188,* journal nr. 21/00804-50.
- *8 Mótmælir, umboðandi grannar,* journal nr. 21/00804-50.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at dagføra uppskotið um serstaka byggisamtykt og koyra tað aftur til almenna hoyring, við hesum broytingum:
- Trappan verður endurskoðað soleiðis at sambandið millum Vágsbotn og Grím Kambans gøtu framhaldandi verður avmarkað.
- Ásetingar fyri øki B verða rættaðar, soleiðis at nýtslustigið verður 2,2 og mest loyvda hædd verður 8,5 m.
- Ásetingar vera nágreinaðar, sum í størri mun verja neystið í Vágsbotni og ognina á matr. nr. 192 (“Gamle Danmark”).
- At byggilinjan út móti almenna býarrúminum verður endurskoðað.
- At umsitingin fer undir at gera reglugerð fyri, hvussu og hvar náttarlívið í Tórshavnar kommunu skal skipast.
- At umsitingin fer undir at gera skelting og møguliga portur, soleiðis at grannalív á Tróndargøtu og har umleiðir ikki órógvast ov nógv av náttarlívi.
- At málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, tveimum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Súsanna Olsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg og Annika Olsen.

Blankt atkvøddi: Gunvør Balle.

# 223/24 Heildarætlan fyri matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og b

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.04.2024 | 82/24 | 22/07222-13 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 102/24 | 22/07222-13 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.09.2024 | 149/24 | 22/07222-13 |
| 4 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 223/24 | 22/07222-13 |

**Upprunin til málið**
Kommunan hevur móttikið umsókn, dagfest 30.11.2021, um at byggja íbúðir á matriklunum 1233a og 1233b, millum Oyggjarvegin og Ringvegin. Hetta málið (journal nr. 21/05044) varð viðgjørt innanhýsis, og umsitingin mælti frá at gera serstaka byggisamtykt fyri einans hesar báðar matriklarnar, men heldur at gera eina samskipaða byggiætlan/heildarætlan, við grannaognirnar, matr. nr. 1378 og 1235a, soleiðis at økið verður býarskipanarliga samanhangandi.

Hetta málið snýr seg sostatt um at gera eitt uppskot um eina serstaka byggisamtykt fyri samlaða økið, matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og 1233b.

**Lýsing av málinum**
Eigarin at matr. nr. 1233a og 1233b hevur nú í fleiri ár roynt at fingið kommununa at gera eina nýggja serstaka byggisamtykt fyri umrøddu matriklar. Kommunan hevur víst hesum aftur, grundað á at kommunan ynskir, at alt tað "óbygda" økið (matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og 1233b) eigur at verða skipað í síni heild, og at dámurin so vítt møguligt kemur at hóska til útstykkingina sunnan fyri økið, sum er skipað við sethúsabygging.

Á sumri 2023 vóru eigararnir av øllum matriklunum á fundi við borgarstjóran, formannin í byggi- og býarskipanarnevndini og umsitingina. Á fundunum, sum vórðu hildnir við eigararnar, vísti kommunan á, at kommunan er sinnað at lata gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið, sum loyvir íbúðarbygging, tó treytað av at serstaka byggisamtyktin fevnir um allar matriklarnar. Kommunan vísti somuleiðis á, at ynskiligt er, at økið verður skipað í síni heild, og at eigararnir venda aftur til kommununa við eini felags heildarætlan fyri alt økið.

Harumframt varð víst á, at ynskiligt er, at byggingin verður skipað soleiðis, at byggingin tekur útgangsstøði í dáminum í verandi bygging sunnanfyri, soleiðis at skilja, at byggingin sýnist í skapinum og vavinum at verða skipað í eindum. Tó varð mett, at byggingin kundi skipast sum raðhúsabygging í eindum, og at raðhúsini kundu innrættast við íbúðum. Fyri at byggingin ikki skuldi víkja ov nógv frá verandi bygging sunnanfyri, so varð mælt til, at ovara raðið niðan móti Oyggjarvegnum einans kundi byggjast í 3 hæddum, meðan fremra raðið oman móti Ringvegnum í mesta lagi kundi byggjast í 2 hæddum.

Síðani fundirnar í summar hava eigararnir av matr. nr. 1233a, 1233b og 1235a sent eina felags umsókn upp á skipan av økinum til íbúðabygging, (sí skjal 22/07222-10, *Uppskot - Útstykking á matr. nr. 1233a, b og 1235a)*, meðan eigarin av matr. nr. 1378 hevur sent kommununi eina umsókn um sundurbýti til tvíhús og makaskifti (sí skjal 22/07222-5, *Skriv sent Tróndur Sigurðsson, viðv. matr. 1378 og 1233a - Eyðfinnur Reinert.pdf.).* Felags umsóknin frá matr. nr. 1233a, 1233b og 1235a vísir íbúðarbygging á matr. nr. 1235a og 1233a og b, við blindum vegum frá Skotarók og Oyggjarvegnum

Skrivið frá eigaranum av matr. nr. 1378 vísir møguleikan at útstykkja til 6 tvíhús, treytað av einum gerðabýti við kommununa, har kommunala økið oman móti Vestara Ringvegi og niðan móti Oyggjarvegnum verður latið fyri ein framtíðar veg á ognini, soleiðis at matriklarnir til tvíhúsini gerast 600 m til støddar, ið er minsta kravið sambært byggisamtyktini í A1-øki. Kommunan vísir ætlanini aftur, tí økið niðan móti vegjaðaranum fram við Oyggjarvegnum er bratt lendið, og partur av sjálvum vegnum, og tí økið oman fyri vegjaðaran fram við Vestara Ringvegi er avlagt til eitt framtíðar busssteðgipláss. Somuleiðis er ikki vanligt, at

kommunan ger og eigur vegir í privatum útstykkingum, men yvirtekur kommunan vanliga vegirnar í privatum útstykkingum uttan kostnað, tá útstykkingin og vegirnir eru liðugt gjørdir. Sostatt er ikki grundarlag undir einum gerðabýti, soleiðis at 6 grundstykkir til tvíhús passa á ognina.

Av tí at tað ikki tykist, sum eigararnir av øllum matriklunum kunnu semjast um eina felags loysn, hevur umsitingin tikið stig til at skipa økið við serstakari byggisamtykt, eins og umrøtt á fundum við eigararnar á sumri 2023. Serstaka byggisamtyktin er gjørd við ásetingum, sum vórðu umrøddar á fundunum, og tískil er serstaka byggisamtyktin eitt boð upp á, hvussu kommunan metir, at økið kann verða skipað í síni heild.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og 1233b liggja í umráðispartinum A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har tað m.a. er ásett:
- § 5 stk. 5: Byggistigið má ikki fara upp um 0,3 og nýtslustigið 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir.

- § 5 stk. 7, 8 og 9: Hús mugu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum takið kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.

- § 5 stk. 10: Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Um íbúðir skulu byggjast, er neyðugt at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað vísir seg trupult at fáa skipað økið, eins og umrøtt á fundum við ymisku eigararnar, og tískil er einasta loysnin, at kommunan ger serstaka byggisamtykt, sum ásetur, hvat kann loyvast í økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Umsókn um byggiloyvi til íbúðir á matr. nr. 1233a og 1233b, Oyggjarvegur 7 og 5, Tórshavn,* journal nr. 21/05044.
- *Umsókn um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1233, 1233b og 1235a, Tórshavn,* journal nr. 23/06369.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
- *Uppskot – Serstøk byggisamtykt millum Skotarok og Oyggjarvegin,* journal nr. 22/07222-12.
- *Fylgiskjal 2,* journal nr. 22/07222-15.
- *Fylgiskjal1,* journal nr. 22/07222-15.
- *Skriv sent Tróndur Sigurðsson, viðv. matr. 1378 og 1233a - Eyðfinnur Reinert.pdf*, journal nr. 22/07222-5
- *Uppskot - Útstykking á matr. nr. 1233a, b og 1235a,* journal nr. 22/07222-10

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin, Tórshavn, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

## Ískoyti

Uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt lá til hoyring millum 7. mai og 18. juni 2024. Tá ið hoyringsfreistin var farin, hevði kommunan móttikið tvey mótmælir.

1) Mótmæli frá grannum

Fýra grannar, búgvandi í Skotarók, mótmæla væntandi innlit í møgulig broytt ferðsluviðurskifti, og leggja afturat, at Skotarók vegurin ikki er egnaður til økta ferðslu. Heitt verður á kommununa at veita eina meira ítøkiliga ferðsluætlan, sum tekur hædd fyri møguliga økta ferðslu til og frá nýggjum vegi millum Oyggjarvegin og Skotarók.

2) Mótmæli frá eigara

Eigari av matr. nr. 1378 mótmælir at rinda fyri vegabygging, el-leiðing, frárensl, kloakkleiðingar o.a., av tí at nýggi vegurin kemur at virka fyri aðrar bústaðir, m.a. fram við Skotarók, og møguligum íbúðum á matr. nr. 877a. Eigarin skrivar, at kommunan eigur bæði at rinda fyri veg og annað infrakervi, umframt at rinda endurgjald fyri mist lendi til viðkomandi eigarar.

Eisini verður mótmælt, at kommunan loyvir íbúðarbygging á hesum økinum, sum ikki tekur fagurfrøðilig atlit.

## Upplýsingar frá umsitingini

*Ferðsluviðurskifti:*
Umsitingin hevur umrøtt ferðsluviðurskiftini. Mett verður, at ferðslan eftir Skotarók sannlíkt fer at vaksa nakað, og at størsti parturin av øktu ferðsluni verður frá akførum, sum skulu beinleiðis til og frá Skotarók. Mett verður ikki, at nýggja íbúðarbyggingin førir við sær meiri ferðslu eftir Skótarók, tí væntandi fer ferðslan haðani beinleiðis út á Ringvegin, tá tað verður tann skjótara leiðin til og frá býnum.

Somuleiðis verður mett, at tá innkomuvegurin og nýggi Húsareynstunnilin lata upp seinni í ár, so kemur hetta at hava stóra ávirkan á ferðslumynstrið á Skótarók og øðrum síðuvegum til Oyggjarvegin, tí sannlíkt er, at ferðslan tá fer at nýta innkomuvegin og tunnilin sum alternativt samband til bæði Marknagilsvegin og til Hoyvíkar.

*Hvør skal gjalda fyri vegin:*
Umsitingin vísir á vanligan sið/manngagongd, har tað er skyldan hjá privatum útstykkjarum at gjalda veg, íbindingar og innleggingar, og yvirtekur kommunan eftir umsókn ofta vegin og hevur so statt viðlíkahaldsskylduna, eftir at hann er bygdur.

*Í mun til fagurfrøðilig atlit*
Í § 6 í uppskotinunum stendur:

- Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan.
- Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við nýbygging, út- og umbygging.

Hesar ásetingarnar í stk 1 og 2 eru gjørdar fyri at tryggja fagurfrøðilig atlit og samskifti millum kommunu og byggiharra, við tí vón at tryggja eitt væleydnað úrslit.

**Nýggj skjøl**
*- Viðmerkingar til hoyringsskriv við. uppskot um nýggja serstaka byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin, journal nr. 22/07222-19*
*- Mótmæli.pdf, journal nr. 22/07222-20*
*- SV_Viðmerking til mál 22_07222_Broytt ferðsluviðurskiftir.msg, journal nr. 22/07222-22*

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast við verandi uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og b, og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Birgir Nielsen boðaði frá, at hann er ógegnigur at luttaka í viðgerðini av málinum. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar, og Birgir Nielen fór av fundi, meðan viðgerðin fór fram.

Atkvøtt vaðr um tilmælið frá Byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Elsa Berg, Gunvør Balle og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddi: Annika Olsen.

# 224/24 Umbøn um broyting av byggisamtykt matr. nr. 2a, norðuri á Heyggi 24, Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2023 | 185/23 | 23/00472-4 |
| 2 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 289/23 | 23/00472-4 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.09.2024 | 151/24 | 23/00472-4 |
| 4 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 224/24 | 23/00472-4 |

**Upprunin til málið**
Festari á matr. nr. 2a, Velbastaður, ynskir at ogna sær lendið undir fjósinum, sum stendur á ognini, og í tí sambandi at broyta byggisamtyktina fyri økið til sethúsaøki.

**Lýsing av málinum**
Parturin av matr. nr. 2a, Velbastaður, sum fjósið stendur á, liggur sum J-øki, ætlað bóndahúsum. Økið liggur millum tvey B-sethúsaøki, og tí verður tað mett hóskandi at broyta økið til B-sethúsaøki. Byggingin hevur eina grundvídd, ið er uml. 160 $m^2$, mátað á korti, og um byggingin skal samsvara við ásetingarnar um byggi- og nýtslustig, er tørvur á einum grundstykki, ið er uml. 550 $m^2$ til víddar.

Onnur viðurskifti viðv. byggingini skulu somuleiðis samsvara við krøvini til sethús og sethúsaøki, og skal umsøkjari søkja byggimálsdeildina um hetta.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B: Sethúsaøki í byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað eru m.a.:

- Loyvt er einans at byggja sethús við upp til 2 íbúðum og – eftir serloyvi frá byggivaldinum – tvíhús, rað- og ketuhús o.t. til eitt húski. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum sum sethúsabýlingi.
- Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, sum bygdaráðið hevur góðkent og tryggjað ella eftir serstakari byggisamtykt, kann bygdaráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 400 $m^2$, tó í minsta lagi 320 $m^2$ fyri sethús (einhúskishús) og 260 $m^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.
- Nettonýtingarsstigið má ikki fara upp um 0,3 fyri einhúskishús og 0,4 fyri tvíhús, ketu- ella raðhús.

Ásetingar fyri J: Bóndahús í byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað eru m.a.:

- Øki verður lagt av til bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk, og bert er loyvt at hava eini sethús til hvørt festi.
- Sethúsini skulu annars lúka somu treytir, ið eru galdandi fyri øki B.
- Útstykking má ikki fara fram.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í fyrsta umfari varð søkt um at broyta byggisamtyktina, so fjósið kundi nýtast til virkishús til m.a. upptak av slakti, matskúla fyri børn og ung, verkstovu, skeiðsvirksemi v.m. Síðani hevur umsøkjari broytt umsóknina, og søkir nú um at broyta byggisamtyktina til sethúsaøki.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Ólóligt byggivirksemi á matr. nr. 2a, norðuri á Heyggi 24, Velbastaður,* journal nr. 22/03867.

- *Áheitan á Tórshavnar kommunu at ummæla sølu av lendi sum hoyrr til fjósið á matr. nr. 2a, norðuri á Heyggi 24, Velbastaður,* journal nr. 23/00551.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Matr. nr. 2a – áðrenn broyting,* journal nr. 23/00472-6.
- *Matr. nr. 2a – eftir broyting,* journal nr. 23/00472-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 2a, Velbastaður, sambært kortskjalinum *matr. nr. 2a – eftir broyting,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Uppskotið lá frammi millum 29. novembur 2023 og 17. januar 2024. Tá ið hoyringsfreistin var farin, hevði kommunan ikki mótttikið nakað beinleiðis mótmæli, hóast ein borgari mótmælti sjálvt byggimálið.

Tá ið málið varð lagt fyri Býarskipanarnevndina til endaliga góðkenning, kravdi nevndin, at málið verður betri lýst og sent beinleiðis til viðkomandi partar í hoyringstíðarskeiðinum, áðrenn Býarskipanarnevdin tekur støðu til tilmæli í málinum. (sí *Álit frá Býarskipanarnevndini - Velbastaður.pdf)*

Orsøkin er, at Búnaðarstovan, sum er formligi eigarin av lendinum, ikki er hoyrd beinleiðis í sambandi við málið. Harafturat umfatar broytingaruppskotið, sum hevur ligið frammi, eisini aðrar matriklar enn 2a, Velbastaður. Hesir eru matr. nr. 20, 2c og 2b. Talan er um broyting av ávikavist umleið 13 $m^2$, 3,3 $m^2$ og 1,5 $m^2$, soleiðis at almenna byggisamtyktin verður rættað upp eftir matrikulmarkinum. Broytingin er tískil ein teknisk rætting, sum ikki broytir nýtslu fyri nevndu matriklar. Búnaðarstovan, og eigarar av viðkomandi matriklum verða hoyrdir beinleiðis, um málið verður samtykt.

**Nýggj skjøl**

- *Álit frá Býarskipanarnevndini - Velbastaður.pdf,* journal nr. 23/00472-19.

**Tilmæli**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr 2a, 2b, 2c og 20, Velbastaður, sambært kortskjalinum *matr. nr. 2a – eftir broyting*, treytað av tilsøgn frá Búnaðarstovuni, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

## 225/24 Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 5

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.11.2023 | 208/23 | 23/02842-6 |
| 2 Býráðsfundur | 14.12.2023 | 318/23 | 23/02842-6 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2024 | 62/24 | 23/02842-6 |
| 4 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 65/24 | 23/02842-6 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.09.2024 | 150/24 | 23/02842-6 |
| 6 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 225/24 | 23/02842-6 |

**Upprunin til málið**
Eigarin og umboð fyri eigarar av ognum á Húsabrúgv hevur vent sær til kommununa við áheitan um at gera sáttmála ella aðra binding fyri økið við tí endamáli at varðveita dámin við gomlum siðbundnum húsum í økinum. Ítøkiliga er talan um ognirnar matr. nr. 71, 73, 76, 80, 72a, 72c, 74, 83, 85, 78, 77a, 79, 81, 82a, 82b, 82c og litra æ, ø, z, Tórshavn, sí skjal *VS_Húsbrúgv* og *Ognarar – umsókn.*

**Lýsing av málinum**
Økið liggur í 1. grundumráði í almennu byggisamtyktini, og serstaka byggisamtykt nr. 5 er galdandi fyri økið á Húsabrúgv. Serstaka byggisamtyktin, ið varð gjørd í 1970'unum, skipar økið av nýggjum, hevur nakað tættari bygging enn byggingin, ið er har í dag, og tekur ikki atlit til siðbundna húsasniðið, ið fleiri av húsunum í økinum hava, sí skjal *Fylgiskjal I*. Á fylgiskjalinum sæst m.a., at ætlanin var, at byggingin fram við Áarvegnum skuldi vera samanbygd, meðan økið vestanfyri skuldi gerast til parkeringspláss, og soleiðis skuldu fleiri av eldru húsunum takast niður.

Hugsanin um ynsktu býarskipanina av økinum er broytt, síðani serstaka byggisamtyktin varð gjørd, og umsitingin metir, at nýggja umsóknin er í samsvari við ynskið um at varðveita gomul húsasnið í miðbýnum, soleiðis at nakað av samleika verður varðveitt.

Skotið verður upp at avtaka ætlaðu byggiskipanina og seta áseting í serstøku byggisamtyktina, ið vísir til, hvørji húsasnið byggjast kunnu í økinum. Tilvísingarnar verða til hús, ið eru í økinum frammanundan, og verða mett sum snið, ið umboða dámin, ið ynskið er at varðveita.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Av tí at ætlanin er at broyta ásetingar í serstøku byggisamtykt nr. 5, verður uppsetanin av serstøku byggisamtyktini somuleiðis broytt, soleiðis at hon verður sett upp eftir sama leisti, sum nýggjar serstakar byggisamtyktir verða settar upp.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Nýggja uppskotið ásetir nýggjar reglur fyri bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, og fær hetta avleiðingar fyri ognirnar í økinum.

Aðrir eigarar enn teir, ið umsøkjari umboðar, og Tórshavnar kommuna, eru í økinum og teir eru:
- matr. nr. 70, sp/f Harhog
- matr. nr. 78, Áshild Olsen
- matr. nr. 89b, Føroya Landstýri

Hesar tríggjar ognirnar eru frammanundan í stóran mun fult útbygdar í mun til hædd og byggistig, men uppskotið til nýggja serstaka byggisamtykt hevur meira nágreiniligar ásetingar viðvíkjandi útsjónd og dámi á bygningum. Umsitingin metir, at hetta við tíðini fer at hækka virðið á ognunum í økinum.

Allir eigarar av ognum í økinum fáa kunning um uppskotið til broyting av serstøku byggisamtyktini, og fáa høvið at koma við viðmerkingum.

**Skjøl**

- *Serstøk byggisamtykt nr. 5 – áðrenn broyting,* journal nr. 23/02842-9.
- *Serstøk byggisamtykt nr. 5 – eftir broyting,* journal nr. 23/02842-9.
- *Ognarar – umsókn*, journal nr. 32/02842-8.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtykt nr. 5 sambært skjalinum *Eftir broyting* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 14. desember 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Uppskotið hevur ligið til hoyringar í tíðarskeiðinum 18. desember 2023 til 4. februar 2024, og tá gjørdi eigari av ognum í økinum umsitingina varuga við ta ótíðarhóskandi tekningina í fylgiskjali 1.

Hetta skjalið í galdandi byggisamtyktini (sí *Skjal 1*) vísir mest loyvdu hæddir á bygningunum út móti Áarvegnum, og er teknað fyrst í sjeytiárunum. Tekningarnar í fylgiskjali 1 vísa ikki umstøðurnar í dag, ella tær ætlanir, sum eru fyri økið.

Umsitingin hevur tí dagført fylgiskjal 1 (sí *Skjal 1 – Dagført)* við nýggjari tekning, sum sýnir veruligu umstøðurnar og nýggjar hæddarásetingar, sum vísa, hvussu økið kann mennast í framtíðini.

**Nýggj skjøl:**

- *Serstøk byggisamtykt nr. 5 - 15.02.2024,* journal nr 23/02842-21
- *Skjal 1,* journal nr 23/02842-22
- *Skjal 1 – Dagført* , journal nr 23/02842-22

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtykt nr. 5 sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt nr. 5 – 15.02.2024* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmmælinum.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

## Ískoyti
Uppskotið til serstaka byggisamtykt lág frammi til hoyringar í tíðarskeiðinum 3. mai 2024 til 14. juni 2024, og tá freistin var farin, hevði kommunan móttikið eina viðmerking.

Viðmerkingin er frá granna, sum er samdur við varðveitandi endamálinum við byggisamtyktarbroytingini, men sigur tað vera av alstórum týdningi, at varðveitandi hæddarásetingar eisini vera galdandi fyri bygningarnar, sum venda móti Bringsnagøtu, soleiðis at hesir í framtíðini ikki gerast størri, breiðari og hægri enn teir eru í dag.

Fylgiskjølini nágreina einans hæddarásetingar móti Áarvegnum, og tað merkir, at tað er almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu, ið ásetur treytirnar fyri teir bygningarnar, sum ikki eru fram við Áarvegnum. Økið er í 1. grundumráði, og har eru hæddarásetingarnar hesar:

*4. Hús við vanligari mønureising skulu ikki verða hægri enn 11 m til hægsta punkt við útvegg og 13 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*

*5. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 11 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 13 m til hægsta punkt við útvegg.*

Fram við Bringsnagøtu, og innan fyri umráðið, har serstaka byggisamtyktin er galdandi, standa tríggir bygningar. Teir kunnu sambært byggisamtyktini vaksa í hædd.

Umsitingin er samd við viðmerkingini frá grannanum, men mælir til at góðkenna hesa byggisamtyktina soleiðis sum hon fyriliggur, og á tann hátt fáa hetta málið avgreitt sum skjótast. Síðani kann umsitingin seinni dagføra kortskjølini og nágreina krøvini um hæddarásetingar fyri allar bygningarnar í økinum, í einum nýggjum máli, og á tann hátt ganga ynskinum frá grannanum á møti.

## Nýggj skjøl
- *Hoyringssvar í sambandi við broyting av serstøku byggisamtykt nr 1839592_1_1.PDF,* journal nr 23/02842-30.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtykt nr. 5 sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt nr. 5 – 15.02.2024* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at dagføra kortskjølini og nágreina kortskjølini fyri allar bygningarnar í einum nýggjum máli.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 226/24 Broyting í almennu byggisamtyktini - Umhvørvisstovan krevur serstaka byggisamtykt ísmbv. sundurbýti av matriklum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.09.2024 | 152/24 | 24/06485-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 226/24 | 24/06485-1 |

**Upprunin til málið**
Franciskanarasystrarnar niðurleggja sítt virksemi í Føroyum og skulu avhenda teirra fastognir. Í hesum sambandi skal Mariukirkjan latast katólska kirkjuliðinum í Føroyum. Í dag stendur kirkjan í parti av matr. nr. 779a, eins og annar bygningur (kleystrið), í umráðisparti D3, sum er ætlaður almennum stovnum, skúlaskapi o.t. (sí skjalið *kort av økinum*). Matrikulstovan hevur noktað at sundurbýta matr. 779a, uttan so at serstøk byggisamtykt verður gjørd, samsvarandi við ásetingunum í § 20, stk. 2 í almennu byggisamtyktini, sum fyri D3 økir ásetir, at "Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

**Lýsing av málinum**
Umsitingin metir ikki, at tað er neyðugt at gera nýggja serstaka byggisamtykt fyri D3 økið, har Mariukirkjan stendur. Harafturat hevur Umhvørvismálaráðið í skrivi, dagfest 05.04.2024, heitt á kommununa um framyvir at skipa allar sínar byggisamtyktir í tí almennu byggisamtyktini. Hetta er m.a. fyri at fyribyrgja at borgarar skulu fyrihalda seg til tvey ymisk "sløg" av byggisamtyktum.

Kommunan hevur í løtuni 54 serstakar byggisamtyktir, sum í fleiri førum eru brúktar til at skipa nýggja bygging. Tó tulkar umsitingin orðingina "útstykking" sum býarskipan, sum hevur við bygging (vegir og bygningar) at gera, og ikki sum sundurbýti og samanlegging av matriklum, soleiðis sum Matrikulstovan tulkar orðingina. Fyri at forða hesari óvissuni framyvir og at loyva Mariukirkjuni at standa á egnum matrikli, uttan at umsitingin ger serstaka byggisamtykt, metir umsitingin tað vera skilabest at broyta orðingina í almennu byggisamtyktini soleiðis, at tað framyvir stendur:

*"Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.* ***Henda áseting er ikki galdandi fyri sundurbýti og samanlegging av matriklum."***

Umsitingin mælir til, at hendan rættingin verður skrivað í øllum 9 brotunum har almenna byggisamtyktin krevur serstaka byggisamtykt fyri útstykking. Tað er fyri økispartar A2, A3, C1, C2, C3, D2, D3, E og F, og sæst við grønum liti í viðhefta skjalinum, *Almenna byggisamtyktin eftir broyting*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr. 779a er í D3 øki, har ásetingarnar eru:

§ 20. Ásetingar fyri umráðispart D3 í 3. grundumráði
1. Umráðisparturin verður lagdur til stórar almennar stovnar fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.

2. Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

3. Byggistigið skal, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, ikki fara upp um 0,25.

4. Nýtslustigið skal, fyri eitt natúrligt avmarkað øki ikki fara upp um 0,5.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Kort av økinum,* journal nr. 24/06485-6
- *Almenna byggisamtyktin eftir broyting,* journal, nr. 24/06485-7

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina sambært skjalinum, *Almenna byggisamtyktin eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 227/24 Nýggjar mannagongdir fyri burturbeining av asbest

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.09.2024 | 29/24 | 24/07021-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.09.2024 | 226/24 | 24/07021-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 227/24 | 24/07021-1 |

**Upprunin til málið**
Tyrvingarplássið í Húsahaga er niðurlagt, og skal tí alt asbest nú koyrast norður á nýggja tyrvingarplássið hjá IRF á Nýggjheiðum í Kvívík.

Asbest er sera heilsuskaðiligt og fyri at verja okkara starvsfólk, er bert loyvt at lata tríggjar asbestplátur ella 50 kg. av asbesti beinleiðis inn til Endurnýtsluna á Hjalla. Um talan er um størri nøgdir, skal tað latast beinleiðis til tyrvingarplássið á Nýggjheiðum.

Størri nøgdir av asbesti hava ikki verið móttiknar á Endurnýtsluni fyrr, men av tí at Tyrvingarplássið í Húsahaga er niðurlagt, verður aspest nú latið inn til Endurnýtsluna á Hjalla. Her manglar ein mannagongd, ið tryggjar trygga handfaring og flutning av asbesti.

IRF vil ikki hava, at privatir kundar koma norður til Nýggjheiðar sjálvir, uttan so at tað er gjøgnum KB, og at tað er KB, sum stýrir handfaringini – vegna borgararnar í Tórshavnar kommunu.

Verandi reglugerð um asbest má dagførast og nýggj mannagongd gerast, sum ger tað ómakaleyst hjá borgarum í Tórshavnar kommunu at burturbeina teirra asbest fyri ein fastan kostnað.

**Lýsing av málinum**
Asbest er sera heilsuskaðiligt og krevur tískil serligar reglur og mannagongdir fyri handfaring, flutning og burturbeining. Asbest skal pakkast sera væl inn, so tey vandamiklu evnini ikki fara út í umhvørvið og gera skaða.

Tá ið asbest verður burturbeint, er talan sum oftast um takplátur. Hesin bólkur í reglugerðini kemur undir størri umvælingar av einum húsarhaldi, og verður tí bólkaður sum vinnuligt burturkast. Tískil rindar borgarin fyri burturbeiningina av asbesti, tá talan er um meira enn tríggjar takplátur ella 50 kg. av asbest.

Í løtuni senda IRF og flutningsfyritøkur rokningar til KB fyri viðgerð og flutning av asbest, har KB síðani sendir rokningarnar víðari til borgaran/eigaran. Fyri at sleppa undan hesum, verður sama skipan, sum tey nýta í Danmark, tikin í brúk hjá KB.

Henda skipanin fer at gera tað møguligt hjá borgarum, at keypa stórsekkir (max. 1000 kg.) frá KB til at koyra asbest í fyri ein kostnað, sum umfatar: Sjálvan sekkin til at pakka í, flutning frá niðurtøkustaðnum til Nýggjheiðar og kostnaðin fyri burturbeiningina á Tyrvingarplássið í Kvívík.

Ætlanin er at áseta ein mettan kostnað fyri hesa tænastu, ið inniheldur prísin fyri sekkin, koyring og tyrving hjá IRF. Tá so hetta er gjøgnumført nakrar ferðir, verður prísurin eftirmettur, og ein fastur prísur ásettur.
Lógir, ásetingar o.a.
• §§ 13 og 14 í kunngerð nr. 127 frá 19. oktober 1995 um burturkast, sum seinast broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007
• “Reglugerð um skráseting og gjald fyri gjaldskyldugt burturkast”, ið er samtykt í Tórshavnar býráð 23. februar 2012, og sett í gildi 15. mai 2012

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
24/07021-2 Asbest - Almen kunning
24/07021-3 Asbest - Soleiðis gert tú!
24/07021-4 Reglugerð fyri Asbest 26.08.2024
24/07021-5 asbest-burturkast-reglugerð-2012

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | x | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla nevndini til at taka undir við omanfyri lýstu mannagongd og dagførdu reglugerðini í viðlagda skjali, jnr 24/07021-4 Reglugerð fyri Asbest 26.08.2024 og beina málið í býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Ein borgari, sum burturbeinir meira enn 3 plátur ella 50 kg, skal altíð gjalda fyri burturbeiningina av asbesti ella eternitti – minni nøgd er ókeypis.

Prísurin fyri tyrving á Tyrvingarplássinum í Nýggjheiðum hjá IRF er 2,20 kr/kg u/mvg. Prísurin fyri at tyrva er tann sami fyri allar bólkarnar (blandað tyrving, asbest, glas- og steinull og gips).

Prísurin fyri flutning er uml. 750 kr/tíma u/mvg, og flutningsfyritøkurnar taka minst 3 tímar at koyra til Nýggjheiðar.

Sum dømi kann nevnast, at eini hús á 100 $m^2$ hevur uml. 300 takplátur, har hvør pláta vigar uml. 20 kg. Hetta gevur ein kostnað uppá uml. 13.200 kr fyri at tyrva asbest ella eternit. Harumframt kemur flutningskostnaðurin sum er uml. 2.250 kr (3 tímar koyring á 750 kr/tíma). Hetta gevur ein samlaðan kostnað fyri burturbeining og flutning up á uml. **15.450 kr** fyri 300 stk. asbest ella eternit takplátur.

Ætlanin er at asbest/eternit skal latast inn í stórsekkjum sum fáast frá Brennistøðini.

Út frá miðalútreiðslunum fyri at burturbeina 10 tekjur frá sethúsum, kunnu vit áseta ein prís fyri at keypa ein stórsekk, har bæði fluttningur og tyrving av asbest/eternitt er íroknað prísin fyri stórsekkin. Ein stórsekkur kann í mesta lagi hava 50 stk av takplátum, og merkir hetta, at hvør sekkur kann kosta uml. **2.500 kr/stk u/mvg**.

Kommunan kemur ikki at hava fíggjarligan miss av nýggju skipanini.
Borgarin fær góðkent pakkitilfar, soleiðis at asbest ikki verður veitt út í náttúruna. Eisini sleppru borgarin undan at standa fyri flutninginum.

Málið skal í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. september 2024:** Útsett.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Tikið av skrá.

## 228/24 Tórshavnar havn : Uttanumøkið kring bygningarnar hjá Faroe Ship

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 03.09.2024 | 25/24 | 24/07174-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 212/24 | 24/07174-4 |
| 3 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 228/24 | 24/07174-4 |

**Upprunin til málið**
Byggingin av Skansabryggjuni og nýggjum pakkhúsi og skrivstovubygningi hjá Faroe Ship.

**Lýsing av málinum**
Nú byggingin av nýggja pakkhúsinum, frystigoymsluni og skrivstovubygninginum hjá Faroe Ship á Skansabryggjuni er um at verða liðug, hevur spurningurin um arbeiðsbýti og um býti av kostnaðinum av uttanumøkjunum og frárensluskipanina verið viðgjørdur millum Faroe Ship og Tórshavnar havn.

Uppskot til skipan av uttanumøkjunum kring bygningarnar hjá Faroe Ship er gjørd, j.nr. 24/07174-2 (Rudda tún uppskot 1.pdf), sum fevnir um tún, ymisk álegging, kantsteinar, ljós, uppihald, p-básar v.m. Kostnaðurin fyri hendan partin er roknaður at verða kr. 2.657.500. Partarnir hava gjørt uppskot til arbeiðs- og kostnaðarbýti fyri verkætlanina, soleiðis at hon verður fyrireikað, framd og goldin eftir sama leisti, sum aðrar samsvarandi verkætlanir á nýggju Skansabryggjuni.
Sambært hesum leisti, rindar Tórshavnar havn fyri gerð av uttanumøkjum, meðan Faroe Ship stendur fyri at projektera og fremja arbeiðið sambært fyriliggjandi uppskoti.

Uppgerð er gjørd av kostnaðinum á frárensluskipanini frá bygningunum og fram til íbindingarpunktið við norðara brimgarðin. Samlaður kostnaður av hesum arbeiðinum er kr. 4.315.190, harav Tórshavnar havn áður hevur goldið kr. 750.000. Partarnir hava gjørt uppskot til kostnaðarbýti fyri arbeiðið, soleiðis at tað verður gjørt eftir sama leisti, sum aðrar samsvarandi verkætlanir á nýggju Skansabryggjuni. Sambært hesum rindar Faroe Ship fyri frárensluskipan undir bygninginum og reinsiskipanir, sum hoyra til bygningin, meðan Tórshavnar havn rindar frárensluskipnina á økjunum hjá Tórshavnar havn uttanfyri bygningin. Sambært hesum leisti, skal Tórshavnar havn rinda kr. 3.079.901 av samlaða kostnaðinum á kr. 4.315.190 (harav Tóshavnar havn áður hevur goldið kr. 750.000). Sostatt skal Tórshavnar havn rinda Faroe Ship kr. 2.329.901 aftrat fyri frárensluskipan.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.Nr. 24/07174-1: 20240718 Uppteljing av kloakk.pdf
J.Nr. 24/07174-1: 20240718 Uppgerð av kostnaði.pdf
J.Nr. 24/07174-1: 20240105 FShip V(50)3.1b-Kloakkplanur.pdf
J.Nr. 24/07174-2: Rudda tún uppskot 1.pdf
J.Nr. 24/07174-2: 20240719 Lendið við Umsitingarbygningin.xlsx
J.Nr. 24/07174-3: Notat - Nýtt uppskot til býti/semju við Faroe Ship

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Blað nr.: 999<br><br>Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 7475 | P38 | Skipan av nýggja havnaøkinum | 7475 | P38FS | Skipan av nýggja havnaøkinum - FS | | 4.987.401 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 4.987.401 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til:

- at taka undir við uppskotinum til arbeiðsbýti og býti av kostnaðinum fyri uttanumøkini og frárensluskipanina,
- at játta kr 4.988.000 kr. av íløgum hjá Tórshavnar havn, deild 7475, av projekt P38 – skipan av nýggja havnaøkinum, á projekt nr P38FS – skipan av nýggja havnaøkinum – Faroe Ship.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 03. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býáðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

| | Blað nr.: 1000 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Formansins merki: |

# 229/24 Eykajáttan, lønarlyft og samtyktar stuðulsútreiðslur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.06.2024 | 175/24 | 24/03276-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2024 | 177/24 | 24/03276-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 229/24 | 24/03276-1 |

**Upprunin til málið**
Lønarlyft og framflutt hall á stuðulskontum á §3

**Lýsing av málinum**
Lønarlyftið hjá Pedagogfelagnum, Heilsuhjálparafelagnum og Heilsurøktarafelagnum, sum kom í gildið tann 1. januar 2024, bleiv útgoldið fyri fyrstu ferð í apríl og mai 2024. Lagt er ikki upp fyri hesum lønarlyfti í fíggjarætlanini 2024, tí tað var ógreitt hvørja upphædd talan fór at verða um.

Metingar eru gjørdar av samlaðu útreiðslunum fyri lønarlyftið í 2024. Við eftirløn og arbeiðsmarknaðargjøldum verður hetta mett at kosta í alt kr. 13,8 mió. Sí útrokning niðanfyri:

| | | | Lønarlyft | | | Lønarlyft við eftirløn | | Arb. Markn. Gj. | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | ML / TL | Ársverk | MDR | Ár /Starv | Eftirløn* | pr mánaðarløn | ìalt pr ár | íalt | Frítíðarløn | Løn í alt |
| Heimahjálparar | ML | 35,2 | 1.096,40 | 13.156,80 | 15,0% | 15.130,32 | 532.587,26 | 4,8% | 1,5% | 566.307,49 |
| Heimahjálparar | TL | 73,8 | 1.096,40 | 13.156,80 | 10,0% | 14.472,48 | 1.068.069,02 | 4,8% | 12,0% | 1.253.178,20 |
| Heilsuhjálparar | ML | 60,8 | 1.447,55 | 17.370,60 | 15,0% | 19.976,19 | 1.214.552,35 | 4,8% | 1,5% | 1.291.450,52 |
| Heilsuhjálparar | TL | 12,5 | 1.447,55 | 17.370,60 | 10,0% | 19.107,66 | 238.845,75 | 4,8% | 12,0% | 280.240,58 |
| HRF Heilsurøktarar | ML | 12,1 | 1.390,92 | 16.691,04 | 15,8% | 19.328,22 | 233.871,51 | 4,8% | 1,5% | 248.678,86 |
| HRF Heilsurøktarar | TL | 44,5 | 1.390,92 | 16.691,04 | 10,0% | 18.360,14 | 817.026,41 | 4,8% | 12,0% | 958.626,89 |
| Pedagogfelagið hjálparfólk | ML | 286,0 | 1.065,60 | 12.787,20 | 12,0% | 14.321,66 | 4.095.995,90 | 4,8% | 1,5% | 4.355.329,79 |
| Pedagogfelagið hjálparfólk | TL | 70,8 | 1.065,60 | 12.787,20 | 12,0% | 14.321,66 | 1.013.973,81 | 4,8% | 12,0% | 1.189.707,64 |
| Pedagogfelagið atstøðingar | ML | 5,9 | 2.895,65 | 34.747,80 | 12,0% | 38.917,54 | 229.613,46 | 4,8% | 1,5% | 244.151,21 |
| Pedagogfelagið pedagogar | ML | 214,6 | 1.038,71 | 12.464,52 | 12,0% | 13.960,26 | 2.995.872,31 | 4,8% | 1,5% | 3.185.552,97 |
| Pedagogfelagið pedagogar | TL | 17,2 | 1.038,71 | 12.464,52 | 12,0% | 13.960,26 | 240.116,51 | 4,8% | 12,0% | 281.731,59 |
| **íalt** | | **833,4** | | **15.215,41** | | | **12.680.524,31** | | | **13.854.955,74** |

Mælt verður til at játta kr. 13,3 mió sum eykajáttan til lønarlyftið í 2024.

Nakrar stuðulskontur á §3 høvdu hall í 2023. Hesar upphæddir eru framfluttar til 2024. Sí Journalnr. 24/02033-1. Stuðulskontur á §3 við framfluttum halli, eru tær í yvirlitinum niðanfyri. Talan er um eina samlaða meirnýtslu á í alt kr. 3,1 mió.

| | Tús. kr. | Upprunalig ætlan | Framflutt | Játtað í árinum | Reg. ætlan | Játtan í tíðarskeiði | Bókað higartil | Avlop | Framflyting 31.12.23 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **§3** | **Børn og ung** | **20.300** | **-1.690** | **400** | **19.010** | **19.010** | **22.112** | **-3.102** | **-3.102** |
| 3210 | Hjálp vegna vantandi barnaansing | 300 | -599 | 400 | 101 | 101 | 1.778 | -1.677 | -1.677 |
| 3213 | Systkinaavsláttur | 16.000 | -1.030 | 0 | 14.970 | 14.970 | 15.875 | -905 | -905 |
| 2810 | Fíggjarligt fríplass | 4.000 | -61 | 0 | 3.939 | 3.939 | 4.459 | -520 | -520 |

Meirnýtslan á kontuni Hjálp vegna vantandi barnaansing er kr. 1,7 mió. Orsøkin til meirnýtsluna er, at talið á umsóknum er vaksið nógv í 2023 og longdin á tíðarskeiðinum eisini er vorðin longri.

Kontan Systkinaavsláttur hevur eina meirnýtslu á 905 tkr. Henda konta er tengd at talinum á systkjum og støddini  á foreldragjaldinum. Fleiri útreiðslur vóru til syktkinaavsláttur, enn mett var í fíggjarætlanini 2023.

Fíggjarligt fríplass hevur eina merinýtslu á 520 tkr. Orsøkin er at fleiri fingu fríplass í 2023, enn mett varð í fíggjarætlanini.

| | Býráðsfundur<br>19. september 2024 | Blað nr.: 1001<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

Omanfyristandandi kontur eru av slíkum slag, at tað er ikki møguligt beinleiðis at stýra ella tálma nýtsluni, tá talan er um samtyktar stuðulsútreiðslur. Tá eingin møguleiki er at innheinta undirskot fyri hesar kontur í 2024, verður mælt til at játta kr. 3,1 mió sum eykajáttan.

Mælt verður til at játta í alt 16,9 mió. kr. 3,1 mió til stuðulskonturnar og kr. 13,8 mió til lønarlyftið. Upphæddin verður fíggjað av staðfestum meirinntøkum í árinum. Staðfestar inntøkur vóru ultimo mai 21,5 mió. kr. harav vóru 16,5 kommunuskattur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, fyrisitingarstjórin, trivnaðarstjórin og heilsu og umsorganarstjórin mæla til, at játta kr. 3,1 mió til stuðulskonturnar og kr. 13,8 mió til lønarlyftið, í alt kr. 16,9 mió. Upphæddin verður fíggjað av staðfestum meirinntøkum fyri 2024.

**Fíggjarnevndin 11. juni 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 20. juni 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 230/24 Matarskipan til børn og ung í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 230/24 | 24/07632-1 |

**Upprunin til málið**
Tjóðveldi í Tórshavnar býráði ynskir at fáa mál á skrá til komandi býráðsfund um matarskipan í Tórshavnar kommunu við heitinum Matarskipan til børn og ung í Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum**
Matarskipan í barnagørðum og skúlum verður mett sum ein góð tænasta fyri at veita heilsugóðan mat í tíðini, børnini eru í skúla ella í barnagarði. Royndir í øðrum londum vísa greitt, at ein góð matarskipan er góð fyri trivnaðin hjá børnum. Ein góð matarskipan tryggjar eisini, at okkara børn og ung fáa javnbjóðis atgongd til heilsugóðan mat og stimbrar undir, at næmingar og børn gerast forvitin eftir at royna nýggjan mat. Harnæst kann ein matarskipan stuðla undir føroyskari framleiðslu av grønmeti, læru um burðardygga matmentan og gagnnýtslu av tilfeingi, sum er í nærumhvørvinum.

Matarskipanir í londum kring okkum eru ymiskar, og tí er tað týdningarmikið, at ein matarskipan verður ment, sum egnar seg til Tórshavnar kommunu. Her eiga vit eitt nú at kanna, hvør verandi áhugin hjá børnum, ungum og foreldrum er til eitt slíkt tilboð, hvørt skipanin eigur at verða útbygd stigvíst, og hvussu ein matarskipan kann menna føroysku matskipanina sum heild, millum annað við øktari grønmetisframleiðslu og gagnnýtslu av fiskatilfeinginum.

Tjóðveldi í Tórshavnar kommunu skjýtur tí upp, at arbeitt verður við eini ætlan fyri, hvussu ein matarskipan í Tórshavnar kommunu kann skipast.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
23/03043 Kanna møguleikar fyri at seta í verk matarskipan fyri dagstovnaøkið
19/03706 Matskipan í Skúlanum á Fløtum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | Býráðsfundur<br>19. september 2024 | Blað nr.: 1003<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið í mentamálanevndina og trivnaðarnevndina.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Blað nr.: 1004<br>Formansins merki: |

## 231/24 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 47/24 | 24/00061-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 46/24 | 24/00061-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2024 | 79/24 | 24/00061-1 |
| 4 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 69/24 | 24/00061-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 103/24 | 24/00061-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 107/24 | 24/00061-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 145/24 | 24/00061-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 139/24 | 24/00061-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 20.06.2024 | 191/24 | 24/00061-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2024 | 179/24 | 24/00061-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 19.09.2024 | 231/24 | 24/00061-1 |
| 12 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 231/24 | 24/00061-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Býráðsfundur<br>19. september 2024 | Blað nr.: 1005 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2024:** Framlagt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 20. juni 2024:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 232/24 Matr.nr. 22aa, Kaldbak. Eigarar søkja um loyvi til víðarisølu av ognini.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.09.2024 | 228/24 | 24/07634-2 |
| 2 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 232/24 | 24/07634-2 |

**Upprunin til málið.** Eigarar av matr.nr. 22aa, Kaldbak, hava keypt hús í Kaldbak, og ynskja tí at selja óbygda grundstykkið. Tey hava heitt á ognarmeklara um seta grundstykkið til sølu.

**Lýsing av málinum.**
Matr.nr. 22aa. Við Krossá 6.
Talan er um grundstykki omanfyri vegin. Vídd 520 m²
Grundstykkið er ikki útgrivið.

Sí mál 22/01848, fíggjarnevndin samtykti hin 15. november 2023, ikki at keypa stykkið aftur frá táverandi eigara, men heldur at loyva víðarisølu av grundstykkinum.

Táverandi eigari hevði keypt stykkið fyri tkr. 275, og keyptu núverandi eigarar stykkið fyri somu upphædd. Skeytið var tinglýst 27.03.2024.

**Lógir, ásetingar o.a.** Tinglýstir servituttir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Málslýsing. Mál 22/01848.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at loyva víðarisølu av grundstykkinum, vísandi til at grundstykkið er selt í fríðari sølu.

**Fíggjarnevndin 19. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 233/24 Fólkabókasøvn Samstarvsavtala

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.09.2024 | 152/24 | 24/07283-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.09.2024 | 225/24 | 24/07283-2 |
| 3 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 233/24 | 24/07283-2 |

**Upprunin til málið**
Nýggj lóg um fólkabókasøvn og tænastur

**Lýsing av málinum**
Nýggja bókasavnslógin áleggur fólkabólkasøvnum við útbúnum starvsfólki at samstarva við bókasøvn í teimum kommunum, sum ikki hava starvsfólk við bókasavnsfakligari útbúgving.
Trý bókasøvn hava útbúnar bókavørðar. Bókasøvnini í Klaksvíkar kommunu, Runavíkar kommunu og Tórshavnar kommunu. Almanna- og mentamálaráðið hevur lagt ein leist, at Býarbókasavnið tekur upp samstarv við kommununar fyri sunnan (kommununar í Sandoy og kommunurnar í Suðuroy). Í so fall at semja fæst við Tórshavnar kommunu um hendan leist, skal Kommunufelagið gera avtalur um at býarbókasavnið veitir tænastur við kommunurnar fyri sunnan.

Kommunurnar kunnu søkja um stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum, samsvarandi kunngerð um stuðul til menning av fólkabókasøvnum. Stuðulin hevur seinni árini verið 1,28 mió kr. Men í nýggju bókasavnslógini er stuðulin til menning minkaður til 670tkr til Tórshavnar kommunu og sama upphædd er sett av til Klaksvíkar bókasavn og bókasavnið við Løkin við tí treyt, at ávikavist Runavíkar kommuna og Klaksvíkar kommuna samstarva við aðrar kommunur, sum ikki hava starvsfólk við bókasavns fakligari útbúgving.

Higartil hevur býarbókasavnið søkt um og fingið stuðul svarandi til 1,28 mió kr.
Almanna- og Mentamálaráðið skal í kunngerð lýsa stuðulin áðrenn 1. September. Tórshavnar kommuna hevur kunnað Almanna- og mentamálaráðið um, at málið verður lagt fyri mentamálanevnd í september. Síðani verður kunnað um avgerð nevndsins.
Landið hevur ætlanir um at stuðla keyp av talgildum tænastum við 350.tkr. Býarbókasavnið fær í mesta lagið 150tkr av stuðlinum. Harumframt stuðlar landið við keyp av bókum fyri eina ókenda upphædd. Ein partur av stuðulin til menning av fólkabókasavnstænastu er treytaður av, at kommunurnar í Sandoy og í Suðuroy taka undir við tænastusáttmálanum við býarbókasavnið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 78 frá 1. Juni 2023 um bókasøvn
Kunngerð um stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

| | Blað nr.: 1010 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Formansins merki: |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og býarbókavørður mæla til, at Kommunufelagið ger avtalu við kommunurnar í Sandoy og í Suðuroy um fólkabókasavnstænastur samsvarandi dagførdu kunngerðini og at játta Býarbókasavnið 550 tkr í meirútreiðslu í fíggjarætlanini 2025.

**Mentamálanevndin 11. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Í tilmælinum og samtyktini er av misgáum skrivað, at Kommunufelagið skal gera avtalu við Almanna- og mentamálaráðið um bókasavnstænastur vegna m.a. Tórshavnar kommunu. Tað rætta er, at Tórshavnar kommuna ger avtalu við Almanna- og mentamálaráðið um bókasavnstænastur, og sum eisini er fortreyt fyri bóksavnsstuðlinum til Býarbókasavnið.

Almanna- og mentamálaráðið hevur upplýst, at bókasavnsstuðulin skal flytast í seinasta lagi síðst í september 2024, treytað av, at kommunan hevur samtykt avtaluna.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla fíggjarnevndini til at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at kommunan ger avtalu við Almanna- og mentamálaráðið um bókasavnstænastur. Málið at beina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 19. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 234/24 Endurskoðan av Eldraráðnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 17.09.2024 | 18/24 | 24/07727-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 234/24 | 24/07727-1 |

**Upprunin til málið**
Arbeitt hevur verið við at fáa skipað val til Eldraráðið í Tórshavnar kommunu, sum ætlandi skal vera tann 11. oktober 2024. Tá freistin at stilla upp var farin tann 12. september 2024, høvdu bert tríggir borgarar boðað frá, at tey ynskja at stilla upp.

**Lýsing av málinum**
Eldraráðið er í løtuni samansett av 5 nevndarlimum og 5 varalimum. Til seinasta val í 2020, var trupult at fáa fólk at stilla upp, og tí var freistin fyri uppstilling longd.

Í mai 2024 legði Heilsu- og umsorganartænastan fram eitt tilmæli um, at minka talið av varalimum í Eldraráðnum til 3 limir, soleiðis at Eldraráðið framyvir verður umboðað av 5 limum og 3 varalimum. Heilsu- og eldranevndin samtykti tann 14. mai at taka undir við tilmælinum, sum eftirfylgjandi er samtykt í býráðnum.

Hóast broytingina við færri limum í eldraráðnum, sær framvegis út til at vera torført at fáa nøktandi tal á borgarum at stilla upp til komandi eldraráðsvalið. Freistin fyri at lata seg stilla upp var 12. september 2024, og tá vóru einans 3 borgarar, sum høvdu boðað frá, at tey ynskja at stilla upp.

Sostatt er annaðhvørt neyðugt at leingja freistina fyri uppstilling ella at útseta valið, evt. til aftaná býráðsvalið.

Um freistin verður longd, kemur eldraráðsvalið at liggja tætt upp at býráðsvalinum í november. Í so fall kann Snarskivan fáa avbjóðingar í mun til øktar uppgávur, eitt nú í sambandi við brævatkvøður til komandi býráðsvalið, tá meiri er at gera enn vanligt, eins og nógv gongd er í hølunum hjá Snarskivuni, tá borgarar koma at stemma við brævatkvøðu. Um eini 100 eldri borgarar, sum ikki fara at stemma talgilt, um sama mundi koma í Snarskivuna at stemma til eldraráðsvalið, kunnu umstøðurnar gerast truplari enn neyðugt. Leiðarin í Snarskivuni mælir til at útseta eldraráðsvalið til eftir býráðsvalið.

Um eldraráðsvalið verður flutt til eftir býráðsvalið, veitir hetta samstundis tíð og harvið eisini høvi til at arbeiða við endurskoðan av skipanini við eldraráðið, sum síðani upprunan hevur havt til endamáls at ráðgeva býráðnum í eldrapolitiskum málum og at byggja brúgv millum borgarar og politisku skipanina.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávísøkir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúi í umsitingini mæla eldranevndini til at taka undir við tilmælinum um at útseta val til eldraráðið og at fara undir at endurskoða leistin við eldraráðið áðrenn fari verður undir nýtt val, og at leggja málið fyri býráðið.

**Heilsu- og eldranevndin 17. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 235/24 Dagføring av fyrisitingini á Brennistøðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 12.03.2024 | 16/24 | 24/01095-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 65/24 | 24/01095-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.09.2024 | 227/24 | 24/01095-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 235/24 | 24/01095-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við ynski um at endurskoða burturkastøkið í Tórshavnar kommunu, hevur umsitingin gjørt uppskot til m.a. nýggjan bygnað.

**Lýsing av málinum**
Víst verður til frágreiðing jnr. 24/01098-2, sum er uppskot til broytingar á burturkastøkinum. Í hesi frágreiðing er ein nærri lýsing av málinum.

Sambært frágreiðingini skal verandi bygnaður broytast, soleiðis at eitt leiðslutoymi verður sett á Brennistøðini, sum kann lyfta tær uppgávur, sum Brennistøðin skal taka sær av, harundir rakstur, fíggjarviðurskifti og umhvørvisviðurskifti, umframt at gera neyðugar broytingar í mun til tær ætlanir, sum eru á økinum og tey krøv, sum fara at koma í mun til endurnýtslu, endurvinning og umhvørvi sum heild.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Onki

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í dag eru 4 fólk á skrivstovuni, hetta verður broytt til 5 fólk, og nøkur fáa onnur heiti og verða lyft upp í annan lønarflokk.

Kostnaðurin av at gera hesar broytingar er íalt 1.170.000 kr/ár í rakstri.
Í 2024 verður kostnaðurin 8/12 = 780.000 kr.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Í sambandi við ætlanina eru eisini hesi mál stovnað:
- 24/01097 Leiga av øki á Sundi
- 24/01098 Skipan av virkseminum á Hjalla og á Sundi
- 24/01451 Umbøn um eykajáttan til konto 7110

Felags skjøl liggja í máli nr. 24/01098.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongin

**Skjøl**
jnr. 24/01098-2 Uppskot til broytingar á burturkastøkinum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | **Ja** | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Blað nr.: 1015<br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | **Ja** | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Kr. 1.170.000 pr/ár |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Brennistøðini mæla til, at nevndin tekur undir við at dagføra starvsfólkaviðurskiftini á Brennistøðini, sum lýst í Uppskot um broytingar á burturkastøkinum, jnr. 24/01098-2, treytað av at játtan fæst, sambært jnr. 24/01451-1 og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 12. mars 2024:** Ein meiriluti, Bjørg Dam, Súna Mørk, Gunvør Balle, Turið Horn, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Samtykt at skipa fyri framløgu um broytingar á burturkastøkinum fyri øllum býráðslimum.

**Ískoyti**
Framløga hevur verið fyri býráðslimum.

Síðani eru smærri dagføringar gjørdar í skjali “24/01098-2 uppskot til broytingar á burturkastøkinum”, undir “broyttur bygnaður”, harímillum starvsfólkatørvur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri mælir til sum fyrsta stig at skipa umhvørvisøkið og burturkastøkið við støði í frágreiðingini. Uppskot til broytingar á burturkastøkinum, og í tí sambandi at játta kr. 1.170.000 til lønir á kontu 7110 í 2025.

**Fíggjarnevndin 19. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

# 236/24 Gjaldføri 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.09.2024 | 229/24 | 24/07671-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 236/24 | 24/07671-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært samtykt í Fíggjarnevndini tann 15. februar 2012 og á býráðsfundi tann 23. februar 2012 skal minsta gjaldførið hjá Tórshavnar Kommunu altíð svara til í minsta lagi ein mánaða ella í miðal 8,33% av mettu árligu kommunuskattainntøkunum.

Fyri 2024 er kommunuskattainntøkan mett til 1.011 mió. kr., og harvið er roknaða minsta gjaldførið 84 mió. kr.

**Lýsing av málinum**
Fíggjarstøðan hjá Tórshavnar Kommunu er góð, skuldarlutfallið, sum er samlaða nettoskuldin í mun til skattaálíkningina hjá kommununi, liggur um góð 17% í løtuni, men nógvu útstykkingarnar, bæði til privatar bústaðir og vinnulig endamál tyngja gjaldførið hjá kommununi.

Hetta kemst av, at kommunan í fyrsta umfari leggur út fyri útstykkingarnar fyri síðan at fáa peningin innaftur, so hvørt stykkini verða seld og avhendað. Hetta kann taka nakað av tíð, og tí tyngir hetta um gjaldførið hjá kommununi, meðan útstykkingarnar verða gjørdar klárar, og áðrenn kommunan endaliga hevur selt grundstykkini.

Samlaðu samtyktu útleggingini hjá Tórshavnar Kommunu fyri bæði bústaðar og vinnuligar útstykkingar liggja um 330 mió. kr. Kommunan hevur fingið góðar 60 mió. kr. inn aftur fyri hesi stykkini. Samlaði gjaldføristørvurin fyri samtyktu útleggini er sostatt umleið 270 mió. kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-23/02523 Lántøka og gjaldføri.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
-

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin fara við hesum at biðja fíggjarnevndini mæla býráðnum til, at umsitingini fær heimild til at tryggja kravið um minsta gjaldførið hjá Tórshavnar Kommunu við at hækka kassakredittin um tørvur verður á hesum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>19. september 2024 | Blað nr.: 1019 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

## 237/24 Fíggjarætlan 2025, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.09.2024 | 230/24 | 24/07504-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 237/24 | 24/07504-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 24. oktober og aðru viðger 21. november.

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2025 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 19,00% og 9.000 kr.

Fortreytirnar í uppskotinum eru, at rakstrarútreiðslur kunnu bert hækka, um talan er um:

- lógarkrøv
- býráðssamtyktir íroknað virksemisbroytingar, sum fylgja av nýggjum íløgum
- sáttmálabroytingar og líknandi.

Í talvuni niðanfyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| | | Roknskapur | Ætlan | Ætlan | Ætlan | Broyting 2024/2025 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1.000 kr. | | 2023 | 2023 | 2024 | 2025 | pct. | kr. |
| **Inntøkur** | | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 1.002.375 | 951.000 | 1.011.886 | 1.095.359 | 8,25% | 83.473 |
| 20601 | Felagsskattur | 61.838 | 60.000 | 58.000 | 58.000 | 0,00% | 0 |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 830 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 0,00% | 0 |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 199.714 | 191.862 | 209.753 | 228.443 | 8,91% | 18.690 |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 36.421 | 36.421 | 35.704 | 34.389 | -3,68% | -1.315 |
| 20804 | Kommunanna partur av Veiðigjaldi | 0 | 0 | 0 | 500 | 0,00% | 500 |
| 20805 | Kommunanna partur av Tøkugjaldi | 0 | 0 | 0 | 200 | 0,00% | 200 |
| | **Inntøkur íalt** | **1.301.178** | **1.240.283** | **1.316.343** | **1.417.891** | **7,71%** | **101.548** |
| | | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 95.640 | 100.179 | 100.713 | 105.718 | 4,97% | 5.005 |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 315.928 | 313.190 | 321.960 | 350.808 | 8,96% | 28.848 |
| §3 | Børn og ung | 241.987 | 225.921 | 235.494 | 253.352 | 7,58% | 17.858 |
| §4 | Undirvísing | 50.285 | 51.617 | 56.538 | 58.754 | 3,92% | 2.216 |
| §5 | Mentan og frítíð | 94.724 | 64.636 | 70.350 | 78.997 | 12,29% | 8.647 |
| §6 | Teknisk mál | 157.361 | 152.110 | 156.688 | 167.049 | 6,61% | 10.361 |
| §7 | Kommunal virkir TK | 94.246 | 85.699 | 90.983 | 96.389 | 5,94% | 5.406 |
| | **Rakstur íalt uttan TH** | **1.050.169** | **993.353** | **1.032.726** | **1.111.068** | **7,59%** | **78.342** |
| §7 | Kommunal virkir TH | -38.083 | -40.070 | -36.939 | -36.985 | 0,12% | -46 |
| | **Rakstur íalt** | **1.012.086** | **953.283** | **995.787** | **1.074.083** | **7,86%** | **78.296** |
| | | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 29.795 | 18.000 | 30.000 | 30.000 | 0,00% | 0 |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 1.944 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | -0,02% | 0 |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **31.739** | **20.000** | **32.000** | **32.000** | **0,00%** | **0** |
| | | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **257.353** | **267.001** | **288.556** | **311.809** | **8,06%** | **23.253** |
| | | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 8.564 | 651 | 13.217 | 10.962 | -17,06% | -2.255 |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 4.482 | 5.043 | 5.037 | -0,12% | -6 |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | 2.003 | 0 | 0 | 0 | 0,00% | 0 |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | -500 | 0 | 0 | 0,00% | |
| | **Rentur íalt** | **6.561** | **5.633** | **18.260** | **15.999** | **-12,38%** | **-2.261** |
| | | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **250.791** | **261.368** | **270.296** | **295.810** | **9,44%** | **25.514** |
| | | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **1.234** | **1.234** | **23.033** | **22.733** | -1,30% | -300 |
| | **Avdráttir TH** | **15.180** | **15.873** | **15.873** | **15.874** | 0,01% | 1 |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **234.377** | **244.261** | **231.390** | **257.203** | **11,16%** | **25.813** |
| | | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **211.474** | **225.046** | **215.367** | **241.129** | **11,96%** | **25.762** |

## Búskaparliga gongdin og útlit

Tað hevur verið stór framgongd og framburður í føroyska samfelagnum hesi seinastu árini. Samlaða fólkatalið er vaksið úr 49.785 í 2017 upp í 54.464 í 2023. Hetta er svarar til ein samlaðan vøkstur í fólkatalinum á 4.679 svarandi til 9% í tíðarskeiðnum frá 2017 til 2023. Hetta sama tíðarskeiðið er fólkatalið í Tórshavnar Kommunu vaksið úr 20.850 upp í 23.214, svarandi til 2.364 fólk ella 11%.

Meira enn helvtin av samlaða fólkavøkstrinum í Føroyum hesi seinastu seks árini er sostatt lagdur afturat fólktalinum í Tórshavnar Kommunu. Um hugt verður nøkur ár fram í tíðina, so metir Hagstova Føroya, at samlaði vøksturin í føroyska fólkatalinum verður 1.380 fólk í árunum frá 2025 til 2032, og Tórshavnar Kommuna kemur at eiga nógv tann størsta partin av hesum vøkstrinum, svarandi til 979 fólk.

Fólkavøksturin merkir, at Tórshavnar Kommuna fær fleiri inntøkur í kommunukassan, men fólkavøksturin merkir eisini, at kommunan fær fleiri skyldur og útreiðslur til vælferðartænastur til borgaran og skattgjaldaran í kommununi. Kommunan er til fyri borgaran og skal veita skattgjaldaranum

vælferðartænastur av ymsum slag fyri skattakrónurnar, sum skattgjaldarin rindar í kommunukassan, og tað er fólkasamansetingin og aldursbýti, sum leggja grundarlagið undir, hvussu vælferðartænasturnar verða raðfestar.

Aldurssamansetingin í Tórshavnar Kommunu hevur verið rættiliga støðug tey seinastu árini, men nú kunnu broytingar staðfestast. Tilgongdin av børnum minkar og soleiðis fer gongdin, sambært Hagstovu Føroya, eisini at verða komandi árini. Fólkapyramidan í Tórshavnar Kommunu fer at vaksa í ovara endanum, meðan hon fer at minka í niðara endanum við børnum og ungum. Henda gongdin ávirkar politisku raðfestingarnar í kommununi.

Tað er framvegis stórur vøkstur í virkseminum í føroyska samfelagsbúskapinum, og tí hava hækkingarnar í sáttmálalønunum á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum umframt lønarlyfti til ávísar lønarbólkar stóra ávirkan á fíggjarligu viðurskiftini hjá kommununi. Skattainntøkurnar í ár vera hægri enn upprunaliga mett, men rakstrarútreiðslurnar verða eisini hægri, bæði av stóra vøkstrinum í sáttmálalønunum og lønarlyftinum til ávísar lønarbólkar, sum kostar Tórshavnar Kommunu næstan 14 mó. kr. longu í ár. Lønarlyftið var ikki við í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2024, men verður játtað við eykajáttan.

Í nýggjastu frágreiðing sínari, sum varð almannakunngjørd 2. september í ár, metir Búskaparráðið um gongdina í føroysku bruttotjóðarúrtøkuni, BTÚ, í leypandi prísum í árunum frá 2021 til 2025. Árini 2021 og 2022 eru staðfest úr uppgerðini hjá Hagstovu Føroya, meðan árini frá 2023 til 2025 eru metingar hjá Búskaparaáðnum. Her verður staðfest, at vøksturin var størstur í 2022, tá ið hann var 9,5% í mun til 7,7% í 2021. Síðan metir Búskaparráðið, at árligi vøksturin í búskapinum fer at minka í árunum frá 2023 til 2025. Árligi vøksturin fer at minka úr 5,6% í 2023 til 3,3% í 2025.

Í frágreiðingini vísir Búskaparráðið á, at borgarar og heimliga handilsvinnan framvegis eru bjartskygd, meðan tilfeingisvinnurnar eru minni bjartskygdar um framtíðarútlitini. Inflatiónin er minni nú enn fyri tveimum árum síðan. Brúkaraprístalið hækkaði við 3,0% í øðrum ársfjórðingi í ár samanborið við somu tíð í fjør. Hóast arbeiðsloysið er hækkað eitt vet í seinastuni tíðina, so er tað framvegis sera lágt í altjóða samanhangi. Føroyska arbeiðsloysið var 1,1% í juli 2024.

Búskaparráðið vísir eisini á vandar og avbjóðingar fyri framhaldandi vøkstri í føroyska búskapinum í nýggjast frágreiðing sínari, og tríggjar tær størstu avbjóðingarnar eru framvegis tær somu, sum Búskaparráðið hevur havt ovast á breddanum tey seinastu árini.

Sambært Búskaparráðnum eru tríggjar tær størstu avbjóðingarnar fyri føroyska samfelagsbúskapin framvegis manglandi arbeiðsmegin, avmarkaðir bústaðarmøguleikar og manglandi avlop á almennu fíggjarætlanunum í búskaparligu góðu tíðunum, vit hava havt, hesi seinastu nógvu árini.

Tað skal viðmerkjast, at Tórshavnar Kommuna leggur stóra orku í at skipa nýggju bústaðarútstykkingarnar í kommununi soleiðis, at tær ikki bert vera til sethús, men eisini eitt breitt úrval av øðrum bústaðareindum og leigubústøðum av ymsum slag og stødd.

Hóast ferðin á vøkstrinum í fólkatalinum verður mett at fara at minka komandi árini, so er tørvurin á einum breiðum og fjølbroyttum úrvali av bústøðum framvegis stórur.

Føroyski bústaðarmarknaðurin verður spakuliga meira fjølbroyttur, men føroyski bústaðarmarknaðurin er framvegis einstáttaður. Av øllum búeindum í Føroyum eru 93% sethús og 5% íbúðir. Í Tórshavnar Kommunu eru 86% sethús og 10%íbúðir. Til samanberingar eru 37% av øllum búeindum í Danmark íbúðir, meðan 39% eru sethús.

Politiska skipanin í Tórshavnar Kommunu hevur roynt og roynir alsamt at taka ímóti fólkavøkstrinum í kommuni við skilagóðum og skynsomum raðfestingum í vælferðina og trivnaðin í kommununi.

Av nýggju og stóru íløgunum til ymsu vælferðarøkini í kommununi kunnu nevnast:

### § 2 Almanna- og heilsumál
- Nýtt røktarheim við røktaríbúðum

### § 3 Børn og ung
- Býlingshúsið Vesturi á Flat
- Dagstovnurin á Hamrinum
- Dagstovnurin Hans Andrias Djurhuus, útbygging
- Umbygging av Miðstovninum í Kongagøtu

### § 4 Undirvísng
- Framhaldsdeild í Sankta Frans skúla
- Serstova í Skúlanum á Argjahamri

### § 5 Mentan og frítíð
- Langhyl
- Stórhøll
- Fimleika-/borgarahús í Kaldbak

### § 6 Teknisk mál
- Innkomuveg við íbindingum
- Miðbýarætlan/Havnará
- Græsagarður/spælipláss
- Lendisgøtur
- Náttúruøki í Dalinum Langa
- Bústaðarútstykkingar omanfyri Argjahamar
- Bústaðarútstykkingar á Stórutjørn
- Vinnuútstykkingar á Ovara Hjalla
- Fleiri størri og smærri íløgur í ymsu ítróttaranleggini í kommununi.
- Fleiri størri vega- og kloakkverkætlanir
- Umframt fleiri størri og smærri íløgur í verandi stovnar

**Fíggjarætlanin 2025 hjá Tórshavnar Kommunu í tølum**

***Inntøkur***
Í fíggjarætlanini hjá Tórshavnar Kommunu fyri 2025 verða samlaðu inntøkurnar mettar til 1.417.891 tús. kr. Nógv tær størstu inntøkurnar koma frá vanliga lønarskattinum, sum verður mettur til 1.095.359 tús.kr. Eftir vanliga lønarskattin koma inntøkurnar frá eftirlønarskatti, sum í 2025 verða mettar til 228.443 tús. kr. Síðan koma felagsskatturin og endurgjaldið frá landinum fyri DIS, FAS og aðrar frádráttir á ávikavist 58.000 tús.kr. og 228.443 tús. kr.

Samlaði inntøkuvøksturin hjá Tórshavnar Kommunu í 2025 er sostatt 7,71%, samanborin við fíggjarætlanina 2024.

***Rakstrarútreiðslur***
Í fíggjarætlanini 2025 vera samlaðu rakstrarútreiðslurnar hjá Tórshavnar Kommunu, uttan Tórshavnar Havn, 1.111.068 tús. kr. Íroknað Tórshavnar Havn verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar hjá Tórshavnar Kommunu 1.074.083 tús. kr. í 2025. Netto geva rakstrarinntøkurnar hjá Tórshavnar Havn kommunukassanum í Tórshavnar Kommunu umleið 37 mió. kr. í 2025.

Samlaði vøksturin í rakstarútreiðslunum hjá Tórshavnar Kommunu í 2025 er sostatt 7,59%, uttan Tórshavnar Havn, samanborin við fíggjarætlanina 2024. Lønarlyftið, sum Løgtingið hevur samtykt, kostaði Tórshavnar Kommunu næstan 14 mió. kr. í ár og verður mett at koma at kosta kommununi

umleið taða sama í 2025. Uttan lønarlyftið hevði samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum hjá Tórshavnar kommunu frá 2024 til 2025 ligið um 6,2%.

***Rentur og avdráttir***
Í 2025 verða rentuútreiðslurnar og avdráttirnir hjá Tórshavnar Kommunu nakað minni í mun til fíggjarætlanina 2024. Samlaðu rentuútreiðslurnar verða mettar til 10.962 tús. kr. og samlaðu avdráttirnir verða mettir til 22.733 tús. kr. Hetta er uttan Tórshavnar Havn.

***Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá Tórshavnar Kommunu uttan Tórshavnar Havn***
Tá ið allar rakstrarútreiðslurnar, rentur og avdráttir eru drignar frá samlaðu inntøkunum hjá Tórshavnar kommunum og Tórshavnar Havn er tikin burtur úr, so eru 241.129 tús. kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur hjá Tórshavnar Kommunu í 2025.

***Fíggjarstøðan hjá Tórshavnar Kommunu***
Fíggjarstøðan hjá Tórshavnar Kommunu er góð. Samlaða langfreistaða skuldin er í løtuni 350 mió kr. Skuldarlutfallið, sum er samlaða nettoskuldin í mun til skattaálíkningina hjá kommununi, liggur um 17%.

Orsaka av nógvu útstykkingunum í kommununi, bæði til privatar bústaðir og vinnulig endamál hevur kommunan ein kassakreditt til at tryggja gjaldførið. Hetta kemst av, at kommunan í fyrsta umfari leggur út fyri útstykkingarnar fyri síðan at fáa peningin innaftur, so hvørt stykkini verða selda og avhenda. Hetta kann taka nakað av tíð, og tí tyngir hetta um gjaldførið hjá kommununi meðan útstykkingarnar verða gjørdar klárar, og áðrenn kommunan endaliga hevur selt grundstykkini.

**Skjøl**
-

**Onnur mál, sum kunnu hava týdning fyri málið**
Fíggjarætlan hjá Tórshavnar Havn í 2025.

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan 2025 fyri býráðið innan 1. oktober 2024.

**Fíggjarnevndin 19. september 2024:** Uppskot til fíggjarætlan 2025 framlagt.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Framlagt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 18:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Annika Olsen | Birgir Nielsen |
| | Súsanna Olsen | |